HANS HARRYSON HANSEN

# AFTURSVAR



Ein yrkislig mynd av teimum lærarum, ið tóku prógv á Føroya læraraskúla frá 2007 til 2011

Kanningin er stuðlað av Fólkaskúlagrunninum
Tórshavn, oktober 2012

# Innihaldsyvirlit

Kap. 1.
Inngangur 2

Kap. 2.
Háttalag og mannagongdir 4

Kap. 3.
Høvuðsniðurstøðurnar – í stuttum 7

Kap. 4.
Bakstøðisupplýsingar og variablar 28

Kap. 5.
Lestrartíðin á Føroya læraraskúla 41

Kap. 6.
Fyrsta árið sum lærari 87

Kap. 7.
Hvussu trívist tú sum lærari í dag 109

Kap. 8.
Undirvísingarsýni og undirvísingarhættir 127

Kap. 9.
Nútíðarnæmingurin 145

Kap. 10.
PISA-kanningin og landsroyndin 159

Kap. 11.
Eftirútbúgvingartørvur 176

Kap. 12.
Ískoytisspurningar – ætlaðir skúlastjórum og fyrstu lærarum 189

Keldulisti 193

# Kap. 1

# Inngangur

Kanningin er stuðlað av Fólkaskúlagrunninum.

Endamálið við kanningini er at tekna eina yrkisliga mynd av teimum seinastu lærarunum, ið tóku prógv eftir gomlu læraraútbúgvingini, ið var lýst í "Kunngerð nr. 26 frá 7/5-1991".

Lærararnir, ið eru við í hesi kanning, tóku prógv á Føroya læraraskúla í tíðarskeiðnum frá 2007 til 2011.

Undirritaði er áhugaður í at vita, hvar hesir nýútbúnu lærarar eru í verðini? Hvat teir halda um ta læraraútbúgving, ið teir hava tikið? Hvussu henda útbúgvingin roynist teimum? Hvussu teir skipa sína undirvísing í dag? Hvussu teir síggja og uppfata nútíðarnæmingin? Hvørji linjufak teir høvdu á Føroya læraraskúla, og hvørjum lærugreinum teir undirvístu í skúlaárið 2011/2012? Hvørjar avbjóðingar teir stríðast við dag og dagliga? Hvønn eftirútbúgvingartørv teir hava? Osfr..

4/6-2012 sendi undirritaði 106 lærarum eitt spurnablað við postinum. Saman við spurnablaðnum fingu lærararnir eitt kunningarskriv, har greitt var frá:

- At tað tók umleið 1 tíma at svara spurnablaðnum.
- At spurnablaðið skuldi svarast sum spurnabløð flest. T.e., at svargevin lesur ein spurning í senn og setir kross í ein av svarmøguleikunum. Um so er, at svargevin ikki skilir ein spurning ella ikki kann, vil ella dugir at svara honum, so setir hann ongan kross, men fer til næsta spurning.
- At einstøku spurnabløðini vórðu viðgjørd í trúnaði. T.e., at tað ongastaðni verður ásýniligt, hvat einstaki svargevin hevur svarað.
- At úrslitið av spurnablaðakanningini skal nýtast sum íblástur, tá ið nýggja læraraútbúgvingin verður stillað, og tá ið eitt dygdargott eftirútbúgvingartilboð skal mennast komandi árini.
- Harumframt skal undirritaði skriva nakrar blaðgreinar, ið taka saman um mest áhugaverdu kanningarúrslitini. Greinarnar verða lagdar á heimasíðuna hjá Fróðskaparsetri Føroya og Námsvísindadeild Føroya á vetri 2012 og á vári 2013. Sí www.setur.fo

Spurnablaðið, ið skuldi svarast við hond, umfatar 220 spurningar. Harav eru 8 opnir spurningar. Í opnu spurningunum skulu svargevarnir ikki seta kross, men svara við orðum og setningum.

81 av 106 lærarum svaraðu spurnablaðnum. Svarprosentið er 76,4%, ið má sigast at vera rættuliga stórt. Svartalið hækkaði, tí at tvær áminningar vórðu sendar út í kanningartíðarskeiðnum.

Hans Harryson Hansen,
lærari á Námsvísindadeildini, Fróðskaparsetur Føroya

# Kap. 2

# Háttalag og mannagongd

Kanningin er skipað í 8 sjálvstøðugar og tó samfastar partar.

Partarnir eru:

(1) Bakstøðisupplýsingar
(2) Lestrartíðin á Føroya læraraskúla
(3) Fyrsta árið sum lærari
(4) Hvussu trívist tú sum lærari í dag
(5) Undirvísingarsýni og undirvísingarhættir
(6) Nútíðarnæmingurin
(7) PISA-kanningin og landsroyndin
(8) Eftirútbúgvingartørvur

Spurningarnir, ið settir vera í kanningini, eru hugkveiktir av tí samskifti, ið undirritaði dagliga hevur við lærarar á læraraskúlanum, lesandi á læraraskúlanum, lærarar í fólkaskúlanum og onnur, ið eru áhugað í skúlamálum. Hetta samskiftið snýr seg ofta um tað samband – ella tað vantandi samband – ið er millum lestrarlív og lestraruppgávur á Námsvísindadeildini (Føroya læraraskúla) øðrumegin og veruligt læraralív hinumegin.

Tá ið spurningarnir skuldu orðast nýtti undirritaði ymiskar nýggjar granskingar-verkætlanir sum fyrimynd. M.a. verkætlanir, ið eru framdar av "Danmarks Evalueringsinstitut" og "Dansk Clearinghouse for Uddannelsesforskning".

Kanningin er, sum áður nevnt, skipað sum ein spurnablaðakanning. Fyrimunurin við eini spurnablaðakanning er, at ein lættliga og skjótt kann fáa upplýsingar til vega frá rættuliga nógvum viðkomandi fólkum. Tá ið tað er møguligt at senda spurnabløð aftur og fram við posti, kunnu fólk koma til orðanna, ið búgva úti um landið og eisini uttanlands. Ein annar fyrimunur er, at spurnablaðið er vælkent, so fólk flest kenna mannagongdina. Ein triði fyrimunur er, at svargevin verður ikki ávirkaður av, at ein viðtali er ástaðis. Hetta ber við sær, at svargevin kennir seg meiri ónevndan. Ein fjórði fyrimunur er, at svarini í einum spurnablaði lættliga kunnu flytast inn í eitt dátugrunsforrit. Har kunnu tey viðgerast hagfrøðiliga. Ritmyndir kunnu teknast, og rákgongdir hómast.

Spurnablaðakanningin sum granskingarháttur hevur tó eisini sínar avmarkingar og síni lýti. Í einum spurnablaði eru spurningarnir og svarmøguleikarnir orðaðir frammanundan. Hetta ger kanningina ósmidliga. Svargevin hevur ikki møguleika at greiða neyvt frá síni serligu støðu og sínum hugburði, og tann, ið fremur kanningina, hevur ikki møguleika at spyrja uppaftur, at koma við ískoytisspurningum ella biðja svargevan lýsa síni sjónarmið nærri.

Í eini spurnablaðakanning er tað heldur ikki víst, at svargevin skilir allar spurningarnar. Ymiskir svargevar kunnu tulka orð og hugtøk á ymiskan hátt. Og tað er heldur ikki víst, at svargevin er ærligur og reinmeintur, tá ið hann setir krossin.

Háttalagsgranskarar vísa á, at svargevar, ið seta krossin á sama stað, kunnu gera hetta av sera ymiskum orsøkum. Hetta fær ein ikki eyga á í hagtalsviðgerðini, og tí kann ein spurnablaðakanning stundum vera rættuliga grunnskygd og til tíðir eisini misvísandi.

Tað skal somuleiðis viðmerkjast, at í hesi kanning eru nógvir spurningar afturlítandi. T.e., at svargevin verður biðin um at minnast aftur á og meta um lestrartíðina á Føroya

læraraskúla, fyrstu starvssetanina, fyrstu tímatalvuna, fyrsta starvsárið. Osfr.. Minnið hjá fólki er ikki altíð ein trúsagdur bandupptakari og bandavspælari, og tí kann ein ikki altíð seta líkheitstekin millum tað, ið fólk siga seg minnast í dag, og tað, ið tey veruliga upplivdu fyri fimm ella kanska tíggju árum síðan.

Hesi fyrivarni eigur lesarin at hava í minninum, tá ið hann lesur kanningarúrslitini.

Hyggja vit so nærri at hesi spurnablaðakanning, ið hevur fingið heitið "AFTURSVAR", so er hon bygd upp á tann hátt, at ein spurningur verður orðaður, og síðan hava svargevarnir 5 svarmøguleikar, har svarmøguleikin, ið stendur í miðjuni, er tann mest neutrali ella lutleysi. Tá ið tað er neyðugt ella skilabetri eru svarmøguleikarnir annaðhvørt fleiri ella færri enn fimm.

Einstøku spurningarnir og svarini verða viðgjørd hvør sær. Talvur verða settar upp og ritmyndir teknaðar, ið vísa lutfallið í prosentum. Tá ið tað er viðkomandi, verða spurningar krosskoyrdir, og ein frágreiðing verður givin, tá ið krosskoyringarnar hava týdning. Hugt verður serliga at, hvussu kynsbýti og starvsaldur ávirka úrslitið.

Frágreiðingin er skipað í kapitlar: Kap. 3. Høvuðsniðurstøðurnar – í stuttum. Kap. 4. Bakstøðisupplýsingar og variablar (sp. 1-12). Kap. 5. Lestrartíðin á læraraskúlanum (sp. 13-55). Kap. 6. Fyrsta árið sum lærari (sp. 56-83). Kap. 8. Hvussu trívist tú sum lærari í dag (sp. 84-102). Kap. 9. Undirvísingarsýni og undirvísingarhættir (sp. 103-121). Kap. 10. Nútíðarnæmingurin (sp. 122-136). Kap. 11. PISA-kanningin og landsroyndin (sp. 137-156). Kap. 12. Eftirútbúgvingartørvur (sp. 157-168). Kap. 14. Ískoytisspurningar – ætlaðir skúlastjórum og fyrstu lærarum (sp. 169-171).

# Kap. 3

# Høvuðsniðurstøðurnar – í stuttum

Henda spurnablaðakanning vísir fyrst og fremst, at vit kunnu ikki tekna eina yrkisliga mynd, ið avmyndar ella umboðar øll tey, ið hava tikið lærarprógv eftir gomlu læraraútbúgvingarskipanini seinastu fimm árini.

Orsøkin er hon, at svargevarnir eru ov ymiskir. Svargevarnir vóru longu ymiskir, tá ið teir byrjaðu á lærarskúla, og teir uppfataðu tískil undirvísingartilboðið á lærarskúlanum á ymiskan hátt. Eftir próvtøkuna hava svargevarnir undirvíst ymiskum næmingum og ymiskum flokkum á ymiskum skúlum og hava tessvegna í dag ólíkan hugburð til undirvísingarspurningar, tilfar, foreldrasamstarv, toymissamstarv, námsætlanir, PISA-kanning, landsroynd, eftirútbúgving. Osfr..

Tá ið spurnablaðakanningin verður løgd fram á næstu blaðsíðum verður serliga hugt at, hvat meirilutin heldur og sigur. Í onkrum førum eru svargevarnir rættuliga samdir og meirilutin stórur. Í øðrum førum eru svargevarnir rættuliga ósamdir og meirilutin lítil. Men líkamikið hvat, so umboðar meirilutin bara meirilutan og ikki allar svargevarnar. Hetta er týdningarmikið at minnast til, tá ið ein lesur úrslitið av júst hesi spurnablaðakanning.

Fyri at fingið størri og neyvari innlit í teir tættir, ið henda spurnablaðakanning roynir at varpa ljós á, skuldi ein viðtalskanning verið framd, har nakrir svargevar fingu høvi at lýst bæði lestrarlívið og læraralívið gjøllari. – Hetta verður ikki gjørt á hesum sinni.

Úrslitini av spurnablaðakanningini eru:

## Bakstøðisupplýsingar og variablar (Sp. 1-12)

- 92,6% av øllum svargevunum arbeiddu sum fólkaskúlalærarar skúlaárið 2011/2012.

- 90,1% av svargevunum arbeiddu sum lærarar í føroyska fólkaskúlanum skúlaárið 2011/2012. Tað eru 9 av hvørjum 10 svargevum.

- 6,2% av øllum svargevunum eru farnir undir hægri lestur. *(T.e. 13% av mannligu svargevunum og 5,2% av kvinnuligu svargevunum).*
    - 2/3 av teimum, ið taka eina MA ella eina kandidatútbúgving, taka eina útbúgving, ið byggir á læraraútbúgvingina, meðan 1/3 hevur hálsað um og er byrjaður av nýggjum.

- 58,4% av svargevunum undirvístu skúlaárið 2011/2012 í Streymoy, 23,6% í Eysturoy, 5,5% í Vágoy, 5,5% í Sandoy ella Suðuroy, 4,2% í Norðoyggjum og 2,8% uttanlands.

- 53,4% av svargevunum undirvístu skúlaárið 2011/2012 í skúlum, ið høvdu fleiri enn 301 næmingar. 11% undirvístu á skúlum, ið høvdu millum 201 og 300 næmingar, 12,3% undirvístu á skúlum, ið høvdu millum 101 og 200 næmingar, 11% undirvístu á skúlum, ið høvdu millum 51 og 100 næmingar. Og 12,3% undirvístu á skúlum, ið høvdu 50 næmingar ella færri.

- Tað eru lutfalsliga fleiri mannligir svargevar, ið undirvísa á skúlum, ið hava fleiri enn 200 næmingar (m: 76,2%, k: 59,6%) og lutfalsliga fleiri kvinnuligir svargevar, ið fáa starv á skúlum, ið hava færri enn 200 næmingar.

- Á læraraskúlanum valdu svargevarnir trý linjufak. 41,3% av svargevunum siga, at teirra linjufaksprofilur hevur havt ávirkan á, um teir hava fingið tey størv, teir hava søkt. 33,3% siga, at linjufaksprofilurin ikki hevur havt nakra ávirkan, meðan 25,4% siga seg ikki duga at meta um samheingið.

- Tað eru luftalsliga fleiri mannligir svargevar, ið siga, at linjufaksprofilurin hevur ávirkað teirra starvsmøguleikar. *(Prosentmunurin er: m: 52,4%, k: 35,7%)*

- Um ein samanber svargevar, ið tóku prógv milum 2007 og 2011, so er tað einki, ið bendir á, at skúlaleiðslur geva linjufaksprofilinum størri gætur nú enn fyri 4-5 árum síðan.

- Tímatalvurnar hjá svargevunum eru sera ymiskar. Nakrir svargevar undirvísa annaðhvørt bara ella næstan bara í sínum linjufakum. Aðrir undirvísa annaðhvørt ikki ella næstan ikki í sínum linjufakum. Nakrir svargevar undirvísa bara ella næstan bara í einari deild (annaðhvørt grunddeild, miðdeild ella hádeild). Aðrir undirvísa í øllum deildum og á øllum floksstigum. Nakrir svargevar undirvísa nógvar tímar í fáum flokkum og fáum lærugreinum. Aðrir undirvísa fáar tímar í nógvum flokkum og nógvum lærugreinum.

- 20,6% av svargevunum undirvístu "meiri enn fulla tíð" skúlaárið 2011/2012. 45,6% undirvístu "fulla tíð". Meðan 33,8% undirvístu "minni enn fulla tíð".
    - Mannligir svargevar undirvísa nógv fleiri tímar um vikuna enn kvinnuligir svargevar. *(38,9% av mannligu svargevunum undirvístu farna skúlaárið "meiri enn fulla tíð". 52,9% undirvístu "fulla tíð").*
    - 42% av kvinnuligu svargevunum undirvístu "minni enn fulla tíð" skúlaárið 2011/2012*. (14% av kvinnuligu svargevunum undirvístu "meiri enn fulla tíð" og 44% undirvístu "fulla tíð").*
    - 61,5% av kvinnuligu svargevunum, ið tóku prógv í 2011, undirvístu skúlaárið 2011/2012 "minni enn fulla tíð".

- 22,2% av svargevunum, ið tóku prógv í 2011, undirvístu skúlárið 2011/2012 "meiri enn fulla tíð". – Hetta er eitt høgt prosenttal, tá ið hugsað verður um, at rákið í øðrum londum er, at fyrstaárslærarar undirvísa niðursetta tíð og hava regluligt samband við útbúgvingarstaðið.

- 52,5% av samlaða tímatalinum, ið svargevarnir lósu skúlaárið 2011/2012, varð lisið í lærugreinum, ið svargevarnir høvdu havt sum linjufak, meðan 47,5% varð lisið í lærugreinum, ið svargevarnir ikki høvdu havt sum linjufak.

- Í nøkrum lærugreinum undirvísa nærum bara linjufakslærarar. T.d. í alisfrøði (95,5%), í týskum (82,8%) og í lívfrøði (78,3%).

- Í øðrum lærugreinum verða nógv færri tímar lisnir av linjufakslærarum. T.d. í føroyskum (54,1%), í landalæru (34,8%), í kristni (33,3%) og í donskum (29,4%). Prosentbýtið kann vera tekin um, hvørji linjufak lærarar á einum og

sama skúla hava sammett við teir tímar, ið skulu lesast á skúlanum. Prosentbýtið kann somuleiðis vera tekin um, hvørja virðing einstøku lærugreinarnar hava í føroyska skúlanum.

- Hóast munurin ikki er alstórur, so er rákið, at tess størri skúlin er, tess fleiri tímar verða lisnir av linjufakslærarum.

- Mannligir svargevar undirvístu skúlaárið 2011/2012 nógv færri tímar á grunddeild enn á hinum deildunum.

- Kvinnuligir svargevar undirvístu skúlaárið 2011/2012 flestar tímar á grunddeild.

## Lestrartíðin á Føroya læraraskúla (Sp. 13 – 55)

- 18,5% av svargevunum siga, at teir altíð hava ætlað at verið lærari. *(T.e. 20,7% av kvinnuligu svargevunum og 13% av mannligu svargevunum).* 81,5% siga, at hugurin til lærarayrkið er komin við tíðini.

- 65% av svargevunum siga, at teir høvdu valt læraraútbúgvingina aftur, um teir fingu høvi at velja einaferð afturat. 30% siga seg ivast. Meðan 5% høvdu valt okkurt annað. – Tað er ongin kynsmunur í hesum sambandi.

- 49,5% av svargevunum siga, at um teir ikki høvdu lisið til lærara, so høvdu teir farið undir eina akademiska útbúgving. *(T.e. 65,2% av mannligu svargevunum og 41,8% av kvinnuligu svargevunum*). 24,1% høvdu tikið eina aðra miðallanga útbúgving.

- 66,7% av svargevunum høvdu annaðhvørt undirvísingarroyndir í fólkaskúlanum áðrenn lestrarbyrjan ella arbeiddu sum vikarar í lestrartíðini. Ella bæði/og.

- 33,3% av svargevunum høvdu ongar undirvísingarroyndir annað enn starvsvenjingina, tá ið teir stóðu prógv.

- 87,7% av svargevunum trivust annaðhvørt "sera væl" ella "væl" á Føroya læraraskúla. Hetta er eitt sera stórt prosenttal. 8,7% trivust "toluliga", meðan 3,7% trivust annaðhvørt "illa" ella "sera illa".

- Kvinnuligir svargevar trivust betur á Føroya læraraskúla enn mannligir svargevar.

- 82,8% av svargevunum tóku læraraútbúgvingina í stórum álvara. Teir lósu nógv og gjørdu sær stóran ómak við uppgávum, próvtøkum og øðrum. Hetta er eitt stórt prosenttal! 12,3% gjørdu "eitt sindur við" útbúgvingina, meðan 4,9% gjørdu annaðhvørt "lítið" ella "einki" við útbúgvingina.

- Kvinnuligir svargevar tóku sum heild útbúgvingina í størri álvara enn mannligir svargevar.

- Eingin svargevi heldur, at læraraútbúgvingin var "sera trupul" at standa. 11,1% halda, at hon var "trupul". 70,4% halda, at hon var "ikki serliga trupul". 12,3% halda, "at hon var løtt". Og 6,2% halda, at hon var "sera løtt".

- Mannligu svargevarnir halda sum heild, at læraraútbúgvingin var lættari at standa enn kvinnuligu svargevarnir.

- Á Føroya læraraskúla høvdu svargevarnir nakrar kravdar grundlærugreinar. Hesar vóru: Føroyskt, rokning/støddfrøði, danskt, ítrótt, handarbeið/smíð/tilevning/ heimkunnleiki, kristnikunnleiki, sangur/tónleikur, skriving, samtíðar- og samfelagskunning.
    - Fjøldin av svargevunum sigur seg hava fingið annaðhvørt "sera nógv" ella "nógv" burturúr føroyskum og annaðhvørt "nógv" ella "eitt sindur" burturúr ítrótti, kreativu grundlærugreinunum, kristnikunnleika og skriving. Svargevarnir halda somuleiðis, at tað, ið teir lærdu í hesum grundlærugreinum, hevur gjørt teir til betri lærarar í hesum lærugreinum í dag. - Hinar grundlærugreinarnar fáa ikki eins góð ummæli.

- Á Føroya læraraskúla valdu tey lesandi sær 3 linjufak. Teir allarflestu svargevarnir siga, at teir valdu tey linjufak,
    - ið høvdu teirra áhuga,
    - og sum teir kendu seg fakliga stinnar í frammanundan.

- Einum stórum meiriluta av svargevunum, ið valdi eitt linjufak, tí teir mettu, "at linjufakið var lætt at koma ígjøgnum" ella tí, at teir hildu seg "duga illa fakið frammanunandan" (1) dámar illa at undirvísa í hesum fakinum í dag, (2) kenna seg sum annaðhvørt "hampuligar" ella "vánaligar lærarar" í hesum fakinum og (3) høvdu ikki valt linjufakið aftur, um teir fingu høvi til tess.

- 31,1% av svargevunum halda seg vera eins góðar lærarar í øllum trimum linjufakum. Meðan heili 68,8% halda seg ikki vera eins góðar lærarar í øllum trimum linjufakum. *(Nakrir svargevar siga m.a., at teir meta seg vera "sera góðar lærarar" í einum linjufaki, "góðar" í einum øðrum og "hampuligar" ella "vánaligar" í einum triðja).* – Hesar útsagnir og hesar sjálvsmetingar skaka ta fatan, ið sigur, at lærarar eru annaðhvørt góðir ella ikki.

- Mannligir svargevar undirvísa munandi meiri í sínum linjufakum enn kvinnuligir svargevar.

- 42% av svargevunum siga, at teir lærdu annaðhvørt "sera nógv" ella "nógv" í linjufakslestrinum, ið teir kunnu nýta í øðrum lærugreinum. 40,7% siga, at teir lærdu "eitt sindur", meðan 17,3% siga, at teir lærdu "lítið" ella "einki", ið kann flytast millum lærugreinarnar. *(Svargevar, ið hava havt linjufak, ið hoyra til sama høvuðsbólk - annaðhvørt málvísindi, hugvísindi, náttúruvísindi, samfelagsvísindi, kreativu lærugreinarnar og støddfrøði - , siga seg sum heild hava fingið meiri av fakdidaktiskum førningi, ið kann flytast frá lærugrein til lærugrein).*

- 62,4% av svargevunum halda, at linjufakslesturin skuldi fylt annaðhvørt "nógv meira" ella "meira" í læraraútbúgvingini. 33,8% halda, at vavið var hóskandi,

meðan bara 3,8% halda, at linjufakslesturin skuldi fylt annaðhvørt "minni" ella nógv minni".

- 58,8% av svargevunum lærdu annaðhvørt "sera nógv" ella "nógv" av starvslæruni. 27,5% lærdu "eitt sindur", meðan 13,7% lærdu "lítið". Eingin svargevi lærdi "einki". *(Svargevar, ið vóru uttanlands í starvslæru viðmerkja, at útlendskir starvslærarar duga betur at seta krøv til tey lesandi og at geva nágreiniliga eftirmeting).*

- Svargevarnir siga, at í starvslærutíðini lærdu teir mest av:
    - At undirvísa sjálvir (72,8%)
    - At eygleiða starvslæraran (37%)
    - At fyrireika starvslæruna (35,8%)
    - Svargevarnir siga seg læra lítið av at eygleiða onnur lesandi (6,2%)
    - Konferensutímarnir úti á skúlunum og framløgutímarnir á læraraskúlanum fáa heldur ikki góð skotsmál.

- Eingin svargevi sigur, at <u>starvslæra</u> og <u>veruligt læraralív</u> hava nógv til felags. 48,1% av svargevunum siga, at starvslæra "í ein ávísan mun" kann samanberast við "at vera lærari", meðan 51,9% halda ikki, at starvslæran og starvið sum lærari eru sambæriligir leiklutir.

- Tá ið svargevarnir verða spurdir, hvønn part av læraraútbúgvingini, teir hava havt størst gagn av, síðan teir gjørdust lærarar, siga teir:
    - Linjufakslestrinum (66,7%)
    - Námsfrøði og sálarfrøði (32,1%)
    - Starvslæruni (23,5%)
    - Bókligu grundlærugreinunum (17,3%)
    - Kreativu grundlærugreinunum (7,4%)

- Svargevarnir siga, at teir høvdu avmarkaða vitan um ymiskar undirvísingarhættir og lærutilgongdir, tá ið teir fóru av læraraskúlanum.
    - Tann undirvísingarháttur, ið svargevarnir siga seg hava størstu vitan um og innlit í, var vanlig floksundirvísing/talvuundirvísing. Tínæst bólkaarbeiði og evnisarbeiði.
    - Vitanin um og kunnleikin til verkætlanararbeiði, verkstaðararbeiði, søgutráð, kooperativa læring, MI-ástøðið hjá Gardner, ástøðið um læringstílar hjá Dunn & Dunn og ikki minst fyrireikingar- og eftirmetingarfrymlar var lítil og eingin.

- Svargevarnir siga, at tá ið teir fingu prógv, høvdu teir sera avmarkaða vitan um grundleggjandi tættir í lærarayrkinum so sum at (1) næmingalaga undirvísingina, (2) at eftirmeta undirvísingina, (3) at gera eina ársætlan, (4) at nýta KT í undirvísingini, (5) at skipa foreldrafund, (6) at skipa heimaarbeiði, (7) hvussu ein undirvísir næmingum við serligum tørvi og (8) at stýra og fáa tamarhald á einum flokki.

- 46,9% av svargevunum siga, at tað, teir lærdu í námsfrøði og sálarfrøði, hevur gjørt teir til betri undirvísarar. 21% siga, at tað, teir lærdu í hesum lærugreinum,

ikki hevur gjørt teir til betri undirvísarar. 32,1% duga ikki at meta um samanhangin.

- 75% av svargevunum siga, at náms- og sálarfrøði eigur at fylla annaðhvørt "nógv meira" ella "meira" í læraraútbúgvingini. *(Náms- og sálarfrøði hevur størri hevd millum kvinnur enn menn).*

- 40,5% av svargevunum siga, at teirra fatan av, hvussu góð undirvísing eigur at vera skipað, broyttist annaðhvørt "sera nógv" ella "nógv" í lestrartíðini. 41,8% siga, at teirra undirvísingarfatan broyttist "eitt sindur", meðan 17,7% siga, at undirvísingarfatanin broyttist annaðhvørt "lítið" ella "einki". *(Kvinnur eru meiri ávirkiligar og broytiligar enn menn).*

- 26,2% av svargevunum kendu seg "væl og virðiliga" til reiðar at fara undir læraragerningin eftir loknan lestur. 57,5% kendu seg "í ein ávísan mun" til reiðar, meðan 16,3% kendu seg als ikki tilbúgvin.

- 3,8% av svargevunum siga, at tað er "sera stórt samband" millum tað, ið ein lærdi á læraraskúlanum og tær uppgávur og avbjóðingar, ið ein lærari skal loysa í dagsins skúla. 2,5% siga, at tað er "einki samband". Restin – t.e. 93,7% - halda, at tað er annaðhvørt "eitt ávíst samband" ella "lítið samband" millum lestrarlív og lestraruppgávur øðrumegin og veruligt læraralív hinumegin.

- Tá ið svargevarnir verða spurdir, hvørji evni, temu og uppgávur, eiga at fylla meiri í læraraútbúgvingini, svara teir:
    - At tann lesandi fær høvi at arbeiða við síni egnu læraraatferð og sínum egna lærara- og undirvísingarstíli.
    - At tann lesandi fær størri kunnleika um gerandisdagin í fólkaskúlanum.
    - At tann lesandi fær størri vitan um læraran og allar hansara samstarvs- og samskiftisfelagar.
    - At tann lesandi fær størri innliti í, hvat eyðkennir nútíðarnæmingin og hansara gerandislív og áhugamál.
    - At tann lesandi gerst kunnugur við ymiskar undirvísingarhættir og lærutilgongdir.
    - At tann lesandi fær innlit í fjølbroytt undirvísingartilfar.
    - At tann lesandi lærir at orða eina ársætlan.
    - At tann lesandi lærir at eftirmeta næmingar, at geva ársmet, at skipa eina próvtøku og at geva próvtøl.
    - At tann lesandi lærir at undirvísa næmingum, ið hava serligan tørv.
    - At tann lesandi lærir at nýta KT sum undirvísingaramboð.

## Fyrsta árið sum lærari (Sp. 56 – 83)

- 86,4% av svargevunum søktu starv sama ár, sum teir vóru lidnir á læraraskúla.

- 97% fingu starv beinavegin. 1,5% fingu starv, áðrenn eitt fjórðingsár var gingið, og 1,5% fingu starv, áðrenn eitt hálvt ár var gingið.

- Tá ið svargevarnir byrjaðu sum lærarar, vóru teir sum heild sera væl móttiknir av skúlans leiðslu, nýggju starvsfeløgunum, næmingum og foreldrum.

- 42,3% av svargevunum fingu ein kontaktlærara. 57,7% fingu ongan kontaktlærara.

- 95% av svargevunum halda, at nýútbúnir lærarar hava tørv á at hava ein kontaktlærara, ið hevur til uppgávu at leiðbeina teir, og sum teir kunnu spyrja til ráðs.

- 52,6% av svargevunum siga, at skúlans leiðsla tók teir við upp á ráð, tá ið tímatalvan var løgd. 47,4% siga seg ikki verða spurd eftir. *(Fleiri menn enn kvinnur siga seg verða tiknan við uppá ráð, tá ið tímatalvan var løgd).*

- 39,7% av svargevunum siga, at teir fingu "eitt sera gott skema", ið legði upp fyri, at teir vóru nýggir í starvi. 41% siga, at teir fingu "eitt lutfalsliga gott skema". 16,7% siga, at teir fingu eitt "strævið skema", meðan 2,6% siga, at teir fingu "eitt sera strævið skema". *(At so nógvir svargevar halda, at teir fingu eitt gott skema fyrsta árið, kvinkar og vikar ta íspunnu søgu, ið sigur, at nýútbúnir lærarar altíð fáa strævin skemu og strævnar flokkar. At nýútbúnir lærarar verða settir á uriaspostar).*

- 71,3% av svargevunum siga, at tað hevði verið annaðhvørt "nógv truplari" ella "truplari" at byrja sum lærari, um teir ongantíð høvdu verið í starvslæru.

- 85,7% av teimum, ið siga, at tað <u>ikki</u> hevði verið truplari at byrja sum lærari, um teir ongantíð høvdu verið í starvslæru, høvdu undirvísingarroyndir annaðhvørt áðrenn lestrarbyrjan ella í lestrartíðini.

- 92,9% av teimum, ið ongar undirvísingarroyndir høvdu – hvørki fyri lestrarbyrjan ella í lestrartíðini – siga, at tað hevði verið annaðhvørt "nógv truplari" ella "truplari" at byrja sum lærari, um tey ongantíð høvdu verið í starvsvenjing.

- 6,4% av svargevunum undirvístu fyrsta undirvísingarárið 100% av tíðini í sínum linjufakum. 14,3% undirvístu milum 0-24% av tíðini í sínum linjufakum. Restin undirvísti millum 25 og 75% av tíðini í sínum linjufakum.

- 51,9% av svargevunum undirvístu annaðhvørt í fýra ella fimm lærugreinum fyrsta undirvísingarárið. Restin undirvísti í annaðhvørt fleiri lærugreinum ella færri lærugreinum. *(Gev gætur: 6,5% av svargevunum undirvístu í 8 lærugreinum).*

- 56,4% av svargevunum undirvístu í annaðhvørt trimum, fýra ella fimm flokkum fyrsta undirvísingarárið. Restin undirvísti annaðhvørt í fleiri ella færri flokkum. *(Gev gætur: 3,8% undirvístu í 8 flokkum og 1,3% undirvístu í 9 flokkum).*

- 50% av svargevunum undirvístu á annaðhvørt 3 ella 4 flokksstigum fyrsta undirvísingarárið. Restin undirvísti á annaðhvørt fleiri ella færri flokksstigum. *(Gev gætur: 17,1% undirvístu á 7 flokksstigum).*

- 24,4% av svargevunum undirvístu "meiri enn fulla tíð" fyrsta undirvísingarárið. 55,2% undirvístu "fulla tíð", 12,8% undirvístu "3/4 tíð", 3,8% undirvístu "½ tíð" og 3,8% undirvístu "minni enn hálva tíð".

- 11,4% av svargevunum siga, at teir fyrsta undirvísingarárið undirvístu í "fleiri skúlafakum", ið teimum ikki hóvaði. 32,9% siga, at teir undirvístu "í einstøkum skúlafakum", ið teimum ikki hóvaði.

- 9,1% av svargevunum siga, at teir fyrsta undirvísingarárið undirvístu í "fleiri skúlafakum", har teir ikki kendu seg fakliga nóg stinnar. 40,3% siga, at teir undirvístu í "einstøkum skúlafakum", har teirra fakligi førningur var ivasamur.

- Skúlafak, ið nýútbúnir lærarar hava minst tokka til, og sum teir halda vera serliga trupul at undirvísa í, eru landalæra, kristni, danskt og N&T.

- 38,5% av svargevunum siga, at teir nýttu annaðhvørt "ein stóran part" ella "ein part" av tí, ið teir høvdu arbeitt við á læraraskúlanum, í undirvísingini í fólkaskúlanum. 41% siga, at teir nýttu "okkurt", meðan 20,5% siga, at teir nýttu millum "lítið" og "einki". *(Prosenttølini vísa, at "copy/paste funksjónin" sjáldan kann nýtast í umskiftinum frá læraraskúla til fólkaskúla).*

- Eingin svargevi sigur seg hava "sera stóra vitan" um lærubøkur og lærubókaskipanir í ymiskum fakum og ymiskum aldursbólkum, tá ið hann fekk handað prógv. 9% siga seg hava "stóra vitan", 55,1% siga seg "vita eitt sindur", 34,6% siga seg hava "lítla vitan" og 1,3% siga seg hava "onga vitan".

- 70,5% av svargevunum hugsaðu "ongantíð" um at gevast fyrsta undirvísingarárið. 19,2% hugsaðu "onkuntíð" um at gevast, meðan 10,3% hugsaðu "ofta" um at gevast.

- 60,3% av svargevunum siga, at teir "ongantíð" hugsaðu, at teir høvdu valt skeiva yrkisleið fyrsta undirvísingarárið. 32% siga, at teir "onkuntíð" hugsaðu, at teir vóru á skeivari leið, meðan 7,7% siga, at teir "ofta" høvdu henda tankan.

- 87% av svargevunum undirvístu alt tað fyrsta árið. 1,3% vóru burtur í "styttri tíðarskeið". 9,1% vóru burtur í "longri tíðarskeið". 2,6% góvust. *(Barnsburðarfarloyvi er mest vanliga orsøkin til, at kvinnuligir svargevar hava verið burtur í longri tíðarskeið).*

- Um vit hyggja at teimum lutfalsliga fáu, ið gjørdust ovbyrjað og góvust, áðrenn árið var lokið, so hava tey hesi drøg í felag:
  - Tey vóru ikki tikin við upp á ráð, tá ið tímatalvan var løgd.
  - Tey merktu ikki, at leiðslan var áhugað í, hvussu tað gekst teimum, og hvussu tey skipaðu sína undirvísing.
  - Tey fingu ongan kontaktpersón.
  - Tey høvdu einki samband við fyrrverandi lærarar á læraraskúlanum.
  - Tey fingu eitt strævið skema.
  - Tey undirvístu flokkum, har tað vóru nógvir næmingar, ið høvdu annaðhvørt innlæringar- ella atferðartrupulleikar.
  - Tey undirvístu annaðhvørt als ikki ella bert fáar tímar í sínum linjufakum.
  - Tey undirvístu í fleiri skúlafakum, har tey fakliga ikki kendu seg nóg stinn.

- 50% av øllum svargevum siga, at leiðslan var "sera áhugað í" , hvussu tað gekst teimum, og um teir trivust. 34,2% siga, at leiðslan var "eitt sindur áhugað", meðan 13,2% siga, at leiðslan ikki var áhugað. *(Føroyskar skúlaleiðslur sýnast at geva trivnaðarspurninginum størri ans nú enn fyri bara fáum árum síðan).*

- 15,2% av øllum svargevum siga, at leiðslan var "sera áhugað í", hvussu teir skipaðu sína undirvísing, og hvørjar undirvísingarhættir og lærubøkur teir nýttu. 38% siga, at leiðslan var "eitt sindur áhugað", meðan 39,2% siga, at leiðslan "ikki vísti nakran áhuga". *(Føroyskar skúlaleiðslur sýnast <u>ikki</u> at hava størri áhuga í didaktiska arbeiðinum hjá nýútbúnum lærarum nú enn fyri 4-5 árum síðan).*

- 73,4% av svargevunum settu seg "ongantíð" í samband við fyrrverandi lærarar á læraraskúlanum fyri at spyrja um góð ráð.

- 76% av svargevunum upplivdu ongantíð, at fyrrverandi lærarar settu seg í samband við teir fyri at frætta, hvussu tað gekst teimum.

- 81,8% av svargevunum siga, at tað hevði verið annaðhvørt "sera gagnligt" ella "gagnligt", um teir kundu havt samband við Føroya læraraskúla fyrsta undirvísingarárið og kundu hitt fyrrverandi floksfelagar og fyrrverandi lærarar fyri at tosa um royndir og avbjóðingar.

- Tá ið svargevarnir verða spurdir, hvør ið er størsta avbjóðingin fyrsta árið sum lærari, vísa teir á:
  - At finna sín egna lærarastíl og at finna stevið sum lærari.
  - At læra kjarnuuppgávurnar hjá einum lærara – t.d. at seta seg inn í lærubókaskipanir, at næmingalaga undirvísingina, flokslæraraleikluturin, at føra til próvtøku og geva próvtøl og at nýta KT sum undirvísingaramboð.
  - At samstarva sum lærari – t.d. toymissamstarv, foreldrasamstarv og at samstarva við sosialar myndugleikar.
  - At undirvísa næmingum, ið hava trupulleikar av ymiskum slag.

## Hvussu trívist tú sum lærari í dag? (Sp. 84 – 102)

- 94,7% av svargevunum siga seg trívast annaðhvørt "sera væl" ella "væl" sum lærari í dag. *(Menn trívast eitt sindur betur enn kvinnur).*

- 33,8% av svargevunum siga, at teir eru "nógv betri" lærarar í dag enn fyrsta undirvísingarárið. 59,2% siga, at teir eru "betri" lærarar í dag. 7% siga, at teir eru "nakað tað sama". Eingin svargevi sigur seg vera annaðhvørt "verri" ella "nógv verri" í dag enn fyrsta árið.

- Yrkisliga sjálvsálitið sýnist at gerast størri við árunum.

- 62,2% av svargevunum siga, at teir eru annaðhvørt "nógv betri" ella "betri" lærarar, tá ið teir undirvísa í sínum linjufakum enn í øðrum lærugreinum. 37,8% halda ikki, at undirvísingarførleiki er treytaður av, um ein undirvísir í sínum linjufakum ella ei. *(Størsti parturin av teimum, ið hava hetta sjónarmið, undirvístu annaðhvørt "lítið" ella "als ikki" í sínum linjufakum skúlaárið 2011/2012).*

- 73,3% av svargevunum siga seg tíma annaðhvørt "nógv betur" ella "betur" at undirvísa í sínum linjufakum enn í øðrum lærugreinum. 25,4% siga, at tað er ikki stórvegis munur, og 1,3% siga, at teir tíma "verri" at undirvísa í sínum linjufakum.

- 20% av svargevunum siga seg undirvísa "nógv øðrvísi" enn lærarar, ið hava undirvíst í 20-25 ár. 72% siga seg undirvísa "nakað øðrvísi", meðan 8% halda ikki, at tað er nakar munur. *(Starvsaldur hevur eina greiða ávirkan á, hvussu svarað verður: 83,3% av svargevunum, ið siga, at teir undirvísa á sama hátt sum lærarar, ið hava undirvíst í nógv ár, tóku prógv í 2010 og 2011).*

- 4% av svargevunum siga, at teir hava "sera stóra vitan um", hvussu starvsfelagarnir skipa sína undirvísing. 26,7% siga seg hava "nokkso stóra vitan". 53,3% siga seg vita "eitt sindur". Meðan 16% siga seg hava annaðhvørt "lítla" ella "onga" vitan. *(Hesi prosenttøl eru tekin um, at føroyski fólkaskúlin sum heild <u>ikki</u> kann rópast ein lærandi organisatión, har tað er stórt innihaldsligt og háttalagsligt gjøgnumskygni).*

- 4% av svargevunum siga, at starvsfelagarnir hava "sera stóra vitan um", hvussu teir skipa sína undirvísing. 25% siga, at starvsfelagarnir hava "nokkso stóra vitan", 47,4% siga, at starvsfelagarnir "vita eitt sindur", meðan 23,6% siga, at starvsfelagarnir hava annaðhvørt "lítla" ella "onga" vitan. *(Hesi prosenttøl eru tekin um, at nýútbunir lærarar <u>ikki</u> verða roknaðir sum serligir tilfeingispersónar, ið koma inn í skúlan við nýggjastu vitanini um undirvísing og læring, og sum kunnu geva íblástur til lærarar, ið hava undirvíst í nógv ár).*

- 32,1% av svargevunum dámar serliga væl at undirvísa í grunddeildini, 21,8% í miðdeildini, 38,4% í hádeildini og 7,7% siga seg ikki hava nakra einkardeild.
    - Mannligum svargevum dámar nógv best at undirvísa í hádeild (66,7%) og nógv ringast at undirvísa í grunddeild (4,8%).
    - Kvinnuligum svargevum dámar best at undirvísa í grunddeild (41,4%).

  - Miðdeildin er ikki einkardeildin hvørki hjá monnum ella kvinnum.

- 28,2% av svargevunum siga seg roynast best sum undirvísarar í grunddeildini, 23,1% í miðdeildini, 28,2% í hádeildini, og 20,5% siga, at undirvísingarførleikin ikki er tengdur at ávísum aldursbólki.
  - Menn halda, at teir roynast best sum lærarar í hádeildini (45%) og ringast í grunddeildini (10%).
  - Kvinnur halda, at tær roynast best sum lærarar í grunddeildini (41,4%).
  - Miðdeildin er við skerdan lut bæði hjá monnum og kvinnum.

- 47,9% av svargevunum hóvar frægast at undirvísa í eini ávísari deild í ymiskum lærugreinum. 32,4% hóvar frægast at undirvísa ymiskum flokkum í sínum linjufakum. Meðan 19,7% hóvar frægast at undirvísa einum ávísum flokki í nógv skúlaár og í ymiskum lærugreinum. *(At hugsavna seg um at undirvísa annaðhvørt grunddeild, miðdeild ella hádeild hevur ikki verið hugsað inn í føroysku læraraútbúgvingina, men á læraraskúlum aðrastaðnis er annaðhvørt øll útbúgvingin aldursrættað ella eru partar av útbúgvingini aldursrættaðir).*

- Eingin svargevi heldur, at lærarastarvið er annaðhvørt "lætt" ella "sera lætt". 15,6% halda, at lærarastarvið er "sera strævið", 40,3% halda, at lærarastarvið er "strævið", og 44,1% siga, at lærarastarvið er bæði "strævið og ikki strævið".

- 44,9% av svargevunum halda ikki, at fólk vita, hvussu fjølbroytt og avbjóðandi lærarastarvið er. 52,6% ivast í, um fólk flest vita, hvat lærarastarvið fevnir um. Bara 2,5% av svargevunum halda, at fólk kenna allar tær uppgávur, ið ein lærari skal loysa gjøgnum ár og dag.

- Svargevarnir halda sum heild, at føroyskir lærarar verða alt ov lítið virdir av (1) vanliga føroyinginum, (2) føroyskum politikarum og (3) føroyskum fjølmiðlafólki.

- 66,7% av svargevunum halda, at lærarastarvið er "sera innihaldsríkt". 24% halda, at lærarastarvið er "nokkso innihaldsríkt". 8% halda, at lærarastarvið er "líka innihaldsríkt sum onnur størv". Og bara 1,3% halda, at lærarastarvið er "ikki serliga innihaldsríkt".

- 87% av svargevunum eru annaðhvørt "sera errin" ella "nokkso errin" av at vera lærari. 13% eru "ikki serliga errin" og eingin er "als ikki errin". *(70% av nýútbúnu monnunum eru "sera ernir" av at vera lærarar. 54,4% av nýútbúnu kvinnunum eru "serliga ernar" av at vera lærarar).*

- 64,9% av svargevunum ímynda sær, at teir framvegis eru lærarar um 10 ár. 29,7% ivast, meðan 5,4% vænta, at teir hava skift yrkisleið.

- 19,5% av svargevunum halda, at teir sum heild eru "sera góðir lærarar", 70,8% halda, at teir eru "góðir lærarar", 8,3% halda seg vera "miðal lærarar", og bara 1,4% halda seg vera "vánaligar lærarar". *(Um ein sammetir hesi prosenttøl við javnbýtistalvur annars, so ber til at siga, at yrkisliga sjálvsfatanin er jalig og sjálvsálitið stórt hjá svargevunum).*

- Tá ið svargevarnir verða spurdir, hvørjar tær størstu avbjóðingarnar eru við lærarastarvinum í dag, so siga teir:
  - At skúlin er fyri øll.
  - At flokkarnir eru so stórir.
  - At tað er so trupult at næmingalaga undirvísingina.
  - At tað eru so nógvir næmingar, ið hava serligan tørv og/ella eru atferðartruplir.
  - At fáa disiplin og arbeiðsfrið í flokkin.
  - At motivera næmingarnar.
  - At eftirmeta undirvísingina og geva próvtøl.
  - Foreldrasamstarv.
  - Toymissamstarv.
  - At uppfylla tey krøv, ið MMR setir.
  - Nógva fundarvirksemið og pappírsarbeiðið á skúlanum.
  - Tann fjølbroytti læraraleikluturin/lærarin sum uppalari.
  - Tann stóra ábyrgdin, ið lærarin hevur.
  - At nýútbúni lærarin kennir seg ovbyrjaðan.

## Undirvísingarsýni og undirvísingarhættir (Sp. 103 – 121)

- 57% av svargevunum vilja helst undirvísa í toymi, meðan 43% vilja helst undirvísa einsamallir. *(T.e. 47% av monnunum og 40,4% av kvinnunum).*

- 92,2% av svargevunum siga, at lærarin hevur annaðhvørt "sera stóra ávirkan" ella "stóra ávirkan" á, hvat næmingarnir læra. 7,8% siga, at lærarin hevur "eitt sindur av ávirkan". Eingin svargevi sigur, at lærarin hevur annaðhvørt "lítla" ella "onga ávirkan".

- 84% av svargevunum siga, at undirvísingin, ið lærarin leggur til rættis og skipar fyri hevur størstu ávirkan á, hvat næmingurin dugir. 73,3% av svargevunum siga, at tann orka, ið næmingurin leggur í skúlaarbeiðið hevur størstu ávirkan. 21,3% siga, at tey evnini, ið næmingurin er føddur við, hevur størstu ávirkan. Og 8% siga, at útbúgvingarstøðið hjá foreldrunum hevur størstu ávirkan.

- 20,8% av svargevunum siga, at tá ið teir undirvísa dagliga, arbeiða teir tilvitað fyri at náa teimum málum, ið standa í endamálsorðing fólkaskúlans. 67,5% siga, at teir gera hetta "í ein ávísan mun", meðan 11,7% siga seg ikki geva endamálsorðingini serligan ans. *(T.e. 23,8% av mannligu svargevunum og 7,1% av kvinnuligu svargevunum).*

- 37,3% av svargevunum siga, at teir hava annaðhvørt "sera stóran" ella "stóran" kunnleika til nýggju námsætlanirnar, ið MMR hevur almannakunngjørt. 48% siga, at teir vita "eitt sindur", meðan 14,7% siga, at teir hava annaðhvørt "lítlan" ella "ongan" kunnleika til hetta nýggja pedagogiska meginamboðið.

- 50% av svargevunum siga, at teir annaðhvørt "í sera stóran mun" ella "í stóran mun" nýttu nýggju námsætlanirnar sum fyrimynd, tá ið teir løgdu ársætlanir fyri skúlaárið 2011/2012. 27,9% nýttu námsætlanirnar "í ein ávísan mun", meðan

22,1% nýttu námsætlanirnar annaðhvørt "í lítlan mun" ella "als ikki". *(Kvinnuligu svargevarnir vísa sum heild nýggju námsætlanunum størri ans enn mannligu svargevarnir).*

- 41,9% av svargevunum fylgja tí ársætlan, ið teir leggja við skúlársbyrjan. 55,4% fylgja ársætlanini "í ein ávísan mun", og 2,7% fylgja henni ikki.

- Tess longur ein hevur verið lærari, tess betur megnar ein at fylgja námsætlanini.

- 72,6% av svargevunum siga, at eingin hevur eftirlit við, um teir fylgja tí ársætlan, ið teir leggja við skúlársbyrjan. *(Nýútbúnir lærarar eru ikki í nakrari serstøðu. 78,6% av teimum, ið tóku prógv í 2011, siga, at eingin fylgdi við og spurdi teir eftir, um teir fylgdu ársætlanini).*

- 41,6% av svargevunum siga, at teir vænta, at nýggju námsætlanirnar fara at gera undirvísingina í tí føroyska fólkaskúlanum annaðhvørt "nógv betri" ella "betri". 55,3% vænta ikki, at nýggju námsætlanirnar fara at hava nakra ávirkan, meðan 3,1% vænta, at námsætlanirnar fara at gera undirvísingina "verri". *(Starvsaldur og kyn ávirka ikki, hvat fólk svara).*

- 55,9% av svargevunum siga seg vera annaðhvørt "sera stinnan" ella "stinnan" í KT. 39% siga seg "duga eitt sindur", meðan 5,1% siga seg hava "lítlan" KT-førleika.

- 46,7% av svargevunum nýta KT annaðhvørt "sera nógv" ella "nógv" í undirvísingini. 44,2% nýta KT "eitt sindur". Og 9,1% nýta KT annaðhvørt "lítið" ella "einki".

- 35,6% av svargevunum nýta alnetið (google, youtube, wikipedia o.a.) annaðhvørt "fleiri ferðir um dagin" ella "dagliga". 47,4% nýta alnetið "1-3 ferðir um vikuna", meðan 17% nýta alnetið annaðhvørt "onkra hendinga ferð" ella "ongantíð".

- 68,5% av svargevunum siga, at teir ikki kenna tað sum eitt trýst frá leiðsluni, at teir skulu nýta KT í undirvísingini. 28,9% siga, at teir kenna "eitt ávíst trýst". 2,6% siga, at teir kenna annaðhvørt "eitt sera stórt trýst" ella "eitt stórt trýst".

- 36% av svargevunum siga, at teldan, samvirkna talvan og onnur tøkni hava gjørt undirvísing teirra "nógv betri". 48% siga "eitt sindur betri", 16% siga "hvørki betri ella verri", meðan eingin sigur, at KT hevur gjørt undirvísing teirra "verri".

- Mannligir svargevar meta sum heild, at teir eru stinnari í KT enn kvinnuligir svargevar, og teir nýta sum heild KT meiri sum undirvísingaramboð.

- Við støði í teimum spurningum, ið snúgva seg um KT, er niðurstøðan:
    - At teir svargevar, ið halda seg hava sera stóran KT-førleika, nýta KT nógv í undirvísingini, og halda, at KT hevur gjørt undirvísingina "nógv betri".
    - At teir svargevar, ið halda seg hava rímiligan KT-førleika, nýta KT og alnetið "nokkso nógv", og halda, at KT hevur gjørt undirvísingina "eitt sindur betri".

  - At teir svargevar, ið halda seg hava lítlan KT-førleika, nýta KT og alnetið "lítið" í undirvísingini, og halda, at KT hvørki hevur gjørt undirvísing teirra betri ella verri.

- Vanlig floksundirvísing/talvuundirvísing er tann undirvísingarhátturin, ið svargevarnir nýta mest. Tínæst kemur bólkaarbeiði og evnisarbeiði.

- Sum heild kann sigast, at svargevarnir nýta lítið vælkendar undirvísingarhættir so sum verkætlanararbeiði, verkstaðararbeiði, søgutráð, kooperativa læring, MI-ástøðið hjá Howard Gardner og ástøðið um læringstílar hjá Dunn & Dunn.

- Svargevarnir nýta nærum ikki fyrireikingar- og eftirmetingarfrymlar. T.d. Hiim og Hippe og SMTTE.

- Kvinnuligu svargevarnir nýta sum heild fjølbroyttari undirvísingarhættir enn mannligu svargevarnir.

- Tá ið svargevarnir verða spurdir, hvat hevur havt størstu ávirkan á teirra læraraatferð, og hvussu teir undirvísa í dag, so siga teir:
  - Mín persónligheit (83,8%)
  - Teir starvsfelagar eg havi havt, síðan eg gjørdist lærari (39,2%)
  - Teir lærarar eg hevði í barnaskúla og/ella miðnámi (24,3%)
  - Tað eg lærdi á læraraskúlanum (18,9%)
  - Teir lærarar eg hevði á læraraskúlanum (16,2%)

- Rákið er, at tess longur ein hevur verið lærari, tess meiri verður læraraatferðin ávirkað av starvsfeløgunum. Og tess longur tað er síðan, at ein tók læraraútbúgving, tess minni týdning hevur tað, ið ein lærdi á læraraskúlanum.

- 40,3% av svargevunum siga, at tann undirvísing teir skipa í dag, er "nógv øðrvísi" enn tann undirvísing, teir sjálvir fingu, tá ið teir gingu í fólkaskúla. 54,5% svara "eitt sindur øðrvísi", meðan 5,2% siga, at tað er ongin munur.

- 76,7% av svargevunum siga, at tann undirvísing, teir skipa í dag, er annaðhvørt "nógv betri" ella "betri" enn tann undirvísing, teir sjálvir fingu, tá ið teir gingu í fólkaskúla. 13% siga "nakað tað sama". 10,3% siga seg ikki duga at svara.

- 5,6% av svargevunum siga, at teir undirvísa "nógv øðrvísi" í dag, enn tá ið teir vóru nýútbúnir. 66,7% siga "eitt sindur øðrvísi", og 22,7% siga seg undirvísa á sama hátt nú, sum tá ið teir byrjaðu.

- Rákið er, at tess longur ein hevur verið lærari, tess betur torir ein at broyta framferð og undirvísingarhættir.

## Nútíðarnæmingurin (Sp. 122 – 136)

- Tá ið svargevarnir verða bidnir um at samanbera næmingar í dag við næmingar, tá ið teir sjálvir gingu í skúla, siga teir (1) at nútíðarnæmingurin er stinnari í enskum og donskum, (2) hevur størri tøkniligan førleika, (3) er betur upplýstur, (4) hevur størri sosialan førleika og dugir betur at lurta eftir øðrum, (5) dugir betur at multitaska, (6) er meiri tilvitaður um síni rættindi, (7) er nógv fríari og opnari, (8) kann stundum verða so upptikin av sær sjálvum og sínum áhugamálum, at tað kann tykjast, sum honum vantar fólkaskikk.

- Svargevarnir vísa á, at nútíðarnæmingurin dugir verri at málbera seg á føroyskum og partvíst eisini at stava føroyskt.

- 53,9% av svargevunum siga, at næmingar í dag hava annaðhvørt "eitt sindur minni virðing" ella "nógv minni virðing" fyri læraranum, enn næmingar høvdu, tá ið teir sjálvir gingu í skúla.

- 70,5% av svargevunum siga, at tað annaðhvørt "í stóran mun" ella "í ávísan mun" er soleiðis, at næmingar, ið duga væl í yngru flokkunum, eisini duga væl, tá ið teir gerast eldri.

- 51,9% av svargevunum siga, at tað annaðhvørt "í stóran mun" ella "í ávísan mun" er soleiðis, at næmingar, ið duga illa í yngru flokkunum, eisini duga illa, tá ið teir gerast eldri.

- 20,5% av svargevunum siga, at tað "í ávísan mun" er soleiðis, at næmingar, ið duga væl í bókligu lærugreinunum eisini duga væl í handaligu lærugreinunum. 55,1% siga, at tað er eingin samanhangur.

- 2/3 av svargevunum siga, at næmingar, ið hava foreldur, sum hava høga útbúgving, "duga sum heild betur" enn næmingar, ið hava foreldur, ið hava annaðhvørt eina ikki-bókliga útbúgving ella onga útbúgving.

- 94,8% av svargevunum siga, at fakliga spennið millum sterkastu og veikastu næmingarnar í teimum flokkum, teir undirvísa, er annaðhvørt "sera stórt" ella "stórt".
    - 21,7% av svargevunum siga, at munurin millum sterkastu og veikastu næmingarnar er annaðhvørt ½ ella 1 floksstig. 58,1% siga, at munurin er annaðhvørt 2 ella 3 floksstig. Og 20,3% siga, at munurin er 4 floksstig ella fleiri.
    - Flokkar eru ymiskir. Í nøkrum flokkum hava undir 10% av næmingunum innlæringar- og/ella atferðartrupulleikar. Í øðrum flokkum hava umleið 30% av næmingunum innlæringar- og/ella atferðartrupulleikar. Í nøkrum flokkum hava undir 10% av næmingunum serliga góð evni at læra. Í øðrum flokkum eru yvir 30% av næmingunum serliga gávaðir.
    - Í einum miðal føroyskum flokki, har tað ganga 24 næmingar, hava umleið 4 næmingar innlæringar- og/ella atferðartrupulleikar.
    - Í einum miðal føroyskum flokki, har tað ganga 24 næmingar, hava umleið 5 næmingar serliga góð evni at læra.

- 94,8% av svargevunum siga, at næmingar, ið duga "verri enn miðal", eru teir mest tíðar- og orkukrevjandi.

- Eingin svargevi sigur, at hann megnar "sera væl" at geva øllum næmingum, hann undirvísir, hóskandi avbjóðingar. 31,2% siga, at teir megna "nokkso væl" at næmingalaga undirvísingina. 54,6% ivast í, um teir megna hesa uppgávu, og 10,3% siga, at teir megna "ikki serliga væl" at geva hvørjum næmingi sítt.

- Førleikin at skapa eina einstaklingsrættaða undirvísing sær út til at vaksa, tess longur ein hevur verið lærari.

- 61% av svargevunum siga, at tað "í ein ávísan mun" ber til at laga undirvísingina til støðið og tørvin hjá einstaka næminginum. 19,5% eru ivingarsom. 15,6% siga, at tað annaðhvørt "ber illa til" ella "at tað ber als ikki til".

- 33,8% av svargevunum halda <u>ikki</u>, at tað er pedagogiskt rætt at undirvísa næmingum, ið hava annaðhvørt innlæringar- og/ella atferðartrupulleikar saman við næmingum, ið hvørki hava innlæringar- og/ella atferðartrupulleikar. 50% ivast í, hvat er rætt. Og bara 16,2% siga, at tað er rætt, at undirvísa øllum saman. *(Prosenttølini kveikja undir kjakið um næmingadifferentiering og undirvísingardifferentiering).*

## PISA-kanningin og landsroyndin (Sp. 137 – 156)

- 58,4% av svargevunum siga, at høvuðsuppgávan hjá læraranum er "at menna næmingin í síni heild". 41,6% siga, at høvuðsuppgávan hjá læraranum er "at menna fakligu førleikarnar hjá næminginum". *(76,5% av svargevunum, ið tóku prógv í 2011 siga, at høvuðsuppgávan er "at menna næmingin í síni heild". 72,2% av svargevunum, ið tóku prógv í 2007 siga, at høvuðsuppgáva skúlans er "at menna fakligu førleikarnar hjá næmingunum).*

- 69,3% av svargevunum halda <u>ikki</u>, at løku PISA-úrslitini eru eitt tekin um, at hin føroyski fólkaskúlin er ein ringur skúli. 30,7% siga, at løku PISA-úrslitini "í ein ávísan mun" siga nakað um dygdina í føroyska fólkaskúlanum.

- 62,7% av svargevunum halda <u>ikki</u>, at PISA-kanningin er ein eftirfarandi kanning. 34,6% siga, at PISA-kanningin er "nokkso eftirfarandi", meðan bara 2,7% siga, at PISA-kanningin er "sera eftirfarandi".

- Av teimum svargevum, ið hava undirvíst flokkum, ið hava verið til PISA-kanning, siga 65%, at teir <u>ikk</u>i hava skipað undirvísingina øðrvísi tað árið, PISA-kanningin hevur verið á skránni. *(Tað eru serliga svargevar, sum hava verið lærarar í 4-5 ár, ið ikki lata PISA-kanningina ávirka ársætlanina).*

- Svargevarnir vita sum heild ikki serliga nógv um teir spurningar og tær uppgávur, ið sett verða í PISA-kanningini.

- 46,5% av svargevunum siga, at lærarin í føroyskum, støddfrøði og N&T hevur annaðhvørt "sera stóra ávirkan" ella "stóra ávirkan" á, hvussu næmingarnir

standa seg í PISA-kanningini. 46,5% siga, at lærarin hevur "eitt sindur av ávirkan", meðan 7% siga, at lærarin hevur annaðhvørt "lítla" ella "onga" ávirkan.

- 70,7% av svargevunum halda ikki, at løku PISA-úrslitini kunnu siga nakað um, hvussu føroyska samfelagið fer at standa seg í framtíðini.

- 60,1% av svargevunum halda ikki, at vit eiga at broyta tann føroyska fólkaskúlan soleiðis, at hann kemur at líkjast meiri grundskúlunum í Finlandi, Singapore, Korea og Kina, sum eru lond, ið standa seg serstakliga væl í PISA-kanningini. 39,9% siga, at vit "í ein ávísan mun" eiga at broyta tann føroyska fólkaskúlan soleiðis, at størri faklig krøv verða sett næmingunum.

- 78,6% av svargevunum siga seg kenna annaðhvørt "sera nógv" ella "nógv" til teir spurningar og tær uppgávur, ið verða sett í landsroyndini. 19% siga seg kenna "eitt sindur" til royndina. Og 2,4% siga seg "einki" kenna til royndina.

- 28,6% av svargevunum venja "í stóran mun" gamlar landsroyndir áðrenn landsroyndina. 71,4% venja "í ávísan mun" gamlar landsroyndir. Eingin svargevi venur ikki gamlar landsroyndir við flokkinum.

- Svargevarnir nýta í høvuðsheitum landsroyndarúrslitið til:
  - At fáa vitan um, hvat einstaki næmingurin dugir og ikki dugir (69%)
  - At leggja undirvísingina til rættis frameftir (42,9%)
  - At samanbera flokkin við aðrar flokkar og harvið meta um dygdina í tí undirvísing, ið ein sjálv/ur skipar (31%)
  - At samanbera næmingar, ið ganga í sama flokki (4,7%)
  - 21,4% av svargevunum siga, at teir nýta ikki landsroyndarúrslitið til nakað serligt.

- 60% av svargevunum siga, at lærarin í føroyskum, støddfrøði og N&T hevur annaðhvørt "sera stóra ávirkan" ella "stóra ávirkan" á, hvussu næmingarnir klára seg í landsroyndini. 35,6% siga, at lærarin hevur "eitt sindur av ávirkan", meðan 4,4% siga, at lærarin hevur "lítla" ávirkan.

- 1,8% av svargevunum siga, at landsroyndin hevur gjørt undirvísingina í føroyska fólkaskúlanum "nógv betri". 55,4% siga, at landsroyndin hevur gjørt undirvísingina "eitt sindur betri". 33,9% halda ikki, at landsroyndin hevur havt nakra ávirkan. Og 8,9% siga, at landsroyndin hevur gjørt undirvísingina "verri".

- Teir svargevar, ið siga, at landsroyndin hevur verið til gagns fyri føroyska fólkaskúlan vísa m.a. á:
  - At landsroyndin og nýggju námsætlanirnar fara at gera undirvísingartilboðið runt landið meiri eins.
  - At landsroyndin ger undirvísingina í føroyskum, støddfrøði og N/T meiri málrættaða.
  - At landsroyndin motiverar lærarar, næmingar og foreldur.
  - At landsroyndin skapar eina sunna kapping milum lærarar, næmingar, flokkar og skúlar
  - At í landsroyndini verða bæði næmingar og lærarar eftirmettir.

- Teir svargevar, ið siga, at landsroyndin ikki hevur gagnað føroyska fólkaskúlanum, siga m.a.:
    - At landsroyndarspurningarnir líkjast ov nógv frá ári til árs.
    - At landsroyndin elvir til "teaching to the test".
    - At landsroyndin ger, at kreativ innsløg verða skorin burtur úr undirvísingin
    - At landsroyndin er eitt slag av politiskum eftirliti.

- Tá ið svargevarnir verða spurdir, hvørjar eru tær týdningarmiklastu lærugreinarnar í 21. øld, svarar ein stórur meiriluti: støddfrøði, enskt og føroyskt.

- Tá ið svargevarnir verða spurdir, um vit hava lærugreinar í føroyska fólkaskúlanum, sum eru ótíðarhóskandi, vísa teir á týskt og kristni.

- Tá ið svargevarnir verða spurdir, um vit eiga at fáa nýggjar lærugreinar á tímatalvuna, vísa teir m.a. á KT, íverksetan og fólkaræði.

## Eftirútbúgvingartørvur (Sp. 157 – 168)

- 42% av svargevunum hava tikið (ella taka) eina pedagogiska eftirútbúgving og/ella skeið, síðan teir vóru lidnir sum lærarar.

- Av teimum 42%, sum hava tikið skeið ella pedagogiska eftirútbúgving hava:
    - 65% tikið skeið, ið Landsmiðstøðin/Nám hevur skipað fyri.
    - 15% tikið BA-ískoyti á útlendskum lærustovni.
    - 12,5% tikið (ella taka) eina MA ella kandidatútbúging í DK ella aðrastaðnis.
    - 2,5% tikið (ella taka) lesivegleiðara- ella serlæraraútbúgving, ið MMR hevur skipað fyri.

- Fjøldin av svargevunum sigur seg hava tørv, hug og dirvi at taka eina eftirútbúgving. *(Legg til merkis, at 56,3% av teimum, ið tóku læraraprógv í 2011, siga, at teir "so avgjørt" hava tørv á eftirútbúgving, og 78,9% siga, at teir "so avgjørt" hava hug at eftirútbúgva seg).*

- 88,6% av svargevunum kundu hugsað sær at tikið eitt linjufak afturat (ella part av einum linjufaki) á Føroya læraraskúla, um teir høvdu møguleika til tess.
    - Tey linjufak, ið flestu svargevar vísa áhuga eru (1) pedagogisk leiðsla, (2) sernámsfrøði, (3) innskúling. Hesi linjufak hava øll tað til felags, at tey eru tvørnámslig.
    - Av siðbundnu linjufakunum fáa føroyskt, N&T og støddfrøði størst undirtøku.

- 67,1% av svargevunum kundu hugsað sær at tikið BEd-ískoytið á Føroya læraraskúla. 22,8% ivast, meðan 10,1% siga seg ikki hava hug á hesi ískoytisútbúgving.

- Tá ið svargevarnir verða spurdir, hvørjir tættir teir kundu hugsað sær fyltu mest í einum BEd-ískoyti, siga teir:
    - Floksleiðsla (56,3%)
    - Didaktiskir førleikar (50%)
    - Fakligir førleikar (26,3%)
    - Persónligir førleikar (11,3%)

- Tá ið svargevarnir verða spurdir, hvør orsøkin er til, at teir kundu hugsað sær at tikið BEd-ískoytið, siga teir:
    - Eg kundi hugsað mær at verið ein enn betri lærari (47,5%)
    - Eg kundi hugsað mær at fingið aðrar uppgávur á mínum núverandi skúla (28,8%)
    - Eg kundi hugsað mær at farið undir hægri lestur (28,8%)
    - Eg kundi hugsað mær at fingið meiri í løn (25%)
    - Persónlig menning (8,8%)

- Um vit ímynda okkum, at eitt BEd-ískoyti kostar 15.000 kr,- og svargevarnir skulu rinda sjálvir, so sigur 1/3, at hann hevði tikið ískoytið, 1/3 ivast, og 1/3 hevði setst aftur.

- 61,8% av svargevunum halda, at BEd-ískoytið kann gera teir til betri lærarar. 30,3% ivast, og 7,9% halda ikki, at BEd-ískoytið fer at hava slíka ávirkan.

- 86% av svargevunum hava ynski um, at Námsvísindadeildin (Føroya læraraskúli) fer at skipa fyri dags- og vikuskeiðum fyri útbúnum lærarum.

- Tá ið svargevarnir verða spurdir, hvat hesi dags- og vikuskeið skulu snúgva seg um, so vísa teir á hesi høvuðsøki: (1) Einstøku skúlafakini, (2) tvørnámslig skeið, (3) floksleiðsla, (4) sernámsfrøðiliga økið, (5) serliga gávaðir næmingar, (6) eftirmeting, (7) KT sum undirvísingaramboð, (8) foreldrasamstarv, (9) nýggju námsætlanirnar, (10) ársætlanin, (11) flokslæraraleikluturin, (12) skeið í skúlaleiðslu.

## 12. Ískoytisspurningar – ætlaðir skúlastjórum og fyrstu lærarum (Sp. 169 – 171)

- Føroyskir skúlastjórar og fyrstu lærarar siga, at eftirútbúgvingartørvurin er størstur á hesum fakøkjum:
    - Pedagogsik leiðsla (69,2%)
    - N&T (57,7%)
    - Alis- og evnafrøði (50%)
    - Støddfrøði (34,6%)

- Tá ið skúlastjórar og fyrstu lærarar verða spurdir, hvørji eftirútbúgvingartilboð teir kundu hugsað sær vórðu boðin út í 2012/2013, siga teir:
    - KT sum undirvísingaramboð
    - KT vørður
    - At undirvísa í miðdeild og hádeild

- Alternativir undirvísingarhættir
- BA í skúlaleiðslu
- Svimjilæraraprógv

# Kap. 4

# Bakstøðisupplýsingar og variablar




Ritmynd 1 vísir, at 28,4% av svargevunum eru menn, og 71,6% eru kvinnur.

- 106 lærarar fingu spurnablaðið við postinum. 81 svaraðu. T.e. 76,4%
- 29 mannligir lærarar fingu spurnablaðið. 23 svaraðu. T.e. 79,3%
- 77 kvinnuligir lærarar fingu spurnablaðið. 58 svaraðu. T.e. 75,3%




Ritmynd 2 vísir, nær svargevarnir tóku prógv.

- 2007: 24 lærarar fingu spurnablaðið. 19 svaraðu. T.e. 79,2%
- 2008: 18 lærarar fingu spurnablaðið. 12 svaraðu. T.e. 66,7%
- 2009: 21 lærarar fingu spurnablaðið. 14 svaraðu. T.e. 66,7%
- 2010: 23 lærarar fingu spurnablaðið. 18 svaraðu. T.e. 78,3%
- 2011: 20 lærarar fingu spurnablaðið. 18 svaraðu. T.e. 90%




Ritmynd 3 vísir, at 92,6% av svargevunum arbeiddu sum lærarar skúlaárið 2011/2012. *(T.e. 91,3% av mannligu svargevunum og 93,1% av kvinnuligu svargevunum).*

Um vit hyggja at starvsaldri, so sæst, at 100% av svargevunum, ið tóku prógv í 2007, 83,3% av svargevunum, ið tóku prógv í 2008, 85,7% av svargevunum, ið tóku prógv í 2009, 88,9% av svargevunum, ið tóku prógv í 2010 og 100% av svargevunum, ið tóku prógv í 2011, arbeiddu sum lærarar skúlaárið 2011/2012.




Ritmynd 4 vísir, at níggju av tíggju svargevum undirvístu í føroyska fólkaskúlanum skúlaárið 2011/2012.

Av teimum, ið starvaðust sum lærarar skúlaárið 2011/2012, undirvístu 97,3% í Føroyum, 2,7% undirvístu í Danmark.




Ritmynd 5 vísir, at 70,4% av svargevunum hava arbeitt sum lærarar hvørt ár, síðan teir tóku prógv. *(T.e. 65,5% av kvinnuligu svargevunum og 78,3% av mannligu svargevunum).*




Ritmynd 6 vísir, at høvuðsorsøkin til, at kvinnur ikki hava arbeitt sum lærarar hvørt ár, síðan tær tóku lærarapróg v, er, at tær hava verið í barnsburðarfarloyvi. Nógvar kvinnur viðmerkja tó, at tær ikki hava verið burtur í heil skúlaár, men bara so leingi barnsburðarfarloyvið vardi.

- 5,2% av kvinnunum hava verið burtur frá lærarastarvinum, tí tær eru farnar undir hægri lestur. 3,4% hava fingið annað starv í boði.
- 13% av monnunum hava verið burtur frá lærarastarvinum, tí teir eru farnir undir hægri lestur. 7% hava fingið annað starv í boði.

6,2% av svargevunum eru farnir undir hægri útbúgving. *(T.e. eina MA ella eina kandidatútbúgving).* 2/3 av hesum taka eina útbúgving, ið byggir á lærarautbúgvingina, meðan 1/3 hevur hálsað um og er byrjaður av nýggjum.

Gev gætur: Eingin svargevi sigur seg vera farnan úr lærarastarvinum, tí viðkomandi var troyttur av starvinum.




Ritmynd 7 vísir, at 82% av øllum nýútbúnum lærarum hava starv annaðhvørt í Streymoy ella Eysturoy. Teir svargevar, ið arbeiða uttanlands, eru menn. Hesir starvast í donskum skúlum.




Ritmynd 8 vísir, at nýútbúnu lærararnir fáa starv á skúlum, ið eru sera ymiskir til støddar. 64,4% av svargevunum starvaðust skúlaárið 2011/2012 á skúlum, ið hava fleiri enn 200 næmingar. *(T.e.76,2% av mannligu svargevunum og 59,6% av kvinnuligu svargevunum).* 12,3% starvaðust á skúlum, ið eru millum 101 og 200 næmingar. *(T.e. 9,5% av mannligu svargevunum og 13,5% av kvinnuligu svargevunum).* Og 23,3% starvaðust á skúlum, ið hava upp til 100 næmingar. *(T.e. 14,3% av mannligu svargevunum og 26,9% av kvinnuligu svargevunum.)*

Rákið er við øðrum orðum, at nýútbúnir mannligir lærarar fáa oftari starv á lutfalsliga stórum skúlum.

Støddin á skúlanum ávirkar sjálvandi tímatalvuna hjá einstaka læraranum, tær uppgávur, ið einstaki lærarin skal loysa gjøgnum dagin, møguleikarnar at samstarva í toymi osfr..




Ritmynd 9 vísir, at 41,3% av svargevunum siga, at teirra linjufaksprofilur hevur havt ávirkan á, um teir hava fingið tey størv, teir hava søkt. 58,7% siga annaðhvørt, at linjufaksprofilurin "ikki" hevur havt ávirkan, ella at "teir duga ikki at meta um" linjufaksprofilurin hevur ávirkað starvsmøguleikarnar.

Ritmynd 9 vísir við øðrum orðum, at nakrar skúlaleiðslur sýnast vera tilvitaðar um at útvega sær lærarar, ið hava ein ávísan linjufaksprofil, tá ið størv verða lýst leys og sett. Aðrar skúlaleiðslur sýnast ikki at geva linjufaksprofilinum sama ans.[1]

Um hugt verður at kynsbýti, so siga 52,4% av mannligu svargevunum, at teirra linjufaksprofilur hevur havt ávirkan á, um teir hava fingið tey størv, teir hava søkt. 35,7% av kvinnunum siga, at teirra linjufaksprofilur hevur havt ávirkan á, um tær hava fingið tey størv, tær hava søkt.

Ein kann tískil siga, at nýútbúnir mannligir lærarar í størri mun enn nýútbúnir kvinnuligir lærarar kenna á sær, at teir verða settir í starv, tí teir hava nakrar serligar fakligar førleikar, ið skúlanum tørvar.

Um hugt verður at starvsaldri, so meta 36,8% av teimum, ið tóku prógv í 2007, 33,3% av teimum, ið tóku prógv í 2008, 53,8% av teimum, ið tóku prógv í 2009, 31,3% av teimum, ið tóku prógv í 2010 og 38,9% av teimum, ið tóku prógv í 2011, at linjufakssamansetingin hevur havt ávirkan á teirra starvsmøguleikar. Tað er sostatt einki, ið bendir á, at føroyskar skúlaleiðslur seinastu fimm árini eru vorðnar meira tilvitaðar um linjufaksprofilin hjá umsøkjarunum.

[1] Hvussu nógvar umsóknir ein skúli fær samanborið við ein annan, kann hava ávirkan á, um skúlaleiðslan kann loyva sær at vera vandin og geva linjufaksprofilinum serligan ans ella ei. Henda heildarspurning varpar spurnablaðakanningin ikki ljós á.

## 10. Hvørji linjufak hevði tú á Føroya læraraskúla?

| | Linjugrein | Tal av lesandi | % av lesandi | % av kvinnuligum lesandi | % av mannligum lesandi |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Føroyskt | 29 | 35,8% | 43,1% | 17,4% |
| 2 | Støddfrøði | 27 | 33,3% | 31,0% | 39,1% |
| 3 | Søga | 22 | 27,2% | 20,7% | 43,5% |
| | Enskt | 22 | 27,2% | 27,6% | 26,1% |
| 5 | Handarbeiði | 20 | 24,7% | 34,5% | |
| 6 | Ítrótt | 18 | 22,2% | 17,2% | 34,8% |
| | Lívfrøði | 18 | 22,2% | 22,4% | 21,7% |
| 8 | Kristni | 15 | 18,5% | 20,7% | 13,0% |
| 9 | Heimkunnleiki | 13 | 16,5% | 12% | 26,1% |
| 10 | Danskt | 12 | 14,8% | 17,2% | 8,7% |
| 11 | Smíð | 10 | 12,3% | 1,7% | 39,1% |
| 12 | Alis- og evnafrøði | 9 | 11,1% | 8,6% | 21,7% |
| 13 | Tónleik | 8 | 9,9% | 10,3% | 8,7% |
| 14 | Evning | 7 | 8,6% | 12,0% | |
| 15 | Týskt | 6 | 7,4% | 10,3% | |
| 16 | Myndlist | 5 | 6,2% | 8,6% | |
| 17 | Landalæra | 3 | 3,7% | 3,4% | 4,3% |
| | Samfelagsfrøði | 3 | 3,7% | 1,7% | 8,7% |

Tá ið ein lesur talvu 10, skal ein minnast til, at í gomlu læraraútbúgvingini vóru linjufak ikki boðin út á hvørjum ári. Nøkur linjufak vóru boðin út annaðhvørt ár, onnur vóru boðin út triðja hvørt ár, og uppaftur onnur vóru boðin út fjórða hvørt ár. Nær og hvussu ofta ymisku linjufakini vóru boðin út í tíðarskeiðnum frá 2004 til 2010, hevur sjálvandi ávirkað linjufaksvalið hesi árini.[2]

Talva 10 vísir tó, at á Føroya læraraskúla hevði tú linjufak, ið sera nógv lesandi valdu. Hesi vóru føroyskt (35,8%) og støddfrøði (33,3%).

Tú hevði linjufak, ið nógv lesandi valdu. Hesi vóru søga (27,2%), enskt (27,2%), handarbeiði (24,7%), ítrótt (22,2%) og lívfrøði (22,2%).

Og so hevði tú eina rúgvu av linjufakum, ið annaðhvørt færri ella nógv færri lesandi valdu.

Um hugt verður at kynsbýti, so kann ein siga:

- At vit hava linjufak, ið bara eru mannað av kvinnum. T.e. týskt, handarbeiði, myndlist og evning.
- At vit hava linjufak, har kvinnur eru í stórum meiriluta. T.e. føroyskt og danskt.
- At vit hava linjufak, har menn eru í lutfalsligum stórum meiriluta. T.e. smíð, alis- og evnafrøði, søga og ítrótt.

---

[2] Hvørji linjufak, tey 23,6%, ið ikki svaraðu spurnablaðnum, valdu, sigur kanningin einki um. Um øll høvdu svarað, so høvdu samlaðu tølini, linjugreinabýtið og kynsbýtið verið øðrvísi.

- At vit hava linjufak, har bæði kynini eru lutfalsliga eins væl umboðað. T.d. støddfrøði, enskt og lívfrøði.




Ritmynd 11.0 vísir, at svargevarnir undirvísa til samans 333 tímar um vikuna í føroyskum og 305 tímar um vikuna í støddfrøði. Hetta eru nógv tær størstu lærugreinarnar í fólkaskúlanum. Hinar lærugreinarnar fylla minni.

Ritmynd 11.0 vísir harumframt, at lærugreinar, ið hvørki vóru grundlærugreinar ella linjufak á gomlu lærararaútbúgvingini, eru á tímatalvuni hjá svargevunum. T.e. miðlabreyt, KT, útiskúli og motorlæra.

Tað er áhugavert at síggja, at tann lærugreinin ella undirvísingaruppgávan, ið fyllir fjórðmest á samlaðu tímatalvuni er stuðulstímar. *(T.e. at stuðla næmingum, ið hava serligan tørv, serstova, hjálparlærari í føroyskum og støddfrøði, SI-venjingar, byrjanarlesing o.a..)*

28% av svargevunum høvdu stuðulstímar av ymiskum slagi skúlaárið 2011/2012. *(Tað eru í høvuðsheitum kvinnur, ið hava stuðulstímar.)*




Ritmynd 11.1 vísir, at 52,5% av samlaða tímatalinum, ið svargevarnir lósu skúlaárið 2011/2012, vórðu lisnir í lærugreinum, ið teir høvdu havt sum linjufak, meðan 47,5% vórðu lisnir í lærugreinum, ið teir ikki høvdu havt sum linjufak.

Um einstøku spurnabløðini verða nærlisin, so sæst:

- At tímatalvurnar hjá svargevunum eru sera ymiskar.
- At tað eru svargevar, ið undirvísa annaðhvørt bara ella næstan bara í sínum linjufakum. *(Dømi úr dátagrunninum: 23 av 23 tímum, 18 av 19 tímum, 21 av 23 tímum, 24 av 28 tímum, 15 av 18 tímum).*
- At tað eru svargevar, ið undirvísa annaðhvørt "als ikki" ella "næstan ikki" í sínum linjufakum. *(Dømi úr dátagrunninum: 0 av 25 tímum. 0 av 16 tímum. 1 av 13 tímum, 3 av 21 tímum. 6 av 26 tímum).*
- At nakrir svargevar undirvísa bara ella nærum bara í eini deild (annaðhvørt grunddeild, miðdeild ella hádeild).
- At nakrir svargevar undirvísa í øllum deildum og á ymiskum floksstigum.
- At nakrir svargevar undirvísa nógvar tímar um vikuna í fáum lærugreinum og fáum flokkum.
- At nakrir svargevar undirvísa fáar tímar um vikuna í nógvum lærugreinum og í fleiri flokkum.
- At tað eru svargevar, ið ikki hava havt føroyskt á linju, sum undirvísa 20 tímar um vikuna í føroyskum.
- At tað eru svargevar, ið ikki hava havt støddfrøði á linju, ið undirvísa 14 tímar um vikuna í støddfrøði.
- At tað eru svargevar, ið ikki hava havt enskt á linu, ið undirvísa 8 tímar um vikuna í enskum.
- At 62,7% av teimum, ið undirvísa í N&T hava lívfrøði sum linjufak, meðan 9,8% hava alisfrøði sum linjufak.
- At 30,8% av teimum, ið undirvísa í heimstaðarlæru, hava søgu sum linjufak.

Støddin á skúlanum og einstaki linjufaksprofilurin (t.e. hvørji linjufak ein hevði á læraraskúlanum) tykist at ávirka einstøku tímatalvuna.




Ritmynd 11.2 vísir, at 97,5% av teimum, ið undirvísa í alisfrøði, hava alisfrøði sum linjufak; 94,1% av teimum, ið undirvísa í smíð, hava smíð sum sum linjufak; 84,8% av teimum, ið undirvísa í handarbeiði, hava handarbeiði sum linjufak; 82,8% av teimum, ið undirvísa í týskum, hava týskt sum linjufak; 78,3% av teimum, ið undirvísa í lívfrøði, hava lívfrøði sum linjufak; 73,5% av teimum, ið undirvísa í søgu og samtíð, hava annaðhvørt havt søgu ella samfelagsfrøði sum linjufak; 72,2% av teimum, ið undirvísa í sangi/tónleiki hava tónleik sum linjufak; 71,4% av teimum, ið undirvísa í heimkunnleika, hava heimkunnleika sum linjufak; 70,2% av teimum, ið undirvísa í støddfrøði, hava støddfrøði sum linjufak; 60,5% av teimum, ið undirvísa í enskum, hava enskt sum linjufak; 59,4% av teimum, ið undirvísa í evning, hava annaðhvørt havt evning ella myndlist sum linjufak; 58,1% av teimum, ið undirvísa í ítrótti, hava havt ítrótt sum linjufak; 54,1% av teimum, ið undirvísa í føroyskum, hava føroyskt sum linjufak; 34,8% av teimum, ið undirvísa í landalæru, hava landalæru sum linjufak; 33,3% av teimum, ið undirvísa í kristni, hava kristni sum linjufak; 29,4% av teimum, ið undirvísa í donskum, hava danskt sum linjufak. Eingin lærari, ið undirvísir í N&T, heimstaðarlæru, á miðlabreyt, í KT, í útiskúla og í motorlæru, hevur havt hesar lærugreinar sum linjufak. Og eingin lærari, ið hevur stuðulstímar ella líknandi hevur havt sernámsfrøði sum linjufak.

Ritmynd 11.2. vísir, at í nøkrum lærugreinum undirvísa nærum bara linjufakslærarar. *(T.d. í alisfrøði, týskum, handarbeiði, lívfrøði og smíð).* Í øðrum lærugreinum verða nógv færri tímar lisnir av linjufakslærarum *(T.d. føroyskum, donskum, kristni og landalæru).* Munurin kann vera tekin um, hvørji linjufak lærarar á einum og sama skúla hava sammett við teir tímar, ið skulu lesast á skúlanum. Munurin kann somuleiðis siga okkum, hvørja virðing einstøku lærugreinarnar hava í føroyska skúlanum.




Tølini í ritmynd 11.3 eru smá og eiga sostatt at takast við fyrivarni. Men rákið er:

- At tess minni skúlin er, tess færri tímar undirvísir lærarin í sínum linjufakum. *(Hetta er serliga galdandi, um tað ganga færri enn 50 næmingar í skúlanum).*
- At tess størri skúlin er, tess fleiri tímar undirvísir lærarin í sínum linjufakum. *(Tað er ikki stórur munur á skúlum, har tað ganga millum 201 og 300 næmingar og á skúlum, har tað ganga fleiri enn 300 næmingar).*
- Í stórum skúlum hevur tú lærarar, ið nærum bara undirvísa í sínum linjufakum, og tú hevur sokallaðar kitt-lærarar, ið undirvísa í eini rúgvu av smærri lærugreinum.
- Um ein lærari undirvísir nógv ella lítið í sínum linjufakum er í stóran mun treytað av, hvørji linjufak hann hevur lisið. Fylla linjufakini nógv á tímatalvu skúlans, so er lættari at sleppa framat, enn um linjufakini fylla lítið.




Ritmynd 11.4 vísir, hvussu stóran part av samlaðu undirvísingartíðini, ið svargevarnir undirvístu í grunddeild, miðdeild og hádeild.

Tað, ið er áhugavert við ritmyndini, er:

- At mannligu svargevarnir undirvísa bara 14,6% av samlaðu undirvísingartíðini í grunddeildini.
- At kvinnuligu svargevarnir undirvísa heili 40,2% av samlaðu undirvísingartíðini í grunddeildini.
- At kvinnuligu svargevarnir undirvísa bara 20,3% av samlaðu undirvísingartíðini í hádeildini.

Orsøkin til, at flestu tímar verða lisnir í miðdeildini er, at miðdeildin fevnir um 4 floksstig (4., 5., 6 og 7. skúlaár), meðan grunddeildin og hádeildin fevna um 3 floksstig.




Ritmynd 12 vísir, at 2/3 av øllum svargevum undirvísa annaðhvørt "meiri enn fulla tíð" ella "fulla tíð", meðan 1/3 undirvísir "minni enn fulla tíð".

Um hugt verður at kynsbýti, so sæst:

- At 41,2% av mannligu svargevunum, ið undirvístu í Føroyum skúlaárið 2011/2012, undirvístu meiri enn fulla tíð, 52,9% undirvístu fulla tíð, meðan bara 5,9% undirvístu minni enn fulla tíð.
- At 14% av kvinnuligu svargevunum undirvístu meiri enn fulla tíð, 44% undirvístu fulla tíð, meðan heili 42% undirvístu minni enn fulla tíð.

Um hugt verður at teimum, ið tóku prógv í 2011, so kann ein siga:

- At 22,2% av svargevunum arbeiddu "meiri enn fulla tíð" skúlaárið 2011/2012. *(T.e. 60% av mannligu svargevunum og 7,7% av kvinnuligu svargevunum)*. 33,3% arbeiddu "fulla tíð". *(T.e. 40% av mannligu svargevunum og 30,8% av kvinnuligu svargevunum).* Og 44,4% arbeiddu "minni enn fulla tíð*". (T.e. 0% av mannligu svargevunum og 61,5% av kvinnuligu svargevunum.)*

Tá ið vit tosa um ársnorm, er kynsmunurin sjónskur. Um kvinnuligu svargevarnir ikki ynskja at undirvísa fulla tíð, ella um tær hava trupult við at fáa fult skema, sigur henda spurnablaðakanning einki um.[3]

Tá ið vit tosa um starvsaldur, so kann tað undra, at 22,2% av svargevunum, ið tóku prógv í 2011, og sostatt høvdu sítt fyrsta undirvísingarár í 2011/2012 , undirvístu meiri enn fulla tíð.[4]

---

[3] Nakrar kvinnur undirvísa minni enn hálva tíð. Aðrar undirvísa 95% av fullari tíð.

[4] Teir svargevar, ið tóku prógv í 2011, og sum undirvístu "meiri enn fulla tíð" skúlaárið 2011/2012, høvdu allir undirvísingarroyndir, áðrenn teir fóru á læraraskúla og/ella arbeiddu sum vikarar í lestrartíðini.

# Kap. 5

# Lestrartíðin á Føroya læraraskúla




Ritmynd 13 vísir okkum, at ein stórur meiriluti av svargevunum ikki altíð hevur ætlað at verið lærari. Hugurin til lærarayrkið er komin seinni. Nakrir svargevar viðmerkja, at hugurin varð kveiktur, tá ið tey arbeiddu sum vikarar ella royndu seg sum ungdómsvenjarar.

Um vit hyggja at kynsbýti, so siga 20,7% av kvinnunum, at tær altíð hava ætlað at verið lærarar, meðan 13% av monnunum siga, at teir altíð hava ætlað at verið lærarar.

Í júst hesum spurningi er stórur munur á árgangum.

- 36,8% av svargevunum, ið tóku prógv í 2007, siga seg altíð hava ætlað at útbúgvið seg til lærara.
- Eingin svargevi, ið tók prógv annaðhvørt í 2009 og í 2011, sigur seg altíð hava ætlað at verið lærari.




Ritmynd 14 kann lesast á tveir hættir. At bara 65% av svargevunum siga, at teir høvdu valt lærarastarvið aftur, um teir fingu høvi at velja einaferð afturat, kann tykjast lítið og órógvandi. Men at bara 5% av svargevunum siga, at teir ikki høvdu valt lærara-útbúgvingina einaferð afturat, er tekin um, at svargevarnir sum heild meta seg vera á rættari leið. Henda spurnablaðakanning sigur einki um, hvørjum tey 30%, ið eru ivingasom, ivast í. Ein kann tó gita, at yrkis- og útbúgvingarligt ivasemi er eitt tíðartekin, ið eisini rakar nýútbúnar lærarar.

Tað er eingin munur á kynsbýti í spurningi 14. Men hyggur ein at, nær svargevarnir hava tikið prógv, so sæst, at tess longur fólk hava verið lærarar (í hesi spurnablaðakanning er talan um 3, 4 ella 5 ár), tess vísari eru tey í, at tey hava valt rætta yrkisleið. Við øðrum orðum sær tað út til, at tað tekur tíð at falla til og at sláa seg til tols við yrkisleiðina.




Ritmynd 15 vísir, at helmingurin av svargevunum hevði tikið eina akademiska útbúgving, um hann ikki fóru á lærarskúla. *(T.e. 65,2% av mannligu svargevunum og 41,8% av kvinnuligu svargevunum).*

Ein lítil fjórðingur hevði tikið eina aðra miðallanga útbúgving. *(T.e. 8,7% av mannligu svargevunum og 29,1% av kvinnuligu svargevunum).*

13% av mannligu svargevunum siga, at um teir ikki vóru farnir á lærarskúla, so høvdu teir tikið eina maritima útbúgving.




Ritmynd 16 vísir, at ein lítil helmingur av svargevunum hevði annaðhvørt "nógvar undirvísingarroyndir" ella "nakrar undirvísingarroyndir", áðrenn lestrartíðina, meðan ein stórur helmingur hevði ongar undirvísingarroyndir.

Tann svargevin, ið hevði flestar royndir, hevði arbeitt 15 ár sum vikarur, áðrenn viðkomandi fór at lesa til lærara.

Tað er eingin kynsmunur í spurningi 16.




Ritmynd 17 vísir, at 44,4% av svargevunum vóru als ikki knýtt at fólkaskúlanum í lestrartíðini, 51,9% arbeiddu sum vikarar nakrar tímar, meðan 3,7% høvdu nógvar vikartímar.

Um vit hyggja at kynsbýti, so arbeiddu 8,7% av mannligu svargevunum "nógvar tímar" sum vikarar í lestrartíðini. 52,2% arbeiddu "nakrar tímar", meðan 39,1% arbeiddu "als ikki".

1,7% av kvinnuligu svargevunum arbeiddu "nógvar tímar" sum vikarar í lestrartíðini, 51,7% arbeiddu "nakrar tímar", meðan 46,6% arbeiddu "als ikki".

- 66,7% av svargevunum høvdu annaðhvørt undirvísingarroyndir í fólkaskúlanum ella arbeiddu sum vikarar í lestrartíðini. Ella bæði/og.
- 33,3% av svargevunum høvdu hvørki undirvísingarroyndir í fólkaskúlanum, áðrenn tey fóru á læraraskúla ella arbeiddu sum vikarar í lestrartíðini. *(T.e. 30,4% av mannligu svargevunum og 34,5% av kvinnuligu svargevunum.)* Hjá hesum triðingi var starvslæran teirra einasta samband við yrkisøkið.




Ritmynd 18 vísir, at 87,7% av svargevunum trivust annaðhvørt "sera væl" ella "væl" á Føroya læraraskúla. *(T.e. 91,4% av kvinnuligu svargevunum og 78,3% av mannligu svargevunum).*

Tað er eingin munur á árgangunum.

Hvat tað var, ið gjørdi Føroya læraraskúla til eitt stað, har lesandi trivust og kendu seg væl, sigur henda spurnablaðakanning einki um.




Ritmynd 19 vísir, at 82,8% av svargevunum siga seg annaðhvørt hava tikið læraraútbúgvingina í "sera stórum álvara" ella í "stórum álvara". - Hetta má sigast at vera stór tøl.

Hyggja vit at kynsbýti, so sæst:

- At 55,2% av kvinnuligu svargevunum gjørdu "sera nógv" við skúlan, 36,2% gjørdu "nógv" við skúlan, 5,2% gjørdu "eitt sindur", 1,7% gjørdu "lítið" og 1,7% gjørdu "einki" við skúlan.
- At 21,7% av mannligu svargevunum siga seg hava gjørt "sera nógv" við skúlan, 39,1% gjørdu "nógv" við skúlan, 30,5% gjørdu "eitt sindur" við skúlan og 8,7% gjørdu "lítið" við skúlan.

Sum tølini vísa, so tóku kvinnuligu svargevarnir sum heild útbúgvingina í størri álvara enn mannligu svargevarnir.

Tað er ikki nakar sjónligur munur frá árgangi til árgang.




Ritmynd 20 vísir, at bara 11,1% av svargevunum halda, at læraraútbúgvingin var trupul at standa. 70,4% siga at læraraútbúgvingin var "ikki trupul at standa", 12,3% siga, at hon var "løtt" at standa, og 6,2% siga, at hon var "sera løtt" at standa.

Um hugt verður at kynsbýti, so sæst:

- At 12,1% av kvinnuligu svargevunum siga, at útbúgvingin var "trupul" at standa, 74,1% siga, at útbúgvingin var "ikki serliga trupul", 12,1% siga, at hon var "løtt" og 1,7% siga, at hon var "sera løtt" at standa.
- At 8,7% av mannligu svargevunum siga, at útbúgvingin var "trupul at standa", 60,9% siga, at hon var "ikki serliga trupul", 13% siga, at hon var "løtt", og 17,4% siga, at hon var "sera løtt" at standa.

Sum tølini vísa, so er kynsmunurin ikki serliga stórur. Men tað eru lutfalsliga fleiri mannligir svargevar, ið halda, at útbúgvingin var løtt at standa.

Henda spurnablaðakanning sigur einki um, hví svargevarnir meta, at tað var ikki serliga trupult at standa læraraútbúgvingina. Ein orsøk kann vera, at fallprosentið og fráfallið var lítið.

**Á læraraskúlanum hevði tú nakrar grundlærugreinar. Grundlærugreinarnar vóru: Føroyskt, støddfrøði, danskt, ítrótt, handarbeið/smíð/tilevning/heimkunnleiki, kristnikunnleiki, sangur/tónleikur, skriving, samtíðar- og samfelagskunning.**

**21. Hvussu nógv lærdi tú í grundlærugreinunum?**




| | Føroyskt | Ítrótt | Kreativar lærugreinar | Kristnikunnleiki | Skriving |
|---|---|---|---|---|---|
| Sera nógv | 37% | 015% | 014% | 014% | 013% |
| Nógv | 031% | 036% | 042% | 41% | 039% |
| Eitt sindur | 21% | 37% | 030% | 030% | 035% |
| Lítið | 010% | 008% | 013% | 9% | 008% |
| Einki | 001% | 005% | 001% | 006% | 005% |

Ritmynd 21 vísir tær fimm grundlærugreinarnar, ið fjøldin av svargevunum heldur seg hava fingið mest burturúr.

Føroyskt sum grundlærugrein skarar framúr: 37% av svargevunum siga seg hava lært "sera nógv" og 30,9% siga seg hava lært "nógv" í føroyskttímunum.

Svargevarnir vísa somuleiðis á, at teir lærdu nógv í kreativu grundlærugreinunum (t.e. handarbeiði, smíð, tilevning og heimkunnleika), ítrótti, kristni og skriving.

Hinar grundlærugreinarnar fáa ikki eins góð skotsmál. Tað er einki, ið bendir á, at orsøkin er vantandi undirvísingardygd. Svargevarnir vísa harafturímóti á:

- At lærarar í hesum grundlærugreinum stundum vóru í iva um, hvat pensum skuldi gjøgnumgangast. Skuldi grundlærugreinin í høvuðsheitum snúgva seg um undirvísingarlæru, skuldi hon snúgva seg um lærubókaskipanir, ella skuldi hon í høvuðsheitum snúgva seg um at endurlesa 4. floks pensum, 7. floks pensum, 10. floks pensum ella pensum úr 1. studentsflokki?
- At grundlærugreinarnar fyltu ikki eins nógv á tímatalvuni á Føroya læraraskúla. Nakrar grundlærugreinar vóru á tímatalvuni fáar mánaðar, meðan aðrar fevndu um trý ella fýra skúlaár. Hetta kann hava ávirkað ta hevd, ið grundlærugreinarnar fingu millum tey lesandi. Próvtøkuháttur og próvtøkukrøv vóru somuleiðis ymisk frá eini grundlærugrein til aðra. Hetta kann hava ávirkað ta orku, ið hin einstaki lesandi hevur lagt í einstøku grundlærugreinina.

Tað er týdningarmikið at viðmerkja, at tað er sera ymiskt, hvat lesandi hava fingið burturúr einstøku grundlærugreinini. Onkur svargevi sigur seg hava lært "sera nógv" í føroyskum og "einki" í donskum , meðan onkur annar sigur seg hava lært "sera nógv" í donskum og "lítið" í føroyskum.

**Á læraraskúlanum hevði tú nakrar grundlærugreinar. Grundlærugreinarnar vóru: Føroyskt, støddfrøði, danskt, ítrótt, handarbeið/smíð/tilevning/heimkunnleiki, kristnikunnleiki, sangur/tónleikur, skriving, samtíðar- og samfelagskunning.**

**22. Heldur tú, at tað, sum tú lærdi í grundlærugreinunum, hevur gjørt teg (ella fer at gera teg) til ein betri lærara í hesum lærugreinum?**




| | Føroyskt | ítrótt | Kreativar grund-lærugreinar | Kristni-kunnleiki | Skriving |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja, nógv betri | 45% | 028% | 022% | 021% | 024% |
| Ja, eitt sindur betri | 35% | 049% | 049% | 048% | 053% |
| Nei | 019% | 021% | 26% | 26% | 019% |
| Tað dugi eg ikki at meta um | 001% | 003% | 003% | 005% | 004% |

Ritmynd 22 vísir greitt, at størsti partur av svargevunum heldur, at tað, teir lærdu í føroyskum, ítrótti, kreativu grundlærugreinunum og kristnikunnleika hevur gjørt teir til annaðhvørt "nógv betri" ella "eitt sindur betri" lærarar í hesum lærugreinum.

Tað, ið svargevarnir lærdu í skriving, hevur somuleiðis gjørt teir betur førar fyri at læra næmingar vakra handskrift.

Hinar grundlærugreinarnar fáa ikki eins góð skotsmál.

Um vit samanbera ritmynd 21 og ritmynd 22 síggja vit, at tað er ein samanhangur millum (1) at læra nógv í eini (grund)lærugrein á Føroya læraraskúla og (2) at kenna á sær, at ein hevur góðan undirvísingarførleika í hesi lærugrein í fólkaskúlanum.

Tað skal tó viðmerkjast, at grundlærugreinarnar ikki fylla eins nógv á tímatalvu fólkaskúlans. Svargevarnir kunnu tí hava nógvar royndir at undirvísa í onkrari lærugrein (t.d. í føroyskum og støddfrøði, sum eru stórar lærugreinar í fólkaskúlanum) og færri ella ongar royndir at undirvísa í eini aðrari lærugrein (t.d. tónleiki/sangi, sum fyllir minni á tímatalvu fólkaskúlans). Hetta kann ivaleyst ávirka úrslitið.

# FØROYSKT

| 23.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| **86,2%** | **34,5%** | **31%** | | **10,3%** | |

| 23.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 6,8 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í føroyskum:<br>8,1 tímar pr. viku<br><br>M: 12 tímar pr. viku<br>K: 6,3 tímar pr. viku | (16t:1), (15tx1), (14tx1), (13tx1), (11tx2), (10tx2), (9tx1), (8tx2), (7tx1), (6tx3), (5tx2), (4tx1), (3tx1), (2tx1), (1tx1), (0x4)<br>**84% undirvísa í hesum linjufakinum.**<br>16% undirvísa als ikki í linjufakinum<br>(M: 100% - 0%. K: 82,6% - 17,4%) |

| 23.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **85,2%** | **11,1%** | | | **3,7%** |

| 23.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| **44,8%** | **37,9%** | **13,8%** | **3,5%** | |

| 23.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| **33,3%** | **55,6%** | **7,4%** | **3,7%** | |

| 23.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **89,7%** | **10,3%** | |

# DANSKT

| 24.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| **70%** | **30%** | **40%** | | **10%** | |

| 24.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 2,5 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í donskum:<br>6,3 tímar pr. viku<br><br>M: 4 tímar pr. viku<br>K: 2,1 tímar pr. viku | (8tx2), (6tx1), (3tx1), (0tx6)<br>**40% undirvísa í hesum linjufakinum.**<br>60% undirvísa ikki í linjufakinum<br>(M: 50% - 50%. K: 37,5% - 62,5%) |

| 24.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **22,2%** | **33,3%** | **33,3%** | **11,2%** | |

| 24.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| | **20%** | **80%** | | |

| 24.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| | **55,5%** | **44,5%** | | |

| 24.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **41,7%** | **16,6%** | **41,7%** |

# ENSKT

| 25.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| **85,7%** | **61,9%** | | | **9,5%** | |

| 25.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 3,1 tímar<br>Tey, ið undirvísa í enskum:<br>7,7 tímar pr. viku<br><br>M: 4 tímar pr. viku<br>K: 1,8 tímar pr. viku | (10x1), (8x2), (6x1), (5x1), (4x3), (3x1) (0x8)<br>**52,9% undirvísa í hesum linjufakinum.**<br>47,1% undirvísa ikki í linjufakinum<br>(M: 66,7% - 33,3% - K: 45,5% - 54,5%) |

| 25.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **68,7%** | **18,8%** | **12,5%** | | |

| 25.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| **9,5%** | **33,3%** | **42,9%** | **14,3%** | |

| 25.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| **19%** | **61,9%** | **14,3%** | **4,8%** | |

| 25.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **85,7%** | **9,5%** | **4,8%** |

# TÝSKT

| 26.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| **100%** | **66,7%** | | | **16,6%** | |

| 26.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 4 tímar pr. vikuna<br>Tey, ið undirvísa í týskum:<br>8 tímar pr. viku | (12tx1), (8tx1), (4tx1) og (0tx3)<br>**50% undirvísa í linjufakinum.**<br>50% undirvísa ikki í linjufakinum. |

| 26.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **40%** | **40%** | | **20%** | |

| 26.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| **16,7%** | | **50%** | **33,3%** | |

| 26.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| **20%** | **20%** | **60%** | | |

| 26.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **83,3%** | | **16,7%** |

# KRISTNI

| 27.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| **86,7%** | **20%** | | | **6,7%** | |

| 27.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 2,3 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í kristni:<br>2,7 tímar pr. viku<br><br>M: 4 tímar pr. viku<br>K: 2 tímar pr. viku | (4tx4), (3tx3), (2tx1), (1tx3), (0tx2)<br>**84,6% undirvísa í linjufakinum. 15,4%** undirvísa ikki í linjufakinum (M: 100% - 0% - K: 81,8% - 18,2%) |

| 27.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **23,1%** | **53,8%** | **7,7%** | **15,4%** | |

| 27.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| | | **38,5%** | **53,8%** | **7,7%** |

| 27.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| **7,7%** | **53,8%** | **38,5%** | | |

| 27.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **84,6%** | **7,7%** | **7,7%** |

# LANDALÆRA

| 28.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| 100% | | | | | |

| 28.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| 4,7 tímar pr. viku | (6tx1), (4tx2)<br>Øll undirvísa í linjufakinum |

| 28.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **33,3%** | **66,7%** | | | |

| 28.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| | | **33,3%** | **66,7%** | |

| 28.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| | **100%** | | | |

| 28.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **100%** | | |

# STØDDFRØÐI

**29.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar)**

| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
|---|---|---|---|---|---|
| **81,5%** | **66,7%** | **18,5%** | | **7,4%** | |

**29.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið?**

| Miðal | Spennið |
|---|---|
| Øll: 8,7 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í støddfrøði:<br>9,1 tímar pr. viku<br><br>M: 9,6 tímar pr. viku<br>K: 7,6 tímar pr. viku | (15tx1), (13tx2), (12tx2), (11tx5), (10tx5), (7tx1), (6tx1), (5tx4), (4tx1), (2tx1), (0tx1)<br>**95,8% undirvísa í hesum linjufaki.**<br>4,2% undirvísa ikki í linjufakinum.<br>(M: 100% - 0%. K: 90.6% - 9,4%) |

**29.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum?**

| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
|---|---|---|---|---|
| **70,4%** | **18,5%** | **11,1%** | | |

**29.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum?**

| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
|---|---|---|---|---|
| **20%** | **44%** | **28%** | **4%** | **4%** |

**29.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum?**

| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
|---|---|---|---|---|
| **30,8%** | **65,4%** | **3,8%** | | |

**29.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess?**

| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
|---|---|---|
| **92,6%** | **7,4%** | |

# ALISFRØÐI

## 30.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar)

| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
|---|---|---|---|---|---|
| **75%** | **25%** | **8,3%** | | **8,3%** | |

## 30.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið?

| Miðal | Spennið |
|---|---|
| Øll: 3,8 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í alisfrøði:<br>4,9 tímar pr. viku<br><br>M: 6,5 tímar pr. viku<br>K: 1,6 tímar pr. viku | (10tx1), (8tx1), (4tx3), (2tx2), (0tx2)<br>**77,8% undirvísa í linjufakinum.**<br>22,2% undivísa ikki í linjufakinum.<br>(M: 100% - 0%. K: 60% - 40%) |

## 30.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum?

| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
|---|---|---|---|---|
| **33,3%** | **55,6%** | | **11,1%** | |

## 30.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum?

| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
|---|---|---|---|---|
| | **22,2%** | **22,2%** | **55,6%** | |

## 30.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum?

| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
|---|---|---|---|---|
| **22,2%** | **44,5%** | **33,3%** | | |

## 30.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess?

| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
|---|---|---|
| **77,8%** | **22,2%** | |

# SMÍÐ

| 31.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| **90%** | **20%** | | | **10%** | **10%** |

| 31.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 2,3 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í smíð:<br>4,2 tímar pr. viku<br><br>M: 3 tímar pr. viku<br>K: 0 tímar pr. viku | (10tx1), (4tx2), (2tx1), (1tx1), (0tx4)<br>**55,6% undirvísa í linjufakinum.**<br>44,4% undirvísa ikki í linjufakinum.<br>(71,4% - 28,6% - K: 0% - 100%) |

| 31.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **14,3%** | **57,1%** | **14,3%** | **14,3%** | |

| 31.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| | | **50%** | **37,5%** | **12,5%** |

| 31.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| **25%** | **50%** | **12,5%** | **12,5%** | |

| 31.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **60%** | **20%** | **20%** |

# LÍVFRØÐI

| 32.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| **94,4%** | **27,8%** | | | **16,7%** | |

| 32.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 2,1 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í lívfrøði:<br>4 tímar pr. viku<br><br>M: 3,5 tímar pr. viku<br>K: 1,7 tímar pr. viku | (8tx2), (5tx1), (4tx1), (3tx2), (2tx2), (1tx1), (0tx8)<br>**53% undirvísa í linjufakinum.**<br>47% undirvísa ikki í linjufakinum.<br>(M: 75% - 25%. K: 46,1% - 53,9%) |

| 32.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **35,7%** | **42,9%** | **14,3%** | | **7,1%** |

| 32.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| | | **75%** | **25%** | |

| 32.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| **7,1%** | **57,2%** | **28,6%** | **7,1%** | |

| 32.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **58,8%** | **29,4%** | **11,8%** |

# SAMFELAGSFRØÐI

| 33.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| 100% | | | | | |

| 33.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 0,7 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í søgu og samtíð:<br>2 tíamr pr. viku<br><br>M: 0 tímar pr. viku<br>K: 2 tímar pr. viku | (2tx1), (0tx2)<br>**33,3% undirvísa í linjufakinum.**<br>66,7% undirvísa ikki í linjufakinum.<br>(M: 0% - 100%. K: 100% - 0%) |

| 33.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| | **33,3%** | **66,7%** | | |

| 33.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| | | | **66,7%** | **33,3%** |

| 33.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| | **33,3%** | **66,7%** | | |

| 33.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **33,3%** | **33,3%** | **33,3%** |

# HANDARBEIÐI

| 34.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| **100%** | **45%** | | | **25%** | |

| 34.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 2 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í handarbeiði:<br>3,3 tímar pr. viku | (9tx1), (5tx1), (4tx2), (3tx1), (2tx7), (0tx8)<br>**60% undirvísa í linjufakinum.**<br>40% undirvísa ikki í linjufakinum |

| 34.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **38,9%** | **27,8%** | **33,3%** | | |

| 34.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| **5,3%** | | **21,1%** | **42,1%** | **31,5%** |

| 34.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| **16,7%** | **38,9%** | **44,4%** | | |

| 34.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **70%** | **25%** | **5%** |

# EVNING

| 35.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| **75%** | **12,5%** | | **12,5%** | | |

| 35.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 3,5 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í evning/myndlist:<br>4,2 tímar pr. viku | (12tx1), (3tx1), (2tx3), (0tx1)<br>**83,3% undirvísa í linjufakinum.**<br>16,7% undirvísa ikki í linjufakinum |

| 35.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **83,3%** | | **16,7%** | | |

| 35.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| | | **40%** | **60%** | |

| 35.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| **40%** | **60%** | | | |

| 35.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **83,3%** | **16,7%** | |

# MYNDLIST

| 36.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| **71,4%** | | | **14,3%** | | **14,3%** |

| 36.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 0,8 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í evning/myndlist:<br>1,3 tímar pr. viku | (2tx1), (1tx2), (0tx2)<br>**60% undirvísa í linjufakinum.**<br>40% undirvísa ikki í linjufakinum |

| 36.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **25%** | **25%** | **50%** | | |

| 36.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| | | | **60%** | **40%** |

| 36.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| **20%** | **60%** | **20%** | | |

| 36.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **80%** | **20%** | |

# SØGA

| 37.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
| **90.9%** | **27,3%** | | | **18,2%** | **4,5%** |

| 37.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið? | |
|---|---|
| Miðal | Spennið |
| Øll: 2,1 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í søgu og samtíð:<br>3 tímar pr. viku<br><br>M: 2 tímar pr. viku<br>K: 2,3 tímar pr. viku | (6tx1), (4tx4), (3tx2), (2tx5), (1tx1), (0tx6)<br>**64,7% undirvísa í linjufakinum.** 35,3% undirvísa ikki í linjufakinum. (M: 75% - 25%. K: 63,6% - 36,4%) |

| 37.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
| **47,1%** | **29,3%** | **11,8%** | | **11,8%** |

| 37.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
| | **9,5%** | **14,3%** | **66,7%** | **9,5%** |

| 37.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum? | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
| **10,5%** | **52,7%** | **26,3%** | **10,5%** | |

| 37.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess? | | |
|---|---|---|
| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
| **68,2%** | **27,3%** | **4,5%** |

# TÓNLEIKUR

**38.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar)**

| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
|---|---|---|---|---|---|
| **75%** | **37,5%** | **12,5%** | | | |

**38.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið?**

| Miðal | Spennið |
|---|---|
| Øll: 2 tímar pr. viku<br>Tey, ið undirvísa í sangi/tónleiki:<br>3,5 tímar<br><br>M: 2 tímar pr. viku<br>K: 2 tímar pr. viku | (6tx1), (4tx1), (2tx2), (0tx3)<br>**57,1% undirvísa í linjufakinum.**<br>42,9% undirvísa ikki í linjufakinum.<br>(M: 100% - 0%. K: 50% - 50%) |

**38.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum?**

| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
|---|---|---|---|---|
| **20%** | | **80%** | | |

**38.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum?**

| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
|---|---|---|---|---|
| | | **12,5%** | **37,5%** | **50%** |

**38.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum?**

| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
|---|---|---|---|---|
| **14,3%** | **14,3%** | **57,1%** | **14,3%** | |

**38.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess?**

| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
|---|---|---|
| **25%** | **50%** | **25%** |

# ÍTRÓTT

## 39.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar)

| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
|---|---|---|---|---|---|
| **72,2%** | **66,7%** | **5,6%** | | | |

## 39.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið?

| Miðal | Spennið |
|---|---|
| Øll: 4,6 tímar pr viku<br>Tey, ið undirvísa í ítrótti/svimjing:<br>5,3 tímar pr. viku<br><br>M: 4,8 tímar pr. viku<br>K: 4,5 tímar pr. viku | (10tx2), (8tx2), (6tx5), (3tx1), (2tx5), (0tx2)<br>**88,2% undirvísa í linjufakinum.**<br>11,8% undirvísa ikki í linjufakinum.<br>(M: 88,9% - 11,1%. K: 87,5% - 12,5%) |

## 39.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum?

| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
|---|---|---|---|---|
| **33,3%** | **50%** | **11,1%** | **5,6%** | |

## 39.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum?

| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
|---|---|---|---|---|
| | | **38,9%** | **61,1%** | |

## 39.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum?

| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
|---|---|---|---|---|
| **27,8%** | **55,5%** | **16,7%** | | |

## 39.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess?

| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
|---|---|---|
| **77,7%** | **16,7%** | **5,6%** |

# HEIMKUNNLEIKI

**40.1 Hví valdi tú hetta fakið sum linjufak? (Set 1 ella 2 krossar)**

| Fakið hevði mín áhuga | Eg kendi meg stinna/stinnan í fakinum frammanundan | Fakið fyllir nógv á tímatalvuni í fólkaskúlanum | Fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum | Eg dugdi illa hetta fakið frammanundan og vildi fegin læra tað | Tí ein góður floksfelagi valdi fakið |
|---|---|---|---|---|---|
| **61,5%** | **23,1%** | | **7,7%** | **7,7%** | |

**40.2 Hvussu nógvar tímar undirvísir tú í hesum fakinum hetta skúlaárið?**

| Miðal | Spennið |
|---|---|
| Øll: 1,9 tímar pr. viku<br>Te, ið undirvísa í heimkunnleika:<br>5,3 tímar pr. viku<br><br>M: 0,2 tímar pr. viku<br>K: 3,3 tímar pr. viku | (10tx1), (7tx1), (3tx1), (1tx1) (0tx7)<br>**36,4% undirvísa í linjufakinum.**<br>63,6% undirvísa ikki í linjufakinum<br>(M: 20% - 80%. K: 50% - 50%) |

**40.3 Dámar tær væl at undirvísa í hesum fakinum?**

| Sera væl | Væl | Toluliga | Illa | Als ikki |
|---|---|---|---|---|
| **44,5%** | **22,2%** | **33,3%** | | |

**40.4 Fær hetta fakið høga/lága raðfesting í føroyska fólkaskúlanum?**

| Sera høga raðfesting | Høga raðfesting | Hóskandi raðfesting | Lága raðfesting | Sera lága raðfesting |
|---|---|---|---|---|
| | | **60%** | **40%** | |

**40.5 Metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum?**

| Sera góður | Góður | Hampuligur | Vánaligur | Sera vánaligur |
|---|---|---|---|---|
| **33,3%** | **66,7%** | | | |

**40.6 Hevði tú valt hetta fakið aftur sum linjufak, um tú fekst høvi til tess?**

| Ja | Tað er ivasamt | Nei |
|---|---|---|
| **41,7%** | **58,3%** | |

## ALMENNAR VIÐMERKINGAR TIL SPURNINGAR 23 – 40: LINJUFAKSLESTUR OG LINJUFAKSUNDIRVÍSING

Um ein hyggur at linjufakslestrinum á Føroya læraraskúla, so kann ein siga:

- At teir allarflestu svargevarnir valdu tey linjufak, ið høvdu teirra áhuga, og sum teir kendu seg fakliga stinnan í.
- At nakrir fáir svargevar valdu eitt linjufak, tí at fakið fylti nógv á tímatalvu fólkaskúlans. *(Her verður oftast víst til føroyskt og støddfrøði).*
- At nakrir fáir svargevar valdu eitt linjufak, tí fakið sýntist lætt at koma ígjøgnum.
- At nakrir fáir svargevar valdu eitt linjufak, tí teir dugdu illa fakið frammanundan.
- At ein størri prosentpartur av teimum, ið hava havt t.d. støddfrøði, ítrótt, evning og kristni sum linjufak, undirvístu skúlaárið 2011/2012 í sínum linjufakum, enn tey, ið høvdu havt t.d. heimkunnleika, danskt, samfelagsfrøði, enskt og týskt sum linjufak. *(Sí ritmynd 40.7 á næstu blaðsíðu).*
- At mannligir svargevar undirvísa nógv meiri í sínum linjufakum enn kvinnuligir svargevar. *(Sí ritmynd 40.8).*
- Tá ið spurt verður, "hvat dámar tær at undirvísa í hesum fakinum?" og "metir tú, at tú ert ein góður lærari í hesum fakinum?" eru nøkur fak, ið fáa betri umtalu enn onnur. Tað kunnu vera ymiskar orsøkir til henda mun. T.d. kann tað hugsast, at tað er lættari at undirvísa í einum skúlafaki enn í einum øðrum. At lærubókaskipanir eru meiri mentar í einum skúlafaki enn í einum øðrum. At ein lærugrein fær hægri raðfesting og harvið meir hevd millum lærarar, næmingar, foreldur, leiðslu enn aðrar. At samlaða tímabýtið er so ymiskt frá lærugrein til lærugrein, og at hetta ávirkar arbeiðslag og arbeiðshug hjá bæði lærarum og næmingum. Osfr..

Um ein hyggur at einstøku spurnabløðunum, so sæst:

- At tað er sera stórt samsvar millum "at dáma at undirvísa" í eini lærugrein og "at kenna seg sum góðan lærara" í hesi lærugrein.
- At ein stórur meiriluti av teimum, ið valdu eitt linjufak, tí fakið annaðhvørt "sýntist lætt at koma ígjøgnum" ella tí, "at tey dugdu illa fakið frammanundan" (1) dáma illa at undirvísa í hesum linjufaki í dag, (2) uppfata seg sum "hampuligar" ella "vánaligar" lærarar í linjufakinum og (3) høvdu ikki valt linjufakið aftur, um tey fingu høvi til tess.
- At 31,1% av svargevunum halda seg vera eins góðar lærarar í øllum trimum linjufakum.
- At 68,8% av øllum svargevunum halda seg ikki vera eins góðar lærarar í øllum trimum linjufakum. *(Nakrir svargevar siga m.a., at teir halda seg vera "sera góðar" í einum linjufaki, "góðar" í einum øðrum og "hampuligar ella vánaligar" í einum triðja).*
- At svargevar, ið ikki undirvísa í einum linjufaki, svara oftari enn onnur, at teir ikki høvdu valt linjufakið aftur, um teir fingu høvi til tess.
- At nakrir svargevar siga, at teir høvdu valt eitt linjufak umaftur, sjálvt um teir ikki undirvísa í lærugreinini í skúlanum.
- At tað finnast einstakir svargevarar í múgvuni, ið siga, at teir ikki høvdu valt nakað av sínum trimum linjufakum aftur, um teir fingu høvi at velja umaftur.


40.7 Hvussu nógv av teimum, ið hava lisið eitt ávíst linjufak á Føroya læraraskúla, undirvístu í hesum linjufaki skúlaárið 2011/2012?
Undirvístu í lærugreinini
Undirvístu ikki í lærugreinini
Heimkunnleiki 036% 064%
Ítrótt 088% 012%
Tónleik 057% 043%
Søga 065% 035%
Myndlist 60% 40%
Evning 083% 017%
Handarbeiði 60% 40%
Samfelagsfrøði 033% 067%
Lívfrøði 53% 47%
Smíð 056% 044%
Alis- og evnafrøði 078% 022%
Støddfrøði 096% 004%
Landalæra 100%
Kristni 085% 015%
Týskt 50% 50%
Enskt 053% 047%
Danskt 40% 60%
Føroysk 84% 16%

# 40.8 Hvussu nógvar tímar undirvístu ávikavist mannligir og kvinnuligir svargevar í miðal pr. viku í sínum linjufakum?






Ritmynd 41 vísir, at tá ið svargevarnir verða spurdir, um teir lærdu nógv í linjufakunum, ið teir kunnu nýta í øðrum lærugreinum, so eru teir ójavnir á máli. Nakrir svargevar halda seg hava lært "sera nógv" ella "nógv", aðrir halda seg hava lært "lítið" ella "einki", meðan størsti parturin (t.e. 40,7%) heldur seg hava fingið "eitt sindur" av almendidaktiskum førningi í linjugreinalestrinum, ið kann flytast til onnur fakøki.

Tá ið ein lesur ritmynd 41, skal ein hava í huga, at linjufakini á Føroya læraraskúla kunnu bólkast í málvísindi (føroyskt, danskt, enskt, týskt), náttúruvísindi (alisfrøði, evnafrøði, landalæra og lívfrøði), samfelags- og hugvísindi (søga, samfelagsfrøði og kristni), kreativu lærugreinarnar (handarbeiði, smíð, myndlist, tónleik, evning) og støddfrøði. Tá ið ein nærlesur einstøku spurnabløðini sæst, at svargevar, ið hava havt linjufak, ið hoyra undir sama høvuðsbólk, siga seg kunna nýta meiri av tí, teir lærdu í einum linjufaki í einum øðrum linjufaki, enn svargevar, ið hava havt linjufak, ið ikki hoyra undir sama høvuðsbólk.

Fakdidaktiskur líkleiki ella fakdidaktiskur ymiskleiki er við øðrum orðum ein orsøk til, at svargevar eru so ójavnir á máli í spurningi 41.




Ritmynd 42 vísir, at 62,4% av svargevunum halda, at linjufakslesturin skuldi fylt annaðhvørt "nógv meira" ella "meira" í læraraútbúgvingini. 33,8% halda, at linjufakslesturin fylti nokk. Meðan bara 3,8% halda, at hann skuldi fylt "minni" ella "nógv minni".

Við øðrum orðum so halda tveir triðingar av svargevunum, at linjufakslesturin eigur at vera bulurin í læraraútbúgvingini, og at hesin bulur eigur at verða styrktur. Henda spurnablaðakanning sigur ikki, um svargevarnir kundu hugsað sær, (1) at linjufakslesturin fevndi um fleiri áramál, (2) um lesandi skuldu havt fleiri tímar um vikuna í linjufakinum, (3) um linjufakslesturin skuldi havt størri prosentpart av samlaða tímatalinum á læraraskúlanum, ella (4) um lesandi skuldu havt 4 ella kanska 5 linjufak heldur enn 3.




Ritmynd 43 vísir, at 58,8% av svargevunum siga, at teir lærdu annaðhvørt "sera nógv" ella "nógv" av starvslæruni. 27,5% siga seg hava lært "eitt sindur". 13,7% siga seg hava lært "lítið", meðan eingin sigur seg hava lært "einki".

Um vit hyggja at teimum svargevum, ið hvørki høvdu undirvísingarroyndir, áðrenn teir fóru undir útbúgving ella arbeiddu sum vikarar í lestrartíðini, so siga 18,5%, at teir lærdu "sera nógv" av starvslæruni. 55,6% siga, at teir lærdu "nógv". 22,2% siga, at teir lærdu "eitt sindur". Og 3,7% siga, at teir lærdu "lítið".

Svargevar viðmerkja, at tær fýra starvslærurnar vóru sera ymiskar. Og at starvslærararnir sum heild vóru sera ymiskir. Í onkrari starvslæru lærdi ein sera nógv, í onkrari aðrari starvslæru fekk ein minni burturúr.

Svargevar viðmerkja somuleiðis, at tær starvslærur, ið vóru lisnar uttanlands, vóru serliga læruríkar. Útlendsku starvslærararnir gjørdu sum heild meiri burtur úr starvsvenjingini, teir dugdu betur at seta krøv til tey lesandi og at geva nágreiniliga eftirmeting. Ein svargevi sigur: *"Tá ið eg var í praktikk í Danmark, fekk eg nógv ítøkiligt feed-back... Hatta dugir tú væl, og hatta mást tú læra teg...".*




Í spurningi 44 høvdu svargevarnir møguleika at seta 2 krossar. Nógvir svargevar nýttu henda møguleika.

Ritmynd 44 vísir, at tað, ið svargevarnir lærdu nógv mest av í starvslærutíðini, var:

- At undirvísa sjálv/ur. (72,8%)
- At eygleiða starvslæraran. (37%)
- At fyrireika starvslæruna. (35,8%)

At eygleiða onnur lesandi, at tosa við starvslæraran um starvslæruna og at leggja starvslæruroyndirnar fram fyri lærara og floksfeløgum er sambært svargevunum nógv minni læruríkt.

Úrslitið er áhugavert, tá ið hugsað verður um, hvussu vanligt tað hevur verið, at lesandi á Føroya læraraskúla fara í starvslæru í bólki.

Um hugt verður at teimum, ið hvørki høvdu undirvísingarroyndir, áðrenn tey byrjaði á Føroya læraraskúla ella arbeiddu sum vikarar í lestrartíðini, so siga 96,3%, at tey lærdu mest av at undirvísa sjálv. Hetta prosenttalið sigur okkum, hvussu týdningarmiklir pultstímarnir eru fyri tey lesandi, ið ikki hava roynt at undirvíst frammanundan.




Ritmynd 45 vísir, at eingin svargevi dugir at síggja stórt samband ella stóran samanhang millum starvslæru og lærarayrki (t.e. praktikk og praksis).

Helmingurin av svargevunum sigur, at starvslæra "í ávísan mun" kann samanberast við "at vera lærari". Og helmingurin heldur ikki, at starvslæran og lærarayrkið kunnu líknast saman.

## 46. Kanst tú grundgeva fyri tínum svari?

Sum ritmynd 45 vísti, so eru svargevarnir í tveimum pørtum. 48,1% siga, at starvslærutíðin "í ein ávísan mun" kann samanberast við veruligt lærararalív. 51,9% halda ikki, at tað er sjónligur líkleiki millum at vera í starvslæru og at starvast sum lærari.

Tey, ið siga, at starvslærutíðin "í ein ávísan mun" kann samanberast við at vera lærari, vísa m.a. á:

- At starvslesandi verða noydd at fyrireika undirvísingina, at finna og seta seg inn í hóskandi tilfar og at standa fyri undirvísingini. Hetta er ein partur av tí, ið ein lærari ger dag og dagliga.
- At starvslesandi fáa roynt seg "live", sum ein svargevi orðar seg. – Tey uppliva, hvussu tað er at standa frammanfyri einum stórum flokki. Tey læra at fáa tamarhald á nervum, andadrátti, tónalagi osfr..
- At starvslesandi fáa royndir í at skapa arbeiðsró og gott arbeiðslag í flokkinum. Tey merkja, hvussu gott tað kennist "at hava tamarhald" á flokkinum, og hvussu illa tað kennist "at missa tamarhaldið".
- At starvslesandi uppliva, hvussu lítið samband tað stundum kann vera millum ta ætlaðu undirvísingagongdina og tað, ið veruliga kemur burturúr.
- At starvslesandi fáa ein kunnleika um lærarayrkið, ið er øðrvísi og meiri autentiskur enn tað, tey lesa og hoyra um á lærararaskúlanum.
- At eftir starvslæruna hava starvslesandi ognað sær nakrar "casir" úr flokshølinum og skúlanum, ið kunnu hjálpa teimum at skilja læruástøði betur. Ein svargevi sigur: *"Starvslæran gevur tær nakrar royndir, ið fær teg at reflektera yvir lærarayrkið".*
- At starvslesandi merkja, um teimum dámar "luktin í bakarínum", sum ein svargevi orðar seg. Tíma tey at vera saman við næmingum, tíma tey at undirvísa, orka tey gangin, rútmuna, ringiklokkuna osfr.. Ein svargevi sigur: "*Tað góða við starvslæruni er, at tú finnur út av, um tær yvirhøvur dámar starvið".*

Tey, ið siga, at starvslærutíðin ikki kann samaberast við at vera lærari, vísa m.a. á:

- At starvslæran hevur einki endamál. Eingi krøv verða sett tí lesandi. Og tann lesandi veit ikki, hvat hann skal leggja stóran dent á, og hvat hann skal leggja minni dent á.
- At starvslærutíðin fevnir um ov fáar vikur. Starvslesandi læra ongantíð næmingarnar og flokkin at kenna. At lærarin kennir næmingarnir er ein fortreyt, um tað skal hepnast honum at skapa dygdargóða og næmingalagaða undirvísing.
- At lesandi eru í starvslæru ov fáar tímar um vikuna.
- At stutta starvslæran og fáu pultstímarnir ofta eru fyrireikaðir út í æsir. Hetta ger, at lesandi nærum duga hvønn setning, tey siga, uttanat. Spontaniteturin, ið er ein natúrligur partur av lærarastarvinum, verður burtur.
- At tað er sera óheppið at trý ella fýra lesandi eru í starvslæru saman. Hetta ger støðuna kunsturliga á meiri enn ein hátt. M.a. undirvísa lesandi bara ein lítlan part av tíðini. Restina av tíðini eygleiða tey onnur starvslesandi ella starvslæraran. Harumframt er tað púra ónatúrligt, at 3 ella 4 lesandi og 1 starvslærari eru um 20-24 næmingar í senn.
- At tað er óheppið, at starvslærarin ofta tekur teir truplu næmingarnar út úr flokshølinum ein part av tíðini ella situr undir liðini á teimum, soleiðis at starvslesandi kunnu undirvísa restini í friði og náðum.
- At starvslærarin allatíðina er til reiðar at hjálpa tær, um tað skuldi gingið galið.
- At starvslærarin og onnur lesandi eygleiða teg, meðan tú undirvísir, ger, at tú førir teg fram á heilt øðrvísi hátt, enn um tú vart einsamallur.
- At næmingarnir ikki hava virðing fyri starvslesandi. Ein svargevi skrivar: *"Næmingarnir vænta, at skemaið verður niðurlagt í starvslærutíðini, og at teir sleppa at gera "okkurt stuttligt" ella "okkurt øðrvísi".*
- At undirvísing í starvslærutíðini sjáldan er vanlig floksundirvísing, men evnisarbeiði, verkætlanararbeiði og onnur alternativ innsløg. Hetta ger, at starvslesandi undirvísa í lítlan mun, men harafturímóti vegleiða bólkum og ganga næmingunum til handa.

Tveir svargevar taka rættuliga væl samanum tað, ið fjøldin heldur.

> Hin fyrri sigur: *"Tá ið tú ert í starvslæru nýtir tú nógva fyrireikingartíð til fáar undirvísingartímar í sera avmarkaðum og stuttum tíðarskeiði. Fleiri lesandi samstarva um fyrireiking, undirvísing og innihald, fleiri vaksin eru inni í flokshølinum, fleiri at hjálpa næmingunum, tá ið undirvíst verður. Tí verður undirvísingarstøðan ikki lík "veruleikanum" sum lærari. Harafturat fæst ikki innlit í langtíðarætlanir og allar arbeiðsuppgávurnar hjá einum útbúnum lærara."*

> Hin seinni sigur: *"Ein starvslesandi fær innlit í <u>at undirvísa</u> og <u>at fyrireika undirvísingina</u>, sum er <u>ein partur</u> av lærarastarvinum. Men lærarastarvið er so øgiliga nógv meiri enn at fyrireika undirvísingina og at undirvísa. Her hugsi eg m.a. um toymisfundir/samskifti, foreldrasamstarv. So tað er ofta soleiðis, at undirvísingarparturin fyllir minst í starvinum. Starvslæran er tí bara "at snodda" til starvið."*




Ritmynd 47 vísir, at 2/3 av svargevunum halda, at teir hava havt størst gagn av linjufakslestrinum, síðan teir gjørdust lærarar. Hetta úrslitið er sambæriligt við ritmynd 42, ið vísir, at 62,4% av svargevunum halda, at linjufakslesturin átti at fylt meiri í læraraútbúgvingini.

Svargevarnir siga, at teir hava havt næststørst gagn av tí, ið teir lærdu í námsfrøði sálarfrøði og triðstørst gagn av tí, ið teir lærdu í starvslæruni.

Bókligu- og kreativu grundlærugreinarnar fáa samanumtikið ikki eins góð skotsmál, sjálvt um tað eru svargevar í múgvuni, ið halda, at nevniliga bókligu- og kreativu grundlærugreinarnar vóru tær mest gagnligu.

14,8% av svargevunum vilja ikki taka dagar ímillum og siga tí, "at allir partar hava verið eins gagnligir".

**48. Hvussu stóra vitan hevði tú um ymiskar undirvísingarhættir/ tilgongdir, tá ið tú fórst av læraraskúlanum?** (Úrvaldar tilgongdir eru nevndar niðanfyri).

| | | Sera stóra vitan | Stóra vitan | Eg visti eitt sindur | Lítla vitan | Onga vitan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 48.1 | Vanlig floksundirvísing/ talvuundirvísing | 18,6% | 35,8% | 37% | 7,4% | 1,2% |
| 48.2 | Bólkaarbeiði | 12,3% | 45,8% | 33,3% | 8,6% | 0 % |
| 48.3 | Evnisarbeiði | 7,4% | 33,3% | 45,7% | 12,4% | 1,2% |
| 48.4 | Verkætlanararbeiði | 4,9% | 25,9% | 42% | 19,8% | 7,4% |
| 48.5 | Verkstaðararbeiði | 3,7% | 25,9% | 45,7% | 22,2% | 2,5% |
| 48.6 | Søgutráður (Storyline) | 12,3% | 24,7% | 28,4% | 22,3% | 12,3% |
| 48.7 | Samstarvslæra (Cooperativ læring) | 3,8% | 12,7% | 27,8% | 43% | 12,7% |
| 48.8 | MI ástøðið hjá Gardner | 15% | 37,5% | 32,5% | 10% | 5% |
| 48.9 | Ástøðið um læringstílar hjá Dunn & Dunn | 6,3% | 16,2% | 27,5% | 23,8% | 26,2% |
| 48.10 | Fyrireikingar- og eftirmetingarfrymlar *(T.d. Hiim og Hippe, SMTTE)* | 7,5% | 13,8% | 28,7% | 17,5% | 32,5% |

Ritmynd 48 vísir fyrst, at tað er sera ymiskt, hvussu stóra vitan einstøku svargevarnir hildu seg hava um vælkendar undirvísingar- og eftirmetingarhættir, tá ið teir fóru av læraraskúlanum. – Tað eru svargevar, ið hildu seg hava "sera stóra vitan" um fjølbroyttar undirvísingartilgongdir, og tað eru svargevar, ið hildu seg vita millum lítið og einki um somu tilgongdir.[5]

Ritmynd 47 vísir harnæst, at tað er ójavnt, hvørjar undirvísingarhættir fjøldin kendi seg væl kunnuga við, og hvørjar undirvísingarhættir fjøldin ikki hevði stóran kunnleika til. *(Ber til dømis bólkaarbeiði saman við ástøðinum um læringstílar).*

Ritmynd 47 vísir til seinast, at svargevarnir sum heild hildu seg hava avmarkaða almenn didaktiska vitan, tá ið teir fóru av Frælsinum.

- 45,6% av svargevunum siga seg annaðhvørt hava "eitt sindur av vitan", "lítla vitan" ella "onga vitan" um vanliga floks- ella talvuundirvísing.
- 59,3% siga seg hava annaðhvørt "eitt sindur av vitan", "lítla vitan" ella "onga vitan" um evnisarbeiði.
- 69,2% siga seg hava annaðhvørt "eitt sindur av vitan", "lítla vitan" ella onga vitan" um verkætlanararbeiði.
- Og 78,7% siga seg hava annaðhvørt "eitt sindur av vitan", "lítla vitan" ella "onga vitan" um fyrireikingar- og eftirmetingarfrymlar so sum Hiim og Hippe og SMTTE.

[5] Tað er ikki eyðsýntur munur á árgangum. Tann stóri munurin er á svargevum, ið hava gingið í sama árgangi. T.e. á lesandi, ið hava sitið lið um lið ein stóran part av lestrartíðini.

At lesa um, at tosa um og at grunda um ymiskar undirvísingartilgongdir og eftirmetingarhættir skuldi verið ein stórur sveipur bæði í grundlærugreinum, linjufakslestri og í námsfrøði, sálarfrøði og serlestri.[6] Tí kann tað vekja undran, at svarini í ritmynd 48 eru háttað, sum tey eru.

## 49. Hvussu stóra vitan hevði tú um hesar tættir í lærarastarvinum, tá ið tú fórst av lærarskúlanum?

| | | Sera stóra vitan | Stóra vitan | Eg visti eitt sindur | Lítla vitan | Onga vitan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 49.1 | Hvat stendur í fólkaskúlalógini | 4,9% | 27,2% | 53,1% | 14,8% | |
| 49.2 | Hvussu ein næmingalagar undirvísingina (differentiering) | 2,5% | 27,1% | 51,9% | 18,5% | |
| 49.3 | Hvussu ein eftirmetir einstaka næmingin | 1,2% | 8,6% | 43,2% | 39,5% | 7,5% |
| 49.4 | Hvussu ein eftirmetir undirvísingina í síni heild | | 15% | 48,8% | 33,8% | 2,4% |
| 49.5 | Hvussu ein ger eina ársætlan | | 8,6% | 21% | 27,2% | 43,2% |
| 49.6 | Hvussu ein nýtir KT í undirvísingini | 2,5% | 12,4% | 35,8% | 33,3% | 16% |
| 49.7 | Hvussu ein undirvísir næmingum, ið hava serligan tørv | | 2,5% | 11,1% | 33,3% | 53,1% |
| 49.8 | Hvussu ein skipar foreldrasamstarv | | 8,7% | 26,3% | 30% | 35% |
| 49.9 | Hvussu ein skipar ein foreldrafund | | 8,6% | 23,5% | 29,6% | 38,3% |
| 49.10 | Hvussu ein skipar heimaarbeiði | | 7,5% | 33,3% | 29,6% | 29,6% |
| 49.11 | Hvussu ein stýrir og fær tamarhald á einum flokki | | 17,3% | 21% | 29,6% | 32,1% |
| 49.12 | Hvussu ein leggur ein undirvísingartíma til rættis | 3,7% | 30,9% | 34,6% | 22,2% | 8,6% |

[6] Henda spurnablaðakanning varpar ikki ljós á, hvussu nógv ella lítið lesandi hava arbeitt við ymiskum undirvísingar- og eftirmetingarháttum í lestrartíðini. Spurnablaðakanningin sigur bert, hvussu stóra vitan svargevarnir hildu seg hava um nakrar úrvaldar og vælkendar undirvísingarhættir, tá ið lestrartíðin var av.

Talva 49 vísir – eins og talva 48 – at tað er sera ymiskt, hvussu stóra vitan einstøku svargevarnir hildu seg hava um grundleggjandi tættir í lærarastarvinum, tá ið teir fóru av læraraskúlanum. Tað eru svargevar, ið hildu seg hava "stóra vitan" um, hvat stendur í fólkaskúlalógini, hvussu ein skipar ein foreldrafund, hvussu ein eftirmetir einstaka næmingin osfr.. Og tað eru svargevar, ið hildu seg hava "onga" vitan um somu viðurskifti.

Samanumtikið kann tó sigast, at svargevarnir hildu seg hava alt ov lítla vitan um teir tættir, ið verða nevndir í spurningi 49. Sum dømi kann nevnast:

- At 32,1% av svargevunum siga, at teir høvdu "ongan vitan" um, hvussu ein stýrir og fær tamarhald á einum flokki.
- At 43,2% av svargevunum siga, at teir høvdu "onga vitan" um, hvussu ein ger eina ársætlan.
- 53,1% av svargevunum siga, at teir høvdu "onga vitan" um, hvussu ein undirvísir næmingum, ið hava serligan tørv.

Fleiri svargevar viðmerkja, at tær arbeiðsuppgávur, ið verða nevndar í ritmynd 49, eru tær, ið hava volt teimum mest høvuðbrýggj fyrstu árini sum lærarar.

At tosa um fólkaskúlalóg, eftirmeting, ársætlan, foreldrasamstarv, heimarbeiði osfr. skuldi verið afturvendandi temu bæði í grundlærugreinunum, linjufakslestrinum og í námsfrøði, sálarfrøði og serlestri.[7] Tað kemur tískil óvart á, at so nógvir svargevar hildu seg hava avmarkaða vitan um hesi temu og hesar tættir, tá ið lestrartíðin var av.

Nakrir svargevar, ið høvdu drúgvar undirvísingarroyndir, áðrenn teir fóru á læraraskúla, og sum arbeiddu sum vikarar í lestrartíðini, viðmerkja, at teir høvdu fingið innlit í nakrar av hesum tættum í vikartíðini.




Ritmynd 50 vísir, at 46,9% av svargevunum halda, at tað, ið teir lærdu í námsfrøði, sálarfrøði og serlestri, hevur gjørt teir til betri lærarar. *(T.e. 50% av kvinnuligu svargevunum og 43,5% av mannligu svargevunum).* Hesir svargevar síggja ivaleyst eina leinkju millum námsfrøðilig- og sálarfrøðilig ástøði og háttaløg øðrumegin, og tær uppgávur og avbjóðingar, ið teir skulu loysa í dagsins skúla, hinumegin.

[7] Eins og í talvu 48 varpar henda spurnablaðakanning ikki ljós á, hvussu nógv ella lítið lesandi hava arbeitt við ársætlan, foreldrasamstarvi, heimaarbeiði, eftirmeting og øðrum í lestrartíðini. Spurnablaðakanningin sigur bara, hvussu stóra vitan svargevarnir hildu seg hava um hesar høvuðstættir í lærarayrkinum, tá ið útbúgvingin var lokin.

21% av svargevunum halda ikki, at tað, teir lærdu í námsfrøði, sálarfrøði og serlestri hevur gjørt teir til betri undirvísarar. *(T.e. 21,7% av mannligu svargevunum og 20,7% av kvinnuligu svargevunum.)* Hesir svargevar duga ivaleyst ikki at síggja, at tað ein fekst við í námsfrøði og sálarfrøði, kann stuðla teimum, tá ið tey fyrireika, seta í verk og eftirmeta undirvísing.

32,1% av svargevunum siga seg ikki duga at meta um tað, ið teir lærdu í náms- og sálarfrøði, hevur havt ávirkan á teirra læraraførleikar í dag. *(T.e. 34,8% av mannligu svargevunum og 29,3% av kvinnuligu svargevunum.)*




Ritmynd 51 vísir, at 75% av svargevunum halda, at námsfrøði, sálarfrøði og serlestur eiga at fylla annaðhvørt "nógv meiri" ella "meiri" í undirvísingini. 23% halda, at hesar lærugreinar fyltu nóg mikið, meðan bara 1,2% halda, at hesar lærugreinar skuldu fylt "minni".

Um vit hyggja at kynsbýti, so sæst:

- At 35% av kvinnuligu svargevunum halda, at náms- og sálarfrøði skuldi fylt "nógv meira", og 42,1% halda, at hesar lærugreinar skuldu fylt "meira".
- At 13,6% av mannligu svargevunum halda, at náms- og sálarfrøði skuldi fylt "nógv meira", og 54,5% halda, at hesar lærugreinar skuldu fylt "meira".

Nakrir svargevar viðmerkja, at innihaldið í náms- og sálarfrøði skuldi verið meiri yrkisrættað, enn tað onkuntíð var.




Ritmynd 52 vísir, at 40,5% av svargevunum siga, at teirra fatan av, hvussu góð undirvísing eigur at verða skipað, broyttist annaðhvørt "nógv" ella "sera nógv" í lestrartíðini. 41,8% siga, at teirra undirvísingarfatan broyttist "eitt sindur," meðan 17,7% siga, at teirra undirvísingarfatan broyttist "lítið" ella "einki". *(T.e. 30,4% av mannligu svargevunum og 12,1% av kvinnuligu svargevunum).*

Ritmyndin vísir við øðrum orðum, hvussu "liðug" nøkur lesandi eru, tá ið tey koma á læraraskúla, og hvussu ávirkilig og broytilig onnur lesandi eru í lestrartíðini.




Ritmynd 53 vísir, at 16,3% av svargevunum siga, at teir ikki kendu seg til reiðar at fara undir læraragerningin eftir loknan lestur. 83,7% siga, at teir annaðhvørt vóru "væl og virðiliga til reiðar" ella "í ein ávísan mun til reiðar". Tað er eingin kynsmunur í spurningi 53.

Um vit hyggja at teimum, ið tóku prógv í 2011, so siga 23,6% av svargevunum, at teir kendu seg "væl og virðiliga til reiðar", 64,7% kendu seg "í ein ávísan mun til reiðar", meðan 11,7% ikki kendu seg nóg væl fyrireikað.

Um vit hyggja at teimum, ið hvørki høvdu undirvísingarroyndir, áðrenn tey byrjaði á Føroya læraraskúla ella undirvístu í fólkaskúlanum í lestrartíðini, so siga 14,8%, at tey kendu seg "væl og virðiliga" til reiðar til læraragerningin; 55,6% siga, at tey "í ein ávísan mun" kendu seg til reiðar, meðan 29,6% siga, at tey ikki kendu seg nóg væl tilbúgvin.

Sjálvt um munurin ikki er áberandi stórur, so sæst, at ein partur av teimum, ið ikki høvdu aðrar starvsroyndir enn starvslæruna, kendu seg á ótryggari grund, tá ið tey byrjaðu í starvi.




Ritmynd 54 vísir, at svargevarnir eru samdir í, at tað er hvørki "stórt samband" ella "einki samband" millum tað, ein lærir á læraraskúlanum, og tær uppgávur, ein skal loysa í fólkaskúlanum.

Svargevarnir halda við øðrum orðum at tað, ein fæst við og lærir á læraraskúlanum, stundum er viðkomandi fyri lærarayrkið og stundum er óviðkomandi fyri lærarayrkið. Læraraskúlin er við øðrum orðum ein diskursur í samfelagnum, meðan fólkaskúlin er ein annar diskursur. Og sjálvt um endamálið við læraraskúlanum er at búgva tey lesandi til lærarayrkið, so kann ein ikki treytaleyst og beinleiðis taka tann lærdómin við sær, ið ein ognaði sær á læraraskúlanum, og nýta hann ókritiskt í fólkaskúlanum.

Tað er sostatt munur á at verða undirvístur og at undirvísa sjálvur. Tað er munur á at verða eftirmettur og at skula eftirmeta sjálvur. Tað er munur á at lesa um og føra prógv fyri, hvussu ein skal undirvísa næmingum og flokkum og at fremja hetta í verki. Tað er munur á at sita aftanfyri pultin og at sita frammanfyri pultin. Osfr..

Um vit hyggja at teimum svargevum, ið ongar undirvísingarroyndir høvdu – hvørki fyri lestrartíðina ella í lestrartíðini – so siga 59,3%, at tað er "ávíst samband" millum tað, teir lærdu á læraraskúlanum og tær starvsuppgávur, teir skulu loysa í fólkaskúlanum í dag. 37% siga, at tað er "lítið samband", meðan 3,7% siga, at tað er einki samband.

Hesi prosenttøl vísa, at tað hevur verið trupult at gera Føroya læraraskúla til eitt "simulerandi" umhvørvi, ið skal endurspegla veruligt læraralív, og har lesandi kunnu arbeiða við ítøkiligum lærarauppgávum.[8]

## 55. Hvørji evni, temu og uppgávur eiga at fylla enn meiri í læraraútbúgvingini?

Spurningur 55 er ein opin spurningur. Tá ið svarini verða greidd og greinað, eru tað 10 høvuðsevni, ið ganga aftur.

1. AT ARBEIÐA VIÐ SÍNI EGNU LÆRARAATFERÐ ELLA SÍNUM EGNA LÆRARASTÍLI:
Svargevarnir vísa á, at fakliga lærdu teir nógv á Føroya læraraskúla, men teirra førleikar at undirvísa øðrum vórðu ov lítið mentir tey fýra lestrarárini.

Svargevarnir hava ynski um:

- At starvslæran verður øðrvísi skipað. At hon hevur eitt greitt endamál, og at tað verður ein natúrlig progressión frá ári til árs.
- At lesandi fara í starvslæru einsamøll. *(At lesandi fara í starvslæru í bólki og býta ábyrgdina og uppgávurnar sína millum er ein kunsturlig støða, sum minnir ov lítið um veruligt læraralív.)*
- At lærarar á Føroya læraraskúla fylgja nógv neyvari við, hvussu tað gongst tí einstaka lesandi í starvslærutíðini. Svargevarnir siga, at tað besta hevði verið, um lærarar á læraraskúlanum komu á starvslæruvitjan fleiri ferðir at eygleiða, hvussu tann einstaki lesandi skipar sína undirvísing og førir seg fram í flokshølinum. Ein svargevi sigur: *"Classroom management eigur at vera høvuðsyvirskriftin í øllum tí, ein arbeiðir við á læraraskúlanum".*
- At tann einstaki lesandi støðugt fær sín undirvísingarførleika eftirmettan av lærarum á læraraskúlanum og starvslærarum. Henda eftirmeting ella afturboðan skal verða ærlig, opin og konstruktiv.
- At lesandi á læraraskúlanum nýta nógv meiri tíð at undirvísa floksfeløgum sínum í lestrartíðini. Lesandi skulu ikki bara hava munnligar framløgur, har teir leggja ymisk ástøði fram. Nei, lesandi skulu undirvísa í ítøkiligum 1., 3., 5., 7., og 9. floks pensum í eini ávísari lærugrein.
- At lesandi støðugt menna sínar retorisku førleikar og sítt dirvi at stíga fram. Raddarvenjing, framburður, tónalega, kropsburður, handakeipur, hvussu ein ferðast í flokshølinum, hvussu ein staðsetur seg í flokshølinum osfr..

[8]Ein donsk granskingarverkætlan vísir, at 33% av nýútbúnum donskum lærarum siga, at læraraútbúgvingin hevur lítið samband við arbeiðið hjá einum fólkaskúlalærara. 11% av nýútbúnum pedagogum hava sama sjónarmið um sambandið millum pedagogútbúgvingina og arbeiðið hjá einum pedagogi. (Bayer & Brinkløv, 2003) Tað eru tó ikki bara læraralesandi, ið halda, at sambandið millum útbúgvingina og yrkið er ov veikt. Ein donsk kanning, ið varð framd millum fólk, ið vóru liðug við eina cand. scient útbúgving í tíðarskeiðnum 2005-2010, vísti, at meiri enn helmingurin helt ikki, at útbúgvingin hevði fyrireikað tey serliga væl til arbeiðslívið, og at tað var lítið samband millum innihaldið í útbúgvingini og tað arbeiðið, tey høvdu í dag. (Ejlertsen, 2011)

Niðurstøðan er, at lesandi undirvístu ov lítið og vistu ov lítið um, hvat eyðkendi teirra medferð sum undirvísarar, meðan tey gingu á læraraskúla.

2. GERANDISDAGURIN Í FÓLKASKÚLANUM:
Svargevarnir vísa á, at fjarstøðan millum læraraskúlan og fólkaskúlan til tíðir kann tykjast dekan ov stór. Teir halda, at á læraraskúlanum eigur ein at nýta meiri orku og tíð at skilja fólkaskúlan sum arbeiðspláss og tann logikk, sum ræður innanskúla.

Tey trý fokusøkini, ið svargevarnir halda eiga at fylla meiri í lestrartíðini, eru:

- Rútman í fólkaskúlanum: Dagurin, tímin, fríkvarterið, mannagongdir, skrivaðar og óskrivaðar reglur. Osfr..
- Praktiskar uppgávur í fólkaskúlanum: Kopimaskina, skannari, telda, samvirkin talva, at bíleggja bøkur, at røkja eitt savn, at hava garðvakt. Osfr..
- Fakligar og didaktiskar uppgávur í fólkaskúlanum: Hvat ger ein í ymisku lærugreinunum í grunddeild, miðdeild og hádeild? – Ein svargevi skrivar: *"Eg kundi hugsað mær, at vit t.d. kannaðu, hvussu ein undirvísir í lívfrøði í 8. flokki. Hvat tilfar nýtir lærarin? Hvussu ger flokkurin royndir í lívfrøðihølinum og úti í náttúruni?"* Ein annar skrivar: *"Á læraraskúlanum eigur ein heilt ítøkiliga at arbeiða við byrjanarlesing og byrjanarrokning"*.

Svargevarnir siga, at tað er týdningarmikið, at lærarar á læraraskúlanum hava stóra vitan um, hvat hendir í fólkaskúlanum sum heild, og hvat hendir í teimum lærugreinum, teir sjálvir vara av. Um lærarar á Føroya læraraskúla ikki hava hetta innlit, so verður trupult at finna koplingina ella sambindingina millum teori og praksiss.

3. LÆRARIN OG HANSARA SAMSTARVS- ELLA SAMSKIFTISFELAGAR
Svargevarnir vísa á, at á læraraskúlanum eigur ein at arbeiða við:

- Foreldrasamstarvi: Heimaarbeiði, kunning, loggbók, hvussu ein skipar felags foreldrafundir, hvussu ein skipar foreldraviðtalur, hvussu ein fær eitt opið samskifti við foreldrini, hvussu ein tosar við foreldur um truplar og viðkvæmar spurningar, hvussu ein handfer trupul foreldur og/ella foreldur, ið hava trupulleikar. Osfr..
- Toymissamstarv: At finna sín leiklut í toyminum. At siga sína meining í toyminum. At skula samstarva við starvsfelagar, ið bæði persónliga og didaktiskt eru nógv øðrvísi enn ein sjálvur.
- At samstarva við leiðsluna: Hvat kann ein vænta sær av leiðsluni? Hvat kann ein nýta leiðsluna til?
- At samstarva við sosialu myndugleikarnar: Barnaverndarstovan, barnaverndartænastur, Sernám, sálarfrøðingar. - Í hesum sambandi verður tagnarskyldan og fráboðanarskyldan drigin fram av fleiri svargevum.

4. NÚTÍÐARNÆMINGURIN

Svargevar siga, at á læraraskúlanum eigur ein at nýta nógva tíð at seta seg inn í, hvat eyðkennir nútíðarnæmingin og tað lív, hann livir uttanskúla.

- Undirvísingin í sálarfrøði eigur at vera meiri spesifikk. Lesandi skulu ikki nýta ov nógva tíð at lesa um pinkubørn og børn í barnagarðsaldri. Tey skulu serliga fáast við børn í skúlaaldri. Tey skulu serliga fáa vitan um, hvat eyðkennir menningina og kognitivu førleikarnar hjá næmingum í grunddeild, miðdeild og hádeild. Hvat eyðkennir tannáringin og tannáringalív? Osfr..
- Undirvísingin í sálarfrøði, pedagogikki og serlestri eigur serliga at snúgva seg um, hvussu ein motiverar og hugfangar nútíðarbarnið. Hvussu tú skapar eina undirvísing, ið tekur støði í teirra gerandisdegi og kennist innihaldsrík í teirra verð. Ein svargevi spyr: *"Hvussu undirvísi eg nútíðarnæminginum, ið sum heild ikki hevur hug at læra meiri enn 5 – 10 min. í senn?"*

5. UNDIRVÍSINGARHÆTTIR

Svargevarnir siga, at lesandi á Føroya læraraskúla eiga at nýta nógv meiri tíð at seta seg inn í ymiskar undirvísingarhættir og tilgongdir.

Svargevarnir vísa á:

- At tað er ikki nóg mikið at lesa um og hoyra um ymiskar undirvísingarhættir. Ein partur av undirvísingini á læraraskúlanum eigur at verða skipaður sum evnisarbeiði, verkstaðararbeiði, søgutráður osfr., soleiðis at lesandi sleppa at royna hesar undirvísingarhættir á egnum kroppi. Harumframt eiga lesandi at sleppa at undirvísa næmingum í fólkaskúlanum í hesum somu undirvísingarhættum.
- At undirvísing í ymiskum undirvísingarhættum skal ikki bara vera tengd at námsfrøði, sálarfrøði og serlestri, men eigur at fáa rúm í øllum linjufakum. Ein svargevi skrivar: *"Eg kundi hugsað mær at fingið vitan um, hvussu eg kann nýta søgutráð í føroyskttímanum".*
- At tá ið lærarar á læraraskúlanum undirvísa í undirvísingarhættum, so eiga teir at leggja upp fyri flokkstigi. Ein svargevi skrivar: *"Verkstaðararbeiði í 4. flokki, 7. flokki og 9. flokki er ikki heilt tað sama".*

6. UNDIRVÍSINGARTILFAR

Svargevar vísa á, at ein lutfalsliga stórur sveipur í bæði grundlærugreinum og linjufakslestri eigur at snúgva seg um undirvísingartilfar.

- Hvat tilfar er til at taka?
- Hvat tilfar er gott, og hvat tilfar hevur sjónligar veikleikar?
- Hvat tilfar er tíðarhóskandi, og hvat tilfar eru ótíðarhóskandi?
- Hvat tilfar er motiverandi og hugkveikjandi?
- Hvat tilfar nýta føroyskir lærarar?
- Hvat tilfar finst á føroyskum?
- Hvar fær ein fatur á tilfari?
- Hvussu kann ein seta sítt egna tilfar saman?

<u>7. ÁRSÆTLANIN</u>
Svargevarnir siga, at tað hevði verið gagnligt, um teir í lestrartíðini kundu nærlisið fyrimyndarligar ársætlanir í ymiskum lærugreinum og á ymiskum floksstigi og sjálvir roynt at orða eina ársætlan. Ein svargevi skrivar: *"At lært at gjørt ársætlanir átti at verið sjálvsagdur partur av tí virksemi, ið er á einum læraraskúla"*.

- Nýggju námsætlanirnar, ið vórðu settar í gildi í 2011, eiga at verða náttúrligur partur í grundlærugreinunum og í linjufakslestrinum.

<u>8. EFTIRMETING</u>
Svargevarnir halda, at á læraraskúlanum eiga lesandi at læra at eftirmeta avrikið hjá næmingum í ymiskum lærugreinum og á ymiskum floksstigi.

Lesandi skulu læra:

- At meta um skrivlig og munnlig avrik.
- At geva skrivliga og munnliga afturmelding og viðmerkingar.
- At geva ársmet.
- At fyrireika eina próvtøku.
- At geva próvtal fyri próvtøkuavrik.
- At eftirmeta egna undirvísing.

Svargevarnir vísa á, at evnini "eftirmeting" og "ársætlan" eiga at verða tengd hvørt at øðrum. Ársætlanin sigur, hvat endamálið er við undirvísingini, hvat ein ætlar at náa og hvussu. Eftirmetingin vísir, hvat kom burturúr, og hvat næmingarnir lærdu. Ársætlanin og eftirmetingin eru tískil ramman um didaktiska virksemið í fólkaskúlanum og eiga at fylla nógv meiri í læraraútbúgvingini.

<u>9. NÆMINGAR VIÐ SERLIGUM TØRVI</u>
Ein stórur meiriluti av svargevunum sigur, at førleikin at undirvísa næmingum, ið hava serligan tørv, eigur at verða munandi styrktur í lestrartíðini.

Evni og temu, ið svargevarnir vilja hava á skránna í læraraútbúgvingini, eru:

- <u>Diagnosan.</u> Hvat kann einum næmingi feila? Hvørji tekin skal lærarin vera kunnugur við? Tekin um mistrivnað. Tekin um avvíkjandi atburð? Tekin um lesi- og roknitrupulleikar. Osfr..
- <u>Næmingar við serligum tørvi og vanlig undirvísing:</u> Hvussu kann lærarin skipa sína undirvísing soleiðis, at næmingar við serligum tørvi fáa sum mest burturúr? – Tilfar, undirvísingartilgongdir, vegleiðing, samskifti, at innrætta stovuna. Osfr..
- <u>Tørv á serkunnleika:</u> Hvar kann lærarin søkja sær vegleiðing, tá ið tørvur er á sernámsfrøðiligari ráðgeving? – Leiðsla, foreldur, starvsfelagar, ið hava serliga útbúgving, Sernám. Osfr..
- <u>Vansorgan – m.a. illgruni um kynsligan ágang:</u> – Í hesum sambandi verða tagnarskyldan- og fráboðanarskyldan nevndar.
- <u>Serundirvísing og einstaka lærugreinin:</u> Svargevar vísa á, at sernámsfrøði skuldi annaðhvørt verið eitt linjufak á Føroya læraraskúla ella ein náttúrligur partur av øllum linjufakslestri. T.d. í føroyskum og støddfrøði.

Svargevar vísa somuleiðis á, at lærarar stundum kunnu undirvísa næmingum, ið tilvitaðir royna at forða og spilla undirvísingina. Evni og temu, ið svargevarnir vilja hava á skránna í læraraútbúgvingini eru í hesum sambandi:

- Hvussu nógv skal ein lærari finna seg í? Hvørji rættindi hevur lærarin? Hvørjar møguleikar hevur lærarin? Hvørjar mannagongdir eru galdandi?

Nakrir svargevar halda, at ein partur av undirvísingini á Føroya læraraskúla skuldi verið skipaður sum "case-undirvísing". T.e. at lesandi ein part av tíðini skulu fáa møguleika at arbeiða við hugsaðum dømum úr fólkaskúlanum, ið tey skulu greiða, greina og royna at loysa á ein virðiligan hátt. Dømi um casir, ið verða nevndar, eru: *"Drongurin, ið hevur ADHD", "Gentan, ið er kynsliga misnýtt", "Næmingurin, ið onga virðing hevur fyri tær sum lærara, og sum oyðileggur allan tíman".*

10. KT Í UNDIRVÍSINGINI

Fleiri svargevar vísa á, at KT sum undirvísingarامboð eigur at fylla nógv meiri á læraraskúlanum, enn tað hevur gjørt.

Tað er tó eyðsæð, at KT førleikin er sera ymiskur frá einum svargeva til ein annan.

- Nakrir svargevar tosa um, at lesandi hava tørv á einum grundskeiði í, hvussu ein fær telduna og samvirknu talvuna at virka. Her er talan um eitt "tendra og sløkk-skeið".
- Aðrir svargevar tosa um, at lesandi hava tørv á at læra, hvussu ein kann nýta KT og nýmótans tøkni til at gera torgreidd undirvísingartemu meiri ítøkilig og einføld. Svargevarnir tosa um, hvussu ein kann nýta KT til at næmingalaga undirvísingina, at hugfanga næmingarnar, at gera næmingarnar meiri virknar. Osfr..

Víst verður á, at á læraraskúlanum skulu lærararnir vera undangongufólk. Í øllum lærugreinum – bæði grundlærugreinum og í linjufakslestrinum - eigur KT og djúphugsan um, hvussu KT kann nýtast í einstøku lærugreinunum at verða ein náturligur partur.

# Kap. 6

# Fyrsta árið sum lærari




Ritmynd 56 vísir, at 86,4% av svargevunum søktu starv sama ár, sum teir vóru liðugir. *(T.e. 82,6% av mannligu svargevunum og 87,7% av kvinnuligu svargevunum).*




Ritmynd 57 vísir, at 97% av svargevunum, ið søktu starv í tíðarskeiðnum frá 2007 til 2011, fingu starv beinavegin. Hetta er fyrst og fremst tekin um ta leinkju, ið hevur verið og framvegis er millum Føroya læraraskúla og føroyska fólkaskúlan. Føroya læraraskúli býr fólk til føroyska fólkaskúlan og útvegar harvið fólkaskúlanum støðuga arbeiðsmegi. Og fólkaskúlin tekur trúliga ímóti.

Ritmynd 57 er ivaleyst eisini tekin um, at tað ikki hevur verið arbeiðsloysi millum føroyskar lærarar í tíðarskeiðnum 2007 til 2011, og at talið av lærarum, ið eru farnir frá vegna aldur og talið av nýútbúnum lærarum, hevur samhóskað í hesum tíðarskeiði.




Ritmynd 58 vísir, at svargevarnir sum heild kendu seg sera væl móttiknar av skúlans leiðslu, starvsfeløgum, næmingum og foreldrum.

Tølini lýsa skúlan sum arbeiðspláss og tað huglag, ið er innanskúla.

Tað eru tó nøkur heilt fá, ið ikki hava kent seg so væl móttikin.




Ritmynd 59 vísir, at 42,3% av svargevunum fingu ein kontaktpersón fyrstu tíðina, ið teir kundu spyrja til ráðs, meðan 57,7% av svargevunum ikki høvdu nakran ávísan persón at venda sær til.

Støddin á skúlanum sær ikki út til at ávirka, um skúlin hevur eina kontaktlæraraskipan ella ei.

Henda spurnablaðakanning sigur einki um, hvussu sambandið og samskiftið millum nýútbúna læraran og kontaktpersónin er skipað, og um leisturin er hin sami frá skúla til skúla.




Ritmynd 60 vísir, at 95% av svargevunum halda, at nýútbúnir lærarar hava tørv á at hava ein kontaktlærara, ið hevur til uppgávu at leiðbeina teir, og sum teir kunnu spyrja til ráðs.

Hetta úrslitið er ivaleyst tekin um, at teir svargevar, ið ikki høvdu ein ávísan kontaktpersón fyrsta árið, hava saknað at hava onkran at venda sær til og at práta við um stórt og smátt – um órógv og ivamál, um kopimaskinur og samvirknar talvur, prentarar og skannarar, um smáar ósigrar og stórar sigrar. Osfr..




Ritmynd 61 sigur einki um tað ítøkiliga samskiftið, ið hevur verið millum tann einstaka svargevan og skúlans leiðslu, tá ið skemaið var lagt. Vit vita tískil ikki, um hetta samskiftið hevur snúð seg um lærugreinabýti, floksstig, tímatal, tímatalvu o.a.. Hetta verður ikki upplýst í spurnablaðnum. Men ritmynd 61 vísir, at 52,6% av svargevunum

siga, at teir vóru tiknir við uppá ráð, tá ið skemaið var lagt, meðan 47,4% av svargevunum siga seg ikki verða spurdar eftir.

Um vit hyggja at kynsbýti, so siga 61,9% av monnunum, at teir vóru tiknir við uppá ráð, tá ið skemaið var lagt, meðan 49,1% av kvinnunum siga, at tær vórðu tiknar við upp á ráð. *(Smb. ritmynd 9, ið vísir, at nýútbúnir mannligir lærarar í størri mun enn nýútbúnir kvinnuligir lærarar kenna á sær, at teir verða settir í starv, tí teir hava ein ávísan linjufaksprofil).*




Ritmynd 62 er ikki ein partleys mynd, ið sigur, um nýútbúnir lærarar fáa "góð" ella "strævin" skemu fyrsta árið, teir undirvísa. Ritmyndin sigur harafturímóti, um svargevarnir hava uppfatað síni fyrstu skúlaskemu sum "góð" ella "strævin". Og tað er ein onnur søk.

Ritmynd 62 vísir, at 80,7% av svargevunum siga, at teir fingu annaðhvørt "eitt sera gott skema" ella "eitt lutfalsliga gott skema". At so nógvir svargevar halda, at teir fingu eitt gott skema fyrsta árið, kvinkar og vikar ta íspunnu søgu, ið sigur, at nýútbúnir lærarar altíð fáa strævin skemu og strævnar flokkar. At teir verða settir á ein uriaspost osfr..[9]

16,6% av mannligu svargevunum og 21,8% av kvinnuligu svargevunum siga tó, at tey fingu annaðhvørt eitt "strævið skema" ella eitt "sera strævið skema".

Nærlesur ein einstøku spurnabløðini, so sæst, at tað er greitt samband millum at hava eitt strævið skema og at mistrívast í starvinum. (Smb. sp. 77)

[9]Skúlagranskarar aðrastaðnis vísa á, at nýútbúnir lærarar stundum fáa truplar tímatalvur og truplar flokkar, ið eingin annar lærari vil hava. (Fibæk-Laursen & Bjerresgaard, 2009: 236)




Ritmynd 63 vísir, at 71,3% av svargevunum siga, at tað hevði verið "nógv truplari" ella "truplari" at byrja sum lærari, um teir ongantíð høvdu verið í starvslæru. *(T.e. 68,2% av mannligu svargevunum og 72,4% av kvinnuligu svargevunum).* 17,5% av svargevunum halda ikki, at starvslærutíðin hevur gjørt mun í so máta. *(T.e. 22,7% av mannligu svargevunum og 15,5% av kvinnuligu svargevunum).*

Um vit hyggja nærri at teimum, ið ikki halda, at starvslærutíðin hevur gjørt tað lættari at byrja sum lærari, so høvdu 85,7% av teimum annaðhvørt undirvísingarroyndir, áðrenn tey byrjaðu á læraraskúla ella arbeiddu sum vikarar í lestrartíðini. T.e. at tey onkursvegna kendu fólkaskúladiskursin frammanundan, og tí gjørdist starvslæran bara ein viðfáningur.

Um vit hyggja at teimum, ið hvørki høvdu undirvísingarroyndir, áðrenn tey fóru á læraraskúla ella arbeiddu í starvslærutíðini, so siga 92,9%, at tað hevði annaðhvørt verið "nógv truplari" ella "truplari" at byrja sum lærari, um tey ongantíð høvdu verið í starvslæru.

Hetta vísir, hvussu týdningarmikil starvslæran er fyri tey lesandi, ið ikki hava annað samband við fólkaskúlan enn starvslæruna.




Ritmynd 63 vísir, at tað er sera ymiskt, hvussu stóran part av samlaðu undirvísingartíðini, ið svargevarnir undirvístu í sínum linjufakum fyrsta undirvísingarárið.

- 6,4% av svargevunum siga seg hava undirvíst 100% í sínum linjufakum.
- 14,3% siga seg hava undirvíst millum 0-24% í sínum linjufakum.

Størsti parturin hevur tó undirvíst helmingin ella gott og væl helmingin av tíðini í sínum linjufakum.




Ritmynd 65 vísir, at tað er sera ymiskt, hvussu nógvum lærugreinum einstaki svargevin undirvísti í fyrsta árið. Onkur undirvísti í einari lærugrein, meðan onkur annar undirvísti í átta lærugreinum.

Meirilutin (t.e. 51,9%) undirvísti tó annaðhvørt í fýra ella fimm lærugreinum.

Hvussu nógvum lærugreinum ein undirvísir í er í stóran mun treytað av, um tær lærugreinir, ein undirvísir í, eru stórar ella smáar lærugreinar í fólkaskúlanum.




Ritmynd 66 vísir, at tað er sera ymiskt, hvussu nógvum flokkum, einstaki svargevin undirvísti fyrsta árið. Onkur undirvísti einum flokki, meðan onkur annar undirvísti átta ella níggju flokkum.

Meirilutin (t.e. 56,4%) undirvísti annaðhvørt trimum, fýra ella fimm flokkum. Siga vit, at tað ganga í miðal 20 næmingar í hvørjum flokki, so skal hvør einstakur nýútbúgvin lærari undirvísa millum 60 og 100 ymiskum næmingum fyrsta árið.




Ritmynd 67 vísir, at tað er ymiskt, hvussu nógvum ymiskum árgangum svargevarnir undirvístu fyrsta árið.

Helmingurin undirvísir annaðhvørt trimum ella fýra árgangum.

Í ritmynd 67 er tað tó merkisvert, at sætti hvør svargevi sigur, at hann undirvísti 7 árgangum fyrsta undirvísingarárið. Eitt er at undirvísa í nógvum ymiskum flokkum og í nógvum lærugreinum, men at skula laga undirvísingina til 7 ymisk floksstig, má hava verið ein stórur fakligur og didaktiskur biti at gloypa hjá einum nýútbúnum lærara.




Ritmynd 68 vísir, at 24,4% av svargevunum undirvístu "meiri enn fulla tíð" fyrsta undirvísingarárið, 55,2% undirvístu "fulla tíð", 12,8% undirvístu " umleið ¾ tíð" og 7,6% undirvístu "½ tíð" ella "minni enn ½ tíð".[10]

Um hugt verður at kynsbýti, so sæst, at 33,3% av mannligu svargevunum undirvístu "meiri enn fulla tíð", meðan 66,7% undirvístu "fulla tíð".

21,4% av kvinnuligu svargevunum undirvístu "meiri enn fulla tíð", 51,8% undirvístu "fulla tíð", 17,9% undirvístu "¾ tíð", meðan 8,9% undirvístu annaðhvørt "½ tíð" ella "minni enn ½ tíð".

Við øðrum orðum hevði fjórða hvør nýútbúgvin kvinna ikki fult undirvísingarskema. Um hetta hevur verið eftir egnum ynski, sigur henda spurnablaðakanning einki um.

---

[10] Seinnu árini hevur í nøkrum londum staðið nýútbúnum lærarum í boði serlig innleiðsluskeið og serligar innleiðsluskipanir. Hetta er eisini galdandi í nøkrum kommunum í Danmark. (Fibæk-Laursen & Bjerresgaard, 2009: 233) Í Noregi eru nýútbúnir lærarar knýttir at læraraskúlanum fyrsta undirvísingarárið. Teir fáa ein mentor á nýggja arbeiðsplássinum. Teir hava somuleiðis ein lektara á læraraskúlanum knýttan at sær, sum kemur út á skúlan at vitja nýútbúna læraran gjøgnum árið. Og harumframt koma nýútbúnir lærarar á læraraskúlan nakrar ferðir um árið til styttri skeið. Í Skotlandi arbeiða nýútbúnir lærarar bara 70% av fullari tíð, men teir fáa fulla løn. Restina av tíðini skulu teir "læra seg at vera lærarar". (Ramberg, 2011)




Ritmynd 69 vísir, at 11,4% av svargevunum undirvístu fyrsta árið "í fleiri lærugreinum", ið teimum ikki hóvaði, og at 32,9% undirvístu í "einstøkum lærugreinum", ið teimum ikki hóvaði.

Tað er eingin sjónligur kynsmunur í hesum spurningi.




Ritmynd 70 vísir, at tað eru ymiskar lærugreinar, ið nýútbúnum lærarum ikki hóvar at undirvísa í. Tær lærugreinar, ið flestu svargevar vísa á, eru N&T, kristni, landalæra og danskt.

Orsøkirnar til at svargevum ikki líkar at undirvísa í eini lærugrein, kunnu vera ymiskar. Men bæði í N&T og kristni vísa svargevar á, at tað er trupult at finna gott undirvísingartilfar. *(Í kristni verður tilfar til 8. flokk nevnt av fleiri svargevum).*




Ritmynd 71 vísir, at 40,3% av øllum nýútbúnum lærarum undirvístu fyrsta árið í "einstøkum skúlafakum", har teir ikki kendu seg fakliga nóg stinnar, og at 9,1% undirvístu í "fleiri skúlafakum", har teir ikki kendu seg fakliga nóg stinnar.

Hetta eru lutfalsliga stór prosenttøl. Um tølini eru røtt, so er hetta ein óheppin støða bæði fyri einstaka læraran og teir næmingar, hann varar av. Men tølini kunnu eins væl vera tekin um, at nýútbúnir lærarar eru rættuliga sjálvatfinningarsamir. T.e. at teir seta høg krøv til fakliga førningin hjá einum lærara, og at teir ikki halda, at teir í øllum lærugreinum megnaðu at liva upp til hesi krøv fyrsta undirvísingarárið.

Í viðmerkingunum skriva fleiri svargevar, at fyrsta árið nýttu teir nógva tíð og orku at seta seg inn í lærugreinar og at fyrireika undirvísing í lærugreinum, har teirra fakliga kjølfesti var ivasamt.




*Stuðul, stuðulstímar, serundirvísing, lesivegleiðing o.a. var ikki ein svarmøguleiki í spurnablaðnum. Men fleiri svargevar viðmerkja, at teir fingu stuðulstímar á skemaið fyrsta árið, og at teir ikki kendu seg fakliga skikkaðar at fáa nakað munagott burtur úr hesum tímum.

Tá ið ein lesur ritmynd 72 er týdningarmikið at minnast til, at allir svargevarnir ikki undirvístu í øllum lærugreinum fyrsta árið. Hetta er orsøkin til, at tølini eru lutfalsliga smá. Tað er tó eyðsæð, at lærugreinar sum landalæra, kristni, danskt og N&T eru lærugreinar, ið nýútbúnir lærarar ofta tíma illa at undirvísa í, og har teir ofta ikki kenna seg fakliga nóg stinnar.

Landalæra og N&T eru ikki grundlærugreinar á Føroya læraraskúla, og hetta er ivaleyst orsøkin til, at nýútbúnir lærarar halda tað vera trupult at undirvísa í hesum lærugreinum.

N&T er í eini serstøðu, tí fakið hevur ongantíð verið útbjóðað sum grund- ella linjulærugrein í Føroyum. Fakið er tó sett saman av alis- og evnafrøði, lívfrøði og landalæru, soleiðis at lærarar, ið hava havt onkra av hesum lærugreinum sum linjufak, ofta undirvísa í N&T.

Landalæra er linjufak á Føroya læraraskúla, men tað eru lutfalsliga fá lesandi, ið velja hetta linjufak, og sum sostatt hava serkunnleika á økinum.

Øðrvísi er statt við kristni og donskum. Allir svargevarnir hava bæði havt kristni og danskt sum grundlærugreinar á Føroya læraraskúla, og tí kann ein undrast á, at lærarar halda, at teirra fakligi førningur er ivasamur í júst hesum lærugreinum.

Tað eru bert 4,9% av øllum svargevunum (t.e. 4 av 81), ið boða frá, at teir hvørki tímdu ella kendu seg fakliga nóg stinnar at undirvísa í einari lærugrein, ið teir hava havt sum linjufak á Føroya læraraskúla. Allir hinir svargevarnir vísa á lærugreinar, ið teir ikki hava havt sum linjufak.




Ritmynd 72 vísir, at tað er ymiskt, hvussu stóran part av tí, ið svargevarnir arbeiddu við á læraraskúlanum, ið teir nýttu fyrsta árið sum lærarar. 38,5% nýttu annaðhvørt "ein stóran part" ella "ein part". 41% nýttu "okkurt". Meðan 20,5% nýttu millum "lítið og einki".

Ein kann tí siga, at tað tú arbeiðir við á læraraskúlanum, kanst tú ikki beinleiðis og ókritiskt taka við tær og nýta í fólkaskúlanum. "Copy/paste-skipan" dugir í flestu førum ikki. Á læraraskúlanum ogna tey lesandi sær harafturímóti nakrar fakligar og didaktiskar førleikar, ið skulu mynda teirra professionella samleika og gera tey før fyri at fyrireika og gjøgnumføra undirvísing í ymiskum lærugreinum, á ymiskum floksstigum, í ymiskum flokkum og í ymiskum skúlum.




Ritmynd 74 vísir, at einans 9% av svargevunum siga, at teir høvdu "stóran vitan" um lærubøkur og lærubókaskipanir í ymiskum lærugreinum og á ymiskum floksstigum, tá ið teir byrjaðu sum lærarar.

Tá ið hugsað verður um, hvønn leiklut lærubókin hevur havt og framvegis hevur í fólkaskúlanum, so kann tað sýnast sjáldsamt, at 35,9% av svargevunum siga seg annaðhvørt hava "lítla vitan" ella "onga vitan" um lærubókaskipanir, tá ið teir fingu handað prógv.

Tað kann hugsast, at svargevarnir hava stóra vitan um lærubøkur og lærubókaskipanir í sínum linjufakum. Og at tað er orðingin "sum heild", ið er atvoldin til laka úrslitið.




Ritmynd 75 vísir, at tað er sera ymiskt, hvussu svargevarnir hava upplivað fyrstu tíðina sum lærarar. Størsti parturin (t.e. 70,5%) sigur seg ongantíð hava hugsað um at gevast fyrsta árið. 19,2% siga, at tankin "onkuntíð" rakti ein. Meðan 10,3% siga, at teir "ofta" hugsaðu um at gevast.

Fimti hvør maður og tólvta hvør kvinna hugsaðu "ofta" um at gevast fyrsta árið.

Henda spurnablaðakanning sigur einki um, hví mannligu svargevarnir høvdu truplari við at falla til.

Um vit hyggja at teimum, ið tóku prógv í 2011, og sum hava sítt fyrsta undirvísingarár klárast í minninum, so siga 16,7%, at tey "ofta" hugsaðu um at gevast fyrsta árið, 16,7% siga, at tey "onkuntíð" hugsaðu um at gevast, meðan 66,6% siga, at tey "ongantíð" hugsaðu um at gevast.

Um hugt verður at teimum, ið ongantíð høvdu undirvíst – hvørki áðrenn lestrartíðina ella í lestrartíðini - so siga 7,7%, at tey "ofta" hugsaðu um at gevast, 23,1% siga, at tey "onkuntíð" hugsaðu um at gevast, meðan 69,2% siga, at tey "ongantíð" hugsaðu um at gevast.

Verða hesi prosenttøl samanborin við ritmynd 75, so kann ein siga, at yrkishvøkkurin ikki rakar nýútbúnar lærarar, ið ikki hava undirvísingarroyndir frammanundan, harðari enn onnur.




Ritmynd 76 vísir, at 60,3% av svargevunum siga, at teir "ongantíð" hugsaðu, at teir høvdu valt skeiva yrkisleið. 7,7% siga, at teir "ofta" høvdu henda tankan. 32% siga, at tankin onkuntíð kom til ein.

Tey 32%, ið siga, at tey vóru ivingarsom fyrsta undirvísingarárið, eru áhugaverd. Ivin kann vera yrkisliga treytaður. *("Eg kundi hugsað mær at gjørt okkurt annað.")* Ivin kann eisini vera eitt tíðartekin, har lærarafólk, eins og onnur menniskju, støðugt gruna um sína egnu lívs- og yrkisleið og javnan seta spurnartekin við, um tey eru á rættari leið.

Tað er eingin kynsmunur í spurningi 76. Men hyggur ein at starvsaldri, so siga 50% av teimum, ið tóku prógv í 2011, at tey annaðhvørt "ofta" ella "onkuntíð" hava ivast í, um tey hava valt rætta yrkisleið.

Um vit hyggja at teimum, ið ongar undirvísingarroyndir høvdu – hvørki áðrenn tey fóru undir útbúgving ella í útbúgvingartíðarskeiðnum – so siga 7,7%, at tey "ofta" hugsaðu, at tey høvdu valt skeiva yrkisleið. 30,8% siga, at tey "onkuntíð" vóru ivasom, meðan 61,5% siga, at tey "ongantíð" vóru í iva.

Verða hesi prosenttøl samanborin við ritmynd 76, so sæst, at svargevar, ið ongantíð høvdu verið á lønarlistanum á einum fólkaskúla, áðrenn teir fingu prógv, falla eins væl til og teir svargevar, ið høvdu undirvísingarroyndir frammanundan.




Ritmynd 77 vísir, at 87% av svargevunum undirvístu alt tað fyrsta skúlaárið. 9,1% vóru burtur í longri tíðarskeið. *(Størsti parturin eru kvinnur, ið eru í barnsburðarfarloyvi).* Og 3,9% vóru annaðhvørt "burtur í styttri tíðarskeið" ella "góvust", áðrenn skúlaárið var lokið.

Um vit lata hagtølini tala, so kann ein siga, at yrkishvøkkurin ikki sýnist at raka ella ávirka nýútbúnar føroyskar lærarar eins hart, og hann rakar starvsfelagar í øðrum londum.

Um vit hyggja at teimum fáu, sum gjørdust ovbyrjað, áðrenn árið var lokið, so hava tey øll nøkur drøg í felag:

- Tey vóru ikki tikin við upp á ráð, tá ið tímatalvan varð løgd.
- Tey merktu ikki, at leiðslan var áhugað í, hvussu tað gekst teimum, og hvussu tey skipaðu sína undirvísing.
- Tey fingu ongan kontaktlærara.
- Tey settu seg ongantíð í samband við fyrrverandi lærarar á Føroya læraraskúla, og fyrrverandi lærarar á Føroya læraraskúla settu seg ongantíð í samband við tey.
- Tey fingu eina strævna tímatalvu.
- Tey fingu flokkar, har tað vóru nógvir næmingar, ið høvdu annaðhvørt innlæringar- ella atferðartrupulleikar.
- Tey undirvístu annaðhvørt als ikki ella bert fáar tímar í sínum linjufakum.
- Tey undirvístu í fleiri lærugreinum, ið teimum ikki hóvaðu, og har tey kendu seg fakliga veik.

Eingin av teimum, ið gjørdist ovbyrjað/ur fyrsta árið, hevur sagt lærarastarvinum farvæl. Øll byrjaðu aftur árið eftir og siga seg trívast í dag.




Ritmynd 78 vísir, at skúlaleiðslur eru ymiskar. 50% av svargevunum siga, at leiðslan var "sera áhugað" í, hvussu tað gekst teimum, og hvussu tey trivust á skúlanum. 34,2% siga, at leiðslan var "eitt sindur áhugað", meðan 13,2% siga, at leiðslan ikki vísti nakran áhuga.

Nær svargevarnir hava tikið sína útbúgving sær út til at ávirka úrslitið:

- 22,2% av teimum, ið tóku prógv í 2007, siga, at leiðslan var "sera áhugað" í, hvussu tað gekst teimum, og um tey trivust. 50% siga, at leiðslan var "eitt sindur áhugað", meðan 27,8% siga, at leiðslan ikki vísti nakran áhuga.
- 47,1% av teimum, ið tóku prógv í 2011, siga, at leiðslan var "sera áhugað" í, hvussu tað gekst teimum, og um tey trivust. 52,9% siga, at leiðslan var "eitt sindur áhugað". Eingin sigur, at leiðslan ikki vísti nakran áhuga.

Samanbera við svargevarnar, ið tóku prógv í 2007 við svargevarnar, ið tóku prógv í 2011, so er tað mangt, ið bendir á, at føroyskar skúlaleiðslur eru vorðnar meiri tilvitaðar um trivnaðin hjá nýútbúnum lærarum.




Ritmynd 79 vísir fyrst, at skúlaleiðslur eru ymiskar. 15,2% eru "sera áhugaðar" í at vita, hvussu nýútbúnu lærararnir skipa sína undirvísing, 38% eru "eitt sindur áhugaðar", meðan 39,2% als ikki vísa nakran sjónligan áhuga.

Um vit hyggja at, nær svargevarnir hava tikið prógv, so síggja vit:

- At 5,8% av teimum, ið tóku prógv í 2007 siga, at leiðslan var "sera áhugað" í at vita, hvussu nýútbúnu lærararnir skipaðu sína undirvísing. 47,1% siga, at leiðslan var "eitt sindur áhugað"og 47,1% siga, at leiðslan ikki vísti nakran áhuga.
- Eingin, ið tók prógv í 2011 sigur, at leiðslan var "sera áhugað" í at vita, hvussu nýútbúni lærarin skipaði sína undirvísing. 35,3% siga, at leiðslan var "eitt sindur áhugað", meðan heili 64,7% siga, at leiðslan ikki vísti nakran áhuga.

Samanbera vit svargevar, ið tóku prógv í 2007 við svargevar, ið tóku prógv í 2011, so síggja vit, at tað kanska gongur tann skeiva vegin. Leiðslurnar vísa minni og minni áhuga fyri, hvussu nýútbúnir lærarar skipa sína undirvísing, hvørjar lærubøkur teir velja, hvørjar undirvísingarhættir teir nýta. Osfr..

Henda spurnablaðakanning sigur einki um, hví skúlaleiðslur í 2011/2012 eru so lítið áhugaðar í, hvussu nýútbúnir lærarar skipa sína undirvísing.[11]

Orsøkirnar kunnu m.a. vera, at skúlaleiðslurnar

- hava fult álit á, at nýútbúnu lærararnir megna undirvísingaruppgávuna
- ikki vilja blanda seg uppí og órógva nýútbúna læraran
- virða námsháttarfrælsið hjá einstaka læraranum
- hava nógv um at vera og hava ikki stundir at fylgja við einstaka læraranum
- ikki eru serliga áhugaðar
- ella: At tað er ikki siðvenja í skúlanum, at skúlaleiðslan vísir nýútbúnum lærarum og undirvísing teirra serligan ans.[12]

[11] Í nøkrum skúlum í Danmark er verkætlanin "Vis mig din undervisning" farin av bakkastokki. Verkætlanin snýr seg um, at skúlaleiðarar eygleiða undirvísingina hjá lærarunum nakrar ferðir um árið. Verkætlanin fær sum heild góð skotsmál bæði frá skúlaleiðarum og einstøku lærarunum. (Trier, 2012)

Tað er heldur ikki nakað, ið bendir á, at skúlaleiðarar sum heild uppfata nýútbúnar lærarar sum serligar tilfeingispersónar, sum kunnu vera við at seta pedagogisku dagsskránna á nýggja arbeiðsplássinum. Nýútbúnir lærarar skuldu, tá ið til stykkis kom, havt nýggjastu vitanina um modernaðar undirvísingargongdir við sær í skjáttuni. Og henda vitanin kundi komið øllum starvsliðnum til góðar.[13]




Ritmynd 80 vísir, at ¾ av svargevunum settu seg "ongantíð" í samband við fyrrverandi lærarar á læraraskúlanum fyri at spyrja um góð ráð.

Stóra prosenttalið er neyvan tekin um, at svargevarnir ikki hava havt tørv á at samskifta við ein fakligan hugskotsgeva. Prosenttalið er heldur tekin um, at tað ikki hevur verið siðvenja og roknað sum vanligur og loyviligur atburður, at fyrrverandi lesandi taka upp samband við lærarar á læraraskúlanum fyri at tosa um didaktiskar ivaspurningar.

Lærarin á læraraskúlanum fær ikki nakra samsýning fyri at vegleiða nýútbúnar lærarar, og hetta fær ivaleyst nógvar nýútbúnar lærarar at halda seg aftur.

---

[12] Ritmynd 79 kann samanberast við TALIS-kanningina. Í TALIS-kanningini kann ein lesa *"... at einans 13% av lærarunum halda, at skúlaleiðarin (regluliga ella ógvuliga ofta) gevur lærarum uppskot um, hvussu undirvísingin kann betrast."* (s. 10). Tað stendur somuleiðis, *"... at einans 7% halda, at skúlaleiðarin ella onkur annar í leiðslutoyminum eygleiðir floksundirvísingina regluliga ella ógvuliga ofta."* (ibid.)

[13] Í EVA-frágreiðingini , ið ber heitið "Ny lærer" siga 80% av nýútbúnu donsku lærarunum, at skúlaleiðslan uppfataði teir sum tilfeingispersónar í skúlanum. Nýútbúnu lærararnir siga, at teir taka virknan lut, tá ið tosað verður um m.a. siðvenjur á skúlanum, lærubókaskipanir, undirvísingartilgongdir osfr.. Og at teir í hesum kjaki vísa á tað, teir hava lært á læraraskúlanum. (Csnoka, 2011)




¾ av svargevunum siga, at fyrrverandi lærarar teirra á Føroya læraraskúla "ongantíð" settu seg í samband við teir fyri at vita, hvussu tað gekst teimum sum fólkaskúlalærarar.

Ein stórur partur av svargevunum, ið sigur, at lærarar á Føroya læraraskúla hava sett seg í samband við teir, vísir á, at talan hevur verið um óformligt prát á gongugøtuni ella aðrastaðnis, tá ið fólk hava hitst av tilvild.

Ritmynd 81 vísir eins og talva 80, at tá ið ein lærari hevur fingið prógv, so missir hann sambandið við útbúgvingarstaðið. Hann fer frá at vera lesandi á Føroya læraraskúla til at vera lærari úti um landið ella uttanlands. Og tað er eitt skott millum hesar báðar skipanirnar.

Tað kann tó undra, at Føroya læraraskúli sum stovnur og skúli, og teir lærarar, ið hava undirvíst einum flokki í fleiri ár við tí endamáli, at hesi skulu gerast góðir lærarar, ikki eru áhugaðir í at vita, hvussu tað gongst nýútbúnu lærarunum.

Orsøkin til at sambandið slitnar er neyvan illvilji. Orsøkin er óivað siðvenja – ella vantandi siðvenja.[14]

[14] Í øðrum norðurlondum hevur ein seinnu árini ment skipanir, har nýútbúnir lærarar hava samband við útbúgvingarstaðið fyrsta árið, teir eru lærarar. Skipanirnar eru eitt sindur ymiskar frá landi til land og frá lærarahaskúla til lærarahaskúla. (Ramberg, 2011)




Ritmynd 82 vísir okkum, at 80,8% av svargevunum halda, at tað hevði verið annaðhvørt "sera gagnligt" ella "gagnligt" at havt formligt samband við Føroya læraraskúla og fyrrverandi floksfelagar fyrsta árið.

Um vit hyggja at kynsbýti, so halda 27,3% av mannligu svargevunum og 16,1% av kvinnuligu svargevunum, at tað ikki er neyðugt, at nýútbúnir lærarar hava eitt tílíkt tilboð.

Um vit hyggja neyvari at teimum, ið ikki halda tað vera neyðugt at hava samband við útbúgvingarstaðið fyrsta undirvísingarárið, so høvdu 85,7% av teimum annaðhvørt undirvísingarroyndir, áðrenn tey fóru á læraraskúla ella undirvístu tey í lestrartíðini.[15]

92,9% av teimum svargevum, ið ongar undirvísingarroyndir høvdu, tá ið teir fingu prógv, halda tað hevði verið kærkomið tilboð, um teir kundu havt samband við Føroya læraraskúla fyrsta starvsárið.

[15] Tað eru tó fleiri svargevar, ið bæði høvdu undirvísingarroyndir áðrenn lestrartíðina, og sum arbeiddu sum vikarar í lestrartíðini, sum kundu hugsað sær at havt samband við útbúgvingarstaðið fyrsta undirvísingarárið.

## 83. Hvør var størsta avbjóðingin fyrsta árið sum lærari? *(Kanst tú nevna tríggjar avbjóðingar?)*

Spurningur 83 er ein opin spurningur. Svarini eru ymisk. Nakrir svargevar lýsa viðurskiftini út í æsir. Aðrir nýta markorð.

Svarini kunnu býtast í fýra:

| I<br>At finna sín lærarastíl og at finna stevið sum lærari | II<br>At læra kjarnuuppgávurnar hjá einum lærara | III<br>At samstarva sum lærari | IV<br>At undirvísa næmingum, ið hava trupulleikar av ymiskum slagi |
|---|---|---|---|

1. AT FINNA SÍN EGNA LÆRARASTÍL OG AT FINNA STEVIÐ SUM LÆRARI

- At finna seg til rættis á nýggja arbeiðsplássinum. Ein svargevi skrivar: *"Fólkaskúlin hevur eina serliga rútmu. Og hana má mann finna".*
- At finna sín egna lærarastíl ella at finna útav, hvat "slag av lærara" ein ynskir at verða. Ein svargevi skrivar: *"Eg royndi at finna útav hvussu fitt, strong, tolin og krevjandi eg skuldi vera".* Ein annar skrivar: *"Eg nýtti fyrstu tíðina til at skapa mín egna læraraprofil... ein professionellan verumáta".*
- At skipa tann einstaka undirvísingartíman. At hava nóg mikið av tilfari og aktivitetum.
- At fáa næmingarnar at virða ein sum lærara.[16]
- At stýra flokkinum. At fáa disiplin í flokkin, og at fáa næmingarnar at gera, sum ein vil.
- Mental møði. Ein svargevi skrivar: *"Størsta avbjóðingin var at vera í meldrinum allatíðina. At meistra at verða spurdur 1000 spurningar hvønn dag, meðan tú hoyrir fólk tosa rundan um teg. At koma niður á jørðina aftur eftir ein langan arbeiðsdag. At tú ert so móður út á kvøldið".* Ein annar svargevi skrivar: *"Størsta avbjóðingin var at geva so nógv av sær sjálvum".* Ein triði skrivar: *"Arbeiðið fylti alt og tók alla mína tíð".* Ein fjórði skrivar: *"Tað truplasta var at kenna seg sum eina novicu og at hava so fáar undirvísingarroyndir".* Ein fimti skrivar: *"Eg kendi meg kroniskt ovbyrjaða".*
- At ivast í, um tað tú gert, er nóg gott. Ein svargevi skrivar: *"Størsta avbjóðingin var at sannføra meg sjálva um, at tað eg gjørdi, var gott og rætt".* Ein annar skrivar: *"Vikan kendist long. Har vóru so nógvir tímar, ið skuldu fyrireikast, og sum eg skuldi fáa at ganga".*

[16] Altjóða kanningar vísa, at tað eru fimm høvuðsavbjóðingar, tá ið ein er nýggjur lærari. Hesi eru: (1) At fáa virðing frá næmingunum, (2) at motivera næmingarnar, (3) at næmingalaga undirvísingina, (4) at eftirmeta undirvísingina, (5) foreldrasamstarv. (Gade, Ole, 2008: 6ff.) Aðrar kanningar vísa, at høvuðsavbjóðingin er at byggja upp góðar vanar í flokkinum; at samstarva við starvsfelagar og foreldur um truplar uppgávur og viðurskifti; at venja seg við arbeiðslagið og arbeiðsdagin á skúlanum; og at venja seg við, at tað tíðum er so lítið samband millum teori og praksiss. (Fibæk Laursen & Bjerresgaard, 2009: 333ff.)

2. AT SETA SEG INN Í KJARNUUPPGÁVURNAR Í LÆRARAYRKINUM

- At gera ársætlan í ymiskum lærugreinum og á ymiskum floksstigi. Ein svargevi skrivar: *"Alt pappírsarbeiðið var størsta avbjóðingin".*
- At seta seg inn í ymiskar lærubókaskipanir, at finna hóskandi tilfar í ymiskum lærugreinum og til ymisk floksstig.
- At næmingalaga undirvísingina. Ein svargevi skrivar: *"Næmingarnir vóru á so øgiliga ymiskum fakligum støði. Hvat skuldi eg gera?"*
- At føra til próvtøku og at geva próvtøl.
- Flokslæraraleikluturin – hvussu umfatandi er hann, og nær ger ein nóg mikið?
- At nýta KT í undirvísingini.

3. AT SAMSTARVA SUM LÆRARI

- Toymissamstarv – tá ið toymislimirnir eru ójavnir á máli, og tá ið teir ikki leggja somu orku í starv sítt. Ein svargevi skrivar: *"Størsta avbjóðingin var at skula samstarva við lærarar, ið tú kanska ikki "svingaði" so væl við".* Ein annar skrivar: *"Tað mest mannminkandi var, tá ið eldri lærarar vildu seta meg upp á pláss".*
- Foreldrasamstarv, felags foreldrafundir, foreldraviðtalur, at hava truplar samrøður við foreldrini.
- At samstarva við sosialar myndugleikar.

4. AT UNDIRVÍSA NÆMINGUM, IÐ HAVA TRUPULLEIKAR AV YMISKUM SLAG

- Tað, ið nógv flestir nýútbúnir lærarar vísa á sum ta størstu avbjóðingina, eru truplir næmingar. Her verður skilt ímillum:
    - Næmingar, ið hava serligan tørv, og sum ikki hava neyðuga førleikan at lesa, rokna og læra sum floksfelagarnir.
    - Næmingar, ið hava atferðartrupulleikar. Hesir fáa ikki nóg mikið burtur úr undirvísingini, og teir órógva harumframt flokkin. Ein svargevi sigur: *"Størsta avbjóðingin var órógvandi næmingar, ið kendust súgva tíð og orku úr einum – og sum beinleiðis royndu at sabotera undirvísingina".*
    - Næmingar, ið hava eina diagnosu. ADHD og autisma verða nevnd.
    - Næmingar, ið eru sálarliga illa fyri. Ein svargevi skrivar: *"Eg mátti vera sálarfrøðingur hjá næmingum í kreppu".* Ein annar skrivar: *"Hvat skal ein gera, tá ið ein næmingur missir mammu sína í skúlaárinum? Hvat skal ein gera, tá ið tað kemur fram, at ein næmingur hevur verið fyri kynsligari misnýtslu? Tað var eg noydd at finna útav".*
    - Næmingar, ið ikki fáa ta umsorgan og tann stuðul heimanífrá, teir hava tørv á. Ein svargevi skrivar: *"Tann største avbjóðingin var at vita, hvar mín uppgáva sum lærari endar, og hvar onkur annar tekur við".*
    - Truplir flokkar. At skapa trivnað og at fyribyrgja/steðga happing.
    - At skula yvirtaka flokkar, ið eru fakliga illa fyri.

# Kap. 7

# Hvussu trívist tú sum lærari í dag?




Ritmynd 84 vísir, at 94,7% av svargevunum siga seg trívast annaðhvørt "sera væl" ella "væl" sum lærari í dag.[17]

Um vit hyggja at kynsbýti, so trívast mannligir svargevar eitt sindur betur enn kvinnuligir svargevar.

- 61,9% av monnunum siga, at teir trívast "sera væl" sum lærari í dag, 38,1% siga, at teir trívast "væl". Eingin trívist "toluliga", "illa" ella "als ikki".
- 50% av kvinnunum siga seg trívast "sera væl" sum lærari í dag. 42,6% siga seg trívast væl. 5,6% siga seg trívast "toluliga". Meðan 1,8% trívist "als ikki".

Rákið er tó greitt fyri bæði kynini. Lærarar trívast betur og betur, sum árini ganga.

- ¾ av teimum, ið siga seg trívast annaðhvørt "toluliga" ella "als ikki" tóku prógv á sumri 2011.

[17] Hetta prosenttal kann berast saman við TALIS-kanningina, ið vísir, at 90% av svargevunum eru nøgdir við arbeiði sítt. (s. 10)




Ritmynd 85 vísir, at lærarin er ikki útlærdur og myndaður, tá ið hann fær lærarprógv. At gerast ein góður undirvísari er ein gongd og ein menning, ið byrjar, tá ið tú verður innskrivaður á læraraskúlanum, sum fær skap tey 4 árini á læraraskúlanum, sum broytist, tá ið tú fært prógv, ábyrgd og undirvísingarroyndir, og sum helst ongantíð heldur uppat.

Øll, ið tóku prógv í 2007, 2008 og 2009 meta, at tey eru betri lærarar í dag, enn tey vóru fyrsta árið. Ein stórur partur av teimum, ið tóku prógv í 2007 og 2008, sigur, at tey eru "nógv betri" lærarar nú, enn tá ið tey vóru nýbyrjarar. Hetta er tekin um, at undirvísingarroyndir eru ein treyt fyri, at ein skal gerast betri lærari.

Um vit hyggja at kynsmuni, so siga allir menn, ið tóku prógv í 2010 og 2011, seg vera annaðhvørt "nógv betri" ella "betri" lærarar í dag enn fyrsta árið/fyrsta hálva árið.

18,2% av kvinnunum, ið tóku prógv 2010 og 27,3% av kvinnunum, ið tóku prógv 2011, svara, at "tað er nakað tað sama", tá ið tær verða bidnar um at samanbera sín undirvísingarførleika nú við sín undirvísingarførleika fyrsta árið.[18]

Tað er áhugavert, at eingin svargevi heldur seg vera verri lærara nú, enn tá ið hann ella hon var nýútbúgvin.

Um vit hyggja at teimum svargevum, ið ikki høvdu nakrar undirvísingarroyndir, áðrenn teir byrjaðu á læraraskúla, og sum ongantíð arbeiddu sum vikarar í lestrartíðini, so siga 33,3%, at teir eru "nógv betri lærarar" í dag, 61,9% siga, at teir eru "betri", og 4,8% siga "nakað tað sama". – Hesi prosenttøl líkjast sera nógv prosenttølunum í ritmynd 85, og kann ein tí siga, at svargevar, ið ikki høvdu aðrar undirvísingarroyndir enn starvslæruna, ikki hava ein týðiliga øðrvísi menningargongd enn aðrir lærarar í skúlanum.

[18] Í spurnablaðnum til teirra, ið tóku prógv í 2011, vórðu svargevarnir bidnir um at samanbera sín undirvísingarførleika við ársenda við sín undirvísingarførleika fyrsta hálva árið.




Ritmynd 86 vísir, at tímatalvurnar hjá svargevunum eru sera ymiskar. Ein helmingur undirvísir millum 75 og 100% av tíðini í sínum linjufakum, og hin helmingurin undirvísir millum 0 og 50% av undirvísingartíðini í sínum linjufakum.

68,2% av mannligu svargevunum siga seg undirvísa millum 75-100% av undirvísingartíðini í sínum linjulærugreinum. 45,3% av kvinnuligu svargevunum siga seg undirvísa millum 75-100% av undirvísingartíðini í sínum linjulærugreinum.

Nærlesur ein spurnabløðini, so finnur ein einstakar lærarar, ið ikki undirvísa ein einasta tíma í sínum trimum linjufakum.




Ritmynd 87 vísir, at eingin svargevi heldur, at hann dugir verri at undirvísa í sínum trimum linjufakum enn í øðrum lærugreinum. 37,8% halda, at undirvísingarførleikin ikki er treytaður av linjufakslestri, meðan 62,2% halda, at teir annaðhvørt eru "nógv betri"

ella "eitt sindur betri" lærarar, tá ið teir undirvísa í sínum linjufakum enn í øðrum fakum.[19]

Meirilutin av teimum, ið siga, at tað er eingin munur á undirvísingardygdini, um tey undirvísa í sínum linjufakum ella øðrum lærugreinum, undirvístu fáar tímar í sínum linjufakum skúlaárið 2011/12.




Ritmynd 88 vísir, at bara 1,3% av svargevunum siga, at teir tíma verri at undirvísa í sínum trimum linjufakum enn í øðrum lærugreinum. 25,4% siga, at undirvísingarhugurin ikki er treytaður av serligum undirvísingarfakum, meðan heili 73,3% av svargevunum siga, at teir tíma annaðhvørt "nógv betur" ella "betur" at undirvísa í sínum linjufakum.

Ein kann tí hugsa sær, at spurningurin um trivnað er tengdur at, um lærarin sleppur at undirvísa í sínum linjufakum ella ikki. *(Onnur viðurskifti kunnu sjálvandi eisini ávirka trivnaðin).*

Starvsaldur og kyn hava onga ávirkan á, hvussu svargevarnir svara spurningi 88.

---

[19] Útlendskar kanningar vísa, at lærarar, ið undirvísa í sínum linjufakum fáa betri úrslit enn lærarar, ið ikki undirvísa í sínum linjufakum. (Woolfolk, 2007: 26ff.) Nakrar kanningar hava somuleiðis víst, at tað er samanhangur millum próvtøkuúrslitið, ið lærarin hevur fingið í linjufakslestrinum á lærarskúlanum, og hvussu næmingar hansara klára seg í lærugreinini. (Rasmussen, 2008: 7ff) Nýggjari kanningar, ið eru framdar undir virkjasamskipanini "School Effectiveness Paradigm" og "School Improvement", tosa ikki um linjufakslesturin hjá einstaka læraranum, men siga harafturímóti, at tann lærarin, ið fær góð úrslit, er (1) væl fyrireikaður, (2) hann dugir at stápla eina málrættaða undirvísing á beinini, (3) hann gevur næmingunum jaliga afturboðan, tá ið teir hava gjørt eitthvørt skúlaarbeiði, (4) hann væntar nógv av einstaka næminginum, (5) hann nýtir tíð at gjøgnumganga heimaarbeiði, (6) hann dugir at skapa eitt trygt læringsumhvørvi, (6) at hann leggur upp fyri menningarstiginum hjá einstaka næminginum, (7) hann dugir at samskifta við einstaka næmingin, (8) hann dugir at skapa eina gjøgnumskygda undirvísing, har tað er greiður samanhangur millum endamál, innihald og arbeiðshátt, (9) einstaki næmingurin veit, hvat lærarin krevur av honum, (10) hann dugir at skapa eitt læringsumhvørvi, har størsti parturin av tíðini verður nýttur til skúlaarbeiði og ikki til at loysa ósemjur og praktiskar trupulleikar. (Laursen, 2008:57ff. & Hermansen, 2007:21).




Spurningur 89 er tilhugsaður, tí nýútbúnir lærarar kunnu ikki vita við vissu, hvussu lærarar, ið hava undirvíst í 20 – 25 ár, undirvísa í dag. Men spurningurin varpar tó ljós á, hvussu nýliga útbúnir lærarar uppfata sína undirvísing og sín egna lærarastíl.

Talva 89 vísir:

- At 20% av svargevunum uppfata seg sum progressivar lærarar, ið undirvísa "nógv øðrvísi" enn lærarar, ið hava verið í yrkinum í 20 - 25 ár.
- At 8% av svargevunum uppfata seg sum siðbundnar lærarar, ið ikki halda seg undirvísa øðrvísi, enn lærarar, ið hava verið nógv ár í yrkinum.
- At størsti parturin (t.e. 72% av svargevunum) er í eini millumstøðu. Hesi kollvelta ongan fólkaskúla og undirvísingarlogikk, men siga tó, at teir undirvísa "nakað øðrvísi" enn lærarar, ið hava undirvíst í nógv ár.

Tað er ikki nakar sjónskur munur á kvinnum og monnum í hesum spurningi.

Starvsaldurin hevur tó eina greidliga ávirkan. 83,3% av teimum, ið siga seg undirvísa á sama hátt sum lærarar, ið hava undirvíst í 20 – 25 ár, tóku prógv í 2010 og 2011 og eru tískil nýútbúgvin.[20] Hetta er tekin um, at dirvið til at bróta upp úr nýggjum, at ganga egnar leiðir, og at undirvísa øðrvísi enn ein sjálvur hevur verið undirvístur, sær út til at vaksa, tá ið ein hevur verið lærari 3, 4 og 5 ár.

[20] At so nógvir svargevar, ið tóku prógv í 2011, siga seg undirvísa eins og lærarar, ið hava undirvíst í 20 – 25 ár, setur spurnartekin við ta hugmynd, ið sigur, at nýútbúnir lærarar fara grundleggjandi øðrvísi til verka enn lærarar, ið hava undirvíst í nógv ár.




Tá ið ein lesur ritmynd 90, skal ein hava í huga, at í nøkrum føroyskum skúlum undirvísa lærarar ein part av tíðini í toymi. Hetta merkir, at størsti parturin av teimum, ið siga seg hava annaðhvørt "sera stóra" ella "stóra" vitan um, hvussu starvsfelagarnir undirvísa, undirvísir á tílíkum skúlum.

Sjálvt um opinleikin er størri í dag, enn hann var fyri nøkrum árum síðan, so vísir ritmynd 90, at hin føroyski fólkaskúlin sum heild ikki kann rópast ein lærandi organisatión, har tað er stórt innihaldsligt og háttalagsligt gjøgnumskygni, og har lærarar støðugt kunna hvør annan, eygleiða hvør annan og læra av royndunum hjá hvør øðrum.

Tað eru bara 30,7% av svargevunum, ið siga, at teir hava annaðhvørt "sera stóra vitan" ella "stóran vitan" um, hvussu starvsfelagarnir skipa sína undirvísing. 69,3% av svargevunum siga seg annaðhvørt vita "eitt sindur", "lítið" ella "einki" um, hvussu starvsfelagarnir bera seg at í flokshølinum.

At lærarar hava avmarkaða vitan um, hvussu starvsfelagar á sama skúla undirvísa, er ikki nakað serføroyskt fyribrigdi. Í øðrum londum tosar ein um tann "privatpraktiserandi læraran", sum heldur didaktisku og háttalagsligu kortini tætt at kroppinum. Teir trupulleikar, ið ein lærari stríðist við, roynir hann at dylja fyri starvsfeløgum, og tey góðu didaktisku hugskotini og royndirnar, ið hann hevur í skjáttuni, hevur hann ilt við at lata øðrum.[21]

Um ein hyggur at starvsaldri, so sæst, at lærarar, ið bara hava verið í yrkinum í eitt skúlaár, eru ringast fyri. Teir vita minst um, hvat hendir aðrastaðnis enn í sínum egna flokshøli. Vitanin um, hvussu starvsfelagarnir bera seg at í flokshølinum, økist spakuliga við árunum.[22]

---

[21] Í nøkrum skúlum í Danmark er verkætlanin "Vis mig din undervisning" farin av bakkastokki. Verkætlanin, sum byrjaði við, at skúlaleiðarar skuldu eygleiða undirvísingina hjá lærarunum, er víðkað soleiðis, at lærarar somuleiðis fáa høvi at eygleiða undirvísingina hjá hvør øðrum. Verkætlanin fær sum heild góð skotsmál bæði frá skúlaleiðarum og einstøku lærarunum. (Stanek, 2012; Aisinger, 2012)

[22] Í "Tilmæli frá arbeiðsbólki í sambandi við TALIS-kanningarnar" verður skrivað, *"... at 38% av svargevunum luttaka í toymisarbeiði eina ferð um vikuna; at 24% býta um undirvísingartilfar eina ferð um mánaðin og 7% eina ferð um vikuna; at 22% skifta orð um undirvísingartilfar við aðrar lærarar eina ferð um mánaðin, og 15% eina ferð um vikuna; 3% eygleiða, tá ið aðrir lærarar undirvísa og geva afturboðan eina ferð um mánaðin og 15% eina ferð um vikuna."* (s. 14)




Ritmynd 91 líkist ritmynd 90. Og aftur her skal ein hava í huga, at í nøkrum føroyskum skúlum undirvísa lærarar ein part av tíðini í toymi, og at størsti parturin av teimum, ið siga, at starvsfelagarnir hava annaðhvørt "sera stóra vitan" ella "stóra vitan" um, hvussu teir skipa sína undirvísing, undirvísir óivað í tílíkum skúlum.

Allir svargevarnir eru nýútbúnir. Teir elstu hava verið í starvi í 5 ár, teir yngstu í 1 ár. Tað kann tí undra, at bara 29% av starvsfeløgunum hava annaðhvørt "sera stóra vitan" ella "stóra vitan" um, hvussu teir starvsfelagar, ið hava nýggjastu læraraútbúgvingina, skipa sína undirvísing.

Nýútbúnir lærarar verða við øðrum orðum ikki uppfataðir sum serligir tilfeingispersónar, sum koma inn í skúlan við nýggjastu vitanini um undirvísingarhættir og undirvísingartilgongdir, og sum kunnu geva starvsfeløgum íblástur, ið hava undirvíst í nógv ár.

Hinvegin, so verða nýútbúnir lærarar heldur ikki uppfataðir sum nalvungar, ið hava tørv á stuðulspedagogum fyrstu tíðina.

Um vit hyggja at starvsaldri, so eru tað serliga svargevar, ið tóku prógv í 2011, ið siga, at starvsfelagarnir hava "lítla vitan" um, hvussu teir skipa sína undirvísing.

Um vit samanbera talvu 91 við talvu 58, 77, 79 og 80, so sæst, at nýútbúnir lærarar eru sera einsamallir fyrsta starvsárið. Teir leita sær ikki ráð hjá hjá fyrrverandi lærarum sínum á læraraskúlanum; skúlaleiðslan er ikki serliga áhugað at vita, hvussu teir skipa sína undirvísing; nógvir lærarar hava ongan kontaktpersón at spyrja til ráðs; teir vita lítið um, hvussu nýggju starvsfelagarnir skipa sína undirvísng, og nýggju starvsfelagarnir eru ikki serliga áhugaðir í at vita, hvussu teir skipa sítt fyrsta undirvísingarár.

Hetta eru korini og treytirnar hjá nógvum fyrstaárslærarum. Eingin vísir teimum illvilja. Men aftur her er talan um siðvenju – ella vantandi siðvenju.




Ritmynd 92 vísir okkum, at lærarum sum heild dámar best at undirvísa hádeild, tínæst grunddeild og síðan miðdeild.

Men í hesum spurningi er ein eyðsýniligur munur á, hvat mannligir lærarar svara, og hvat kvinnuligir lærarar svara.

Tað eru bara 4,8% av monnunum, sum siga seg dáma best at undirvísa í grunddeildini. 23,8% siga seg dáma best at undirvísa í miðdeildini. Meðan heili 66,7% siga seg dáma best at undirvísa í hádeildini. Restin svarar "at tað er líka mikið".

Hjá kvinnunum er øðrvísi statt: 41,4% siga, at tær dáma best at undirvísa grunddeildini, 20,7% siga, at tær dáma best at undirvísa miðdeildini, og 29,3% siga, at tær dáma best at undirvísa hádeildini. Restin svarar "at tað er líka mikið".

Samanumtikið kann ein siga, at meðan kvinnuligu lærarunum dámar best at undirvísa í grunddeildini, so dámar mannligu lærarunum best at undirvísa í hádeildini. Miðdeildin er við skerdan lut.




Í ritmynd 93 eru tølini meiri lík enn í talvu 92. Men aftur hesaferð er tað áhugavert at hyggja at muninum á mannligum og kvinnuligum svargevum.

- 45% av monnunum siga seg roynast best, tá ið teir undirvísa hádeildini. 25% svara "miðdeildin". 20% svara "at tað er líka mikið". Meðan bara 10% svara "grunddeildin". *(Um ritmynd 93 verður borin saman við ritmynd 11.4, so sæst, at mannligir lærarar í stóran mun sleppa undan at undirvísa í grunddeildini. Bara 14,6% av samlaðu tímunum, ið mannligu svargevarnir lósu skúlaárið 2011/2012 vórðu lisnir í annaðhvørt 1., 2., ella 3. flokki).*
- 41,4% av kvinnunum siga seg roynast best, tá ið tær undirvísa í grunddeildini. 29,3% svara "hádeildin". 20,7% svara "miðdeildin". Meðan 8,6% siga, at undirvísingarførleikin ikki er tengdur at ávísum aldursbólki.

Verður ritmynd 93 samanborin við ritmynd 92, so ber til at siga, at ein stórur partur av kvinnunum dámar best og halda seg roynast best, tá ið tær undirvísa í grunddeildini, meðan ein stórur partur av monnunum dámar best og halda seg roynast best, tá ið teir undirvísa næmingum í hádeildini.

Miðdeildin er aftur her við skerdan lut.

Ritmynd 93 sigur tó einki um, hvørt kvinnuligir lærarar eru betur egnaðir at undirvísa í grunddeildini enn mannligir lærarar, og hvørt mannligir lærarar eru betur egnaðir at undirvísa hádeildini enn kvinnuligir lærarar. Ritmyndin er ein persónlig meting av, hvat ein sjálvur tímir best, og hvar ein sjálvur heldur seg roynast frægast.




Í ritmynd 94 verður spurt, um svargevanum dámar best at undirvísa (1) í sínum linjufakum, (2) einum ávísum flokki ella (3) einum ávísum aldursbólki. Um hugt verður at tímatalvunum hjá teimum 81 svargevunum, so sæst, at øll trý sniðini ella allar tríggjar samansetingarnar finnast í føroyska fólkaskúlanum í dag.

Talva 94 vísir:

- At nærum hálvpartinum av øllum svargevunum hóvar best at undirvísa einum ávísum aldursbólki, annaðhvørt grunddeild, miðdeild ella hádeild.
- At einum lítlum triðingi dámar best at undirvísa ymiskum flokkum í sínum linjufakum.
- At ein lítil fimtapartur sigur seg helst vilja fylgja einum ávísum flokki í nógv ár og undirvísa í ymiskum lærugreinum. Hetta er kanska tað, ið minnir mest um siðbundna flokslæraraleiklutin.

Verður hugt at kynsbýti, so sæst, at bara 10,5% av mannligu svargevunum siga seg helst vilja fylgja einum ávísum flokki í nógv ár og at undirvísa í ymiskum lærugreinum. 36,8% siga seg helst vilja undirvísa í sínum linjufakum, meðan heili 52,7% siga seg helst vilja undirvísa einum ávísum aldursbólki. – Um ein sammetir talvu 94 við talvu 92 og talvu 93, so kann ein siga, at aldursbólkurin helst skal vera hádeild.

23,1% av kvinnuligu svargevunum siga seg helst vilja fylgja einum ávísum flokki í nógv skúlaár. 30,8% vilja helst undirvísa ymiskum flokkum og aldursbólkum í sínum linjufakum. Og eins og hjá mannligu svargevunum, so dámar størsta partinum av kvinnuligu svargevunum (t.e. 46,1%) best at undirvísa einum ávísum aldursbólki í ymiskum fakum.

Rákið sýnist sostatt vera, at lærarin ikki (bara) skal vera serkønur í at undirvísa í eini lærugrein, men at hann kanska serliga skal vera serkønur í at undirvísa einum ávísum aldursbólki - annaðhvørt grunddeild, miðdeild ella hádeild. Hetta aldursuppbýtið hevur ikki verið hugsað inn í ta útbúgving, ið svargevarnir hava tikið.[23]




Ritmynd 95 vísir, at 15,6% av svargevunum halda, at lærarastarvið er "sera strævið". 40,3% halda, at tað er "strævið". 44,1% halda, "at tað er bæði strævið og ikki strævið". Eingin heldur, at lærarastarvið er eitt lætt starv.

Starvsaldurin sær ikki út til at ávirka, hvussu lærarar svara.

Um hugt verður at kynsbýti, so sæst at:

- 9,5% av mannligu svargevunum halda, at lærarastarvið er "sera strævið". 38,1% halda lærarastarvið er "strævið".
- 17,9% av kvinnuligu svargevunum halda, at lærarastarvið er "sera strævið". 41,1% halda lærarastarvið er "strævið".

Við øðrum orðum halda kvinnuligu svargevarnir starvið vera eitt sindur strævnari enn mannligu svargevarnir.

[23] Á læraraskúlum m.a. í Finlandi og Svøríki er annaðhvørt øll útbúgvingin aldursrættað ella ein partur av útbúgvingini aldursrættaður.




Ritmynd 96 vísir, at svargevarnir halda ikki, at fólk flest vita, hvat lærarastarvið fevnir um, og hvørjar uppgávur, ið lærarin skal loysa gjøgnum dagin, vikuna, mánaðin og árið.

## 97. Heldur tú, at føroyskir lærarar verða virdir av:

| | Ja, avgjørt | Ja, í ávísan mun | Nei, í ov lítlan mun | Nei, als ikki | Tað dugi eg ikki at meta um |
|---|---|---|---|---|---|
| **97.1 Vanliga føroyinginum** | 2,6% | 24,4% | 57,7% | 14% | 1,3% |
| **97.2 Føroyskum politikarum** | | 5,1% | 62,8% | 23,1% | 9% |
| **97.3 Føroyskum miðlum** | | 11,7% | 46,1% | 21,1% | 21,1% |

Talva 97 vísir heilt greitt, at føroyskir lærarar sum heild ikki halda, at teir fáa ta virðing frá vanliga føroyinginum, føroyskum politikarum og føroyskum fjølmiðlafólki, ið teir hava uppiborið.

Orsøkin til vantandi virðingina kann stava frá, at fólk ikki vita, hvat ið lærarastarvið fevnir um. (Ber saman við talvu 96).

Tað er týðiligt, at svargevarnir ikki kenna seg virdar av politiska myndugleikanum, sum jú er arbeiðsgevari teirra.[24] 85,9% siga, at føroyskir lærarar "í ov lítlan mun" ella "als ikki" verða virdir av føroyskum politikarum. – Um hetta er ein varandi áskoðan ella um útsagnin er tengd at politiska orðaskiftinum og politiskum avgerðum seinastu tíðina, sigur henda spurnakanningin einki um.

[24] Í TALIS-kanningini stendur: *"Tað tykist sum ein stórur partur av lærarunum ikki halda, at teir verða virðismettir av nærsamfelagnum... Einans helmingurin av svargevarunum halda, at lærararnir í teirra kommunu eru høgt í metum."* (s. 10)




Ritmynd 98 vísir, at 66,7% av svargevunum halda, at lærarastarvið er "sera innihaldsríkt". *(T.e. 76,3% av mannligu svargevunum og 62,9% av kvinnuligu svargevunum).* 24% halda, at starvið er "nokkso innihaldsríkt". *(T.e. 19% av mannligu svargevunum og 25,9% av kvinnuligu svargevunum)*. 8% halda, at starvið er "líka innihaldsríkt sum onnur størv". *(T.e. 4,7% av mannligu svargevunum og 9,3% av kvinnuligu svargevunum).* Meðan bara 1,3% halda, at starvið er "ikki er serliga innihaldsríkt". *(T.e. 1,9% av kvinnuligu svargevunum).*

Kenslan av, at lærarastarvið er eitt innihaldsríkt starv, er eins sterk hjá lærarum, ið hava verið í starvi í eitt ár, sum hjá lærarum, ið hava verið í starvi í fimm ár.




Ritmynd 99 vísir, at 87% av svargevunum eru annaðhvørt "sera errin" ella "nokkso errin" av at vera lærari. Bara 13% siga seg "ikki vera serliga errin" av yrkisheitinum.

70% av monnunum eru "sera ernir" av at vera lærarar. 54,5% av kvinnunum eru "sera ernar" av at vera lærarar.

Starvsaldurin ávirkar ikki svarið.

Henda spurnablaðakanning sigur ikki, hvat tað er, sum ger svargevarnar ernar av at vera lærarar. Kanningin sigur heldur ikki, um lærarar eru ernari av at vera lærarar enn eitt nú námsfrøðingar, sjúkrarøktarfrøðingar, bankafólk o.o. eru av teirra yrkisgrein og arbeiði.




Ritmynd 100 vísir, at umleið 2/3 av svargevunum vænta, at teir framvegis eru lærarar um 10 ár. 5,4% vænta ikki, at teir framvegis eru lærarar um 10 ár. 29,7% eru ivasamir.[25]

Ivin kann skyldast, at ein veruliga hugsar um at skifta yrkisleið. Men ivin kann somuleiðis vera tekin um, at tað kann vera trupult at ímynda sær, hvar ein er, og hvat ein ger um 10 ár. Møguleikarnir at skifta yrkisleið ella at fara undir framhaldslestur eru fleiri og lagaligari í dag enn nakrantíð fyrr.




Ritmynd 101 vísir, at 90,3% av svargevunum meta sum heild *(t.e. í øllum teimum flokkum og lærugreinum teir undirvísa í dagliga)*, at teir eru annaðhvørt "góðir" ella "sera góðir" lærarar. 8,3% av svargevunum halda seg vera miðalgóðar lærarar (t.e. sum lærarar flestir). Meðan 1,4% av svargevunum halda seg vera vánaligar lærarar.

Reglan í siðbundnum javnbýtistalvum sigur, at 66,7% vanliga klára seg miðal, 16,7% klára seg annaðhvørt yvir miðal ella væl yvir miðal, og 16,7% klára seg vanliga undir

[25] Kanningar, ið vóru framdar á læraraútbúgvingini í Århus í 2009/2010, vístu, at eftir fyrsta starvsár, ætlaðu 14,4% av árganginum at gevast og skifta arbeiði, og aftaná tvey ár, var hetta tal vaksið til 26%. Aðrar kanningar vísa, at tá ið nýútbúnir lærarar, ið hava verið í starvi í eitt ár, verða spurdir, um teir ímynda sær, at teir framvegis eru lærarar um trý ella fýra ár, so geva 25% noktandi svar. (Frederiksen, 2011: 4ff.)

miðal ella væl undir miðal. Um ein samanber hesi prosenttøl við ritmynd 101, so sæst, at professionella sjálvsálitið hjá svargevunum er rættuliga stórt.[26]

Við støði í ritmynd 101 kann ein sostatt siga, at tað fakliga og didaktiska undirstøðið, ið varð lagt tey fýra árini á læraraskúlanum, hevur verið so mikið dygdargott, at góðir lærarar spurdust burturúr nøkur ár seinni.

Heldur færri lærarar, ið tóku prógv í 2011 halda seg vera "sera góðar lærarar" enn lærarar, ið tóku prógv árini frammanundan. Og heldur fleiri svargevar, ið halda seg vera "miðallærarar" tóku prógv í 2010 og 2011 enn í 2007, 2008 og 2009. Ein kann tí siga, at professionella sjálvsálitið styrknar við árunum og serliga eftir fyrsta og annað starvsár.

Um hugt verður at teimum, ið ongar undirvísingarroyndir høvdu – hvørki áðrenn tey fóru á læraraskúla ella í lestrartíðini – so siga 7,6%, at tey eru "sera góðir lærarar" í dag, og 80,7% siga, at tey eru "góðir lærarar". Hesi prosenttøl vísa, at undirvísingarroyndir áðrenn lestrartíðina og/ella í lestrartíðini, eru ikki ein fyritreyt fyri, at ein kann gerast ein góður lærari.

Um vit hyggja at kynsbýti, so sæst, at 19% av mannligu svargevunum meta seg vera "sera góðar lærarar", og 24% av kvinnuligu svargevunum meta seg vera "sera góðar lærarar".

Henda spurnakanning sigur einki um, hvussu góðir lærarar svargevarnir í roynd og veru eru. Spurnakanningin varpar bert ljós á, hvussu góðar undirvísarar svargevarnir halda seg vera.

## 102. Hvørjar eru tær størstu avbjóðingarnar í lærarastarvinum í dag?

Svargevarnir eru ikki á einum máli, tá ið teir verða bidnir um at siga, hvørjar tær størstu avbjóðingarnar eru í lærarastarvinum í dag. Niðanfyri verður tikið saman um tær avbjóðingar, ið flestu svargevarnir vísa á.

1. At skúlin er fyri øll: T.e. at næmingarnir eru so ymiskir, og at fakliga spennið er so stórt. Ein svargevi skrivar: *"At skúlin er fyri øll er ein veldig avbjóðing, og at tað er eitt krav, at øll skulu mennast og fáa einstaklingalagaða undirvísing".*

2. At flokkarnir eru so stórir: Ein svargevi skrivar: *"Tá ið tú hevur nógvar flokkar og nógvar næmingar í hvørjum flokki, so kann tað verða trupult at fáa eitt persónligt samband við hvønn einstakan næming. Og at geva hvørjum sítt".*

3. At næmingalaga undirvísingina: Her verður bæði tosað um næmingar, ið hava serligan tørv og næmingar, ið eru serliga væl fyri. Ein svargevi skrivar: *"Tað er mangan strævið, at fáa næmingar, ið "ikki passa inn" at "passa inn"... At fáa eldri næmingar, ið ikki tíma at ganga í skúla, at tíma at ganga í skúla".* Ein annar skrivar: *"At hava ein fakliga dugnaligan og arbeiðssaman næming í sama rúmi sum ein næming, ið hevur ADHD og sum ikki fær nakran stuðul. Tað er nærum ómøguligt".*

[26] Hesi tøl sampakka væl við TALIS-kanningina. Har kann ein lesa, *"... at 95% av svargevunum halda, at teir fáa góð úrslit við næmingunum og 98% halda, at ter vanliga duga at fáa næmingarnar við."* (s. 10)

4. Næmingar, ið hava serligan tørv og/ella hava atferðartrupulleikar: Ein svargevi skrivar: *"Alt fleiri næmingar hava serligan tørv og atferðartrupulleikar. Hvussu røkka vit teimum, uttan at tað ávirkar hinar?"*. Ein annar skrivar: *"Tað tekur so nógva tíð at samskifta og samstarva við sosialu myndugleikarnar, Sernám o.o.. Tað tekur tíð frá restini. Og tað er so leingi at bíða eftir serkønari hjálp"*. Ein triði skrivar: *"Størsta avbjóðingin er at vera tolin við næmingar, ið ikki hava lætt við at læra. At endurtaka tað sama aftur og aftur"*.

5. At fáa disiplin og arbeiðsfrið í flokkin: At fáa virðing frá næmingum. Ein svargevi skrivar: *"Tað er ein veldig avbjóðing at hava næmingar í flokkinum, sum eru totalt ómøguligir, respektleysir og órógvandi. Tað er ikki ein løtt uppgáva at taka sær av slíkum næmingum samstundis, sum tú roynir at undirvísa"*.

6. At motivera og hugfanga nútíðarnæmingin: Ein svargevi skrivar: *"Størsta avbjóðingin í dag er at fanga nútíðarnæmingin, ið heldur tekur eitt joy-stick, I-pad, I-phone, I-pod, Ps3 ella I-box í hond heldur enn at stytta sær stundir við eini undirvísingarbók. At fáa næmingin at gera heimaarbeiði og taka skúlan í álvara!"* Svargevarnir eru samdir um, at motivatión er knýtt at:

- Fjølbroyttum undirvísingarhættum.
- Áhugaverdum og nútíðarhóskandi undirvísingartilfari.
- At lærarin er spennandi og "up-to-date" á øllum økjum. Ein svargevi skrivar: *"At samfelagið og tøknin mennast so skjótt ger, at tú mást fylgja við fyri at fanga áhugan hjá næminginum og halda honum"*.

7. At eftirmeta undirvísingina, einstaka næmingin og at geva próvtøl

8. Foreldrasamstarv: Her kann verður skilt ímillum:

- **Samskifti, ið snýr seg um heimaarbeiði og stuðul heimanífrá:** Ein svargevi skrivar: *"At skapa positivar og mennandi relatiónir til foreldrini og harvið betra um undirvísingartilboðið hjá einstaka næminginum. Tað er vigtugt!"* Ein annar skrivar: *"Tað er týdningarmikil uppgáva, at fáa foreldrini at fata teirra stóra leiklut í læringini hjá barninum"*. Ein triði skrivar: *"Kjarnufamiljan bløðir, og næmingar hava alt ov nógv at hugsa um/stúra fyri"*. Ein fjórði skrivar: *"Ein avbjóðing eru foreldur, ið ikki taka skúlan í álvara"*. Ein fimti skrivar um *"... teir næmingar, ið møta illa svøvntir í skúla, ið ikki hava matpakka við, og sum ikki hava gjørt heimaarbeiði"*.
- **Samskifti, ið snýr seg um truplar næmingar:** Ein svargevi skrivar: *"Tað, sum er mest slítandi, er foreldrasamstarv, um børn ikki trívast ella læra"*.
- **Foreldrafundir og foreldraviðtalur:** Ein svargevi skrivar: *"Ein stór avbjóðing eru foreldrafundir og viðtalur. Hvat skal ein siga? Hvat skal ein ikki siga? Hvussu ærligur skal ein vera? Hvussu skal ein reagera, tá ið foreldur eru ákærandi?..."* Ein annar skrivar: *"Eg merki ikki, at foreldrini hava nóg stóra virðing fyri mær, tá ið tey møta til fundar"*.

9. Toymissamstarv: Ein svargevi skrivar: *"Avbjóðingin er, at ein ikki missir seg sjálvan burtur í toymissamstarvinum. At varðveita síni pedagogisku grundsjónarmið"*. Onnur tosa um *"toymissamstarv, ið ikki fungerar"*.

10. Krøv, ið MMR setur: Ein svargevi skrivar: *"Eg sakni, at myndugleikin hevur álit á læraranum. Alt ov nógv eykaarbeiði er álagt læraranum (námsætlan, landsroynd, PISA). Tykist sum eftirlit heldur enn álit"*.

11. Fundarvirksemi og pappírsarbeiði: Ein svargevi skrivar: *"Fundarvirksemi vindur uppá seg. Pappírsarbeiði – meiri og meiri. Lærarin sleppur minni og minni at undirvísa, og næmingarnir læra av somu grund minni".*

12. Tann fjølbroytti lærararaleikluturin - lærarin sum uppalari: Ein svargevi skrivar: *"Størsta avbjóðingin er at finna javnvágina millum at vera lærari, ráðgevi, vegleiðari, "foreldur", uppalari, sálarfrøðingur osfr.. Sera nógv og stór krøv verða sett lærarum, so tað er torført at fáa tíð til at røkja allar uppgávurnar til fulnar".*

13. Tann stóra ábyrgdin, ið lærarin hevur: Ein svargevi skrivar: *"Eg havi ábyrgd av, hvat tey læra, og hvussu tey trívast. Tað kann vera einsligt, tá ið trupulleikar eru".*

14. At kenna seg ovbyrjaðan: Ein svargevi skrivar: *"Uppgávurnar eru óendaligar, og tað er mark fyri, hvussu nógv arbeiðstrýst ein lærari megnar".* Ein annar skrivar: *"Størsta avbjóðingin er, at ein ikki gerst stressaður. At duga og megna at brúka tíðina skynsamt og at kopla fullkomuliga frá, tá ið ein hevur fyrireikað seg...".*

# Kap. 8

# Undirvísingarsýni og undirvísingarhættir




Ritmynd 103 vísir, at meiri enn helmingurin av svargevunum vilja helst undirvísa í toymi. At lærarar undirvísa í toymi verður framt í nøkrum skúlum í Føroyum. T.e. at ein partur av svargevunum hava roynt at skipa og fremja undirvísing í toymi. Og ein partur av svargevunum hava ikki roynt hetta arbeiðslagið. Kanningin vísir ikki, hvør hevur svarað hvat. Men hon vísir tó, at ein lítil meiriluti heldur, at hetta er vegurin fram.

Ritmynd 103 kann vera eitt tekin um, at 1:1 logikkurin er um at missa takið í føroyska skúlanum. 1:1 logikkurin sigur, at tú skalt hava ein lærara, sum undirvísir einum flokki, í einum flokshøli, í einari lærugrein og í ein skúlatíma í senn.

Tað eru tó framvegis 43% av lærarunum, sum helst vilja undirvísa einsamallir. *(T.e. 47% mannligir svargevar og 40,4% kvinnuligir svargevar.)*

Hvussu tann einstaki lærarin próvgevur fyri, at hann annaðhvørt vil undirvísa "einsamallur" ella "í toymi", sigur henda spurnakanningin einki um.




Ritmynd 104 vísir, at 92,2% av svargevunum halda, at teir hava annaðhvørt "sera stóra ávirkan" ella "stóra ávirkan" á, hvat næmingarnir læra í skúlanum. Við øðrum orðum halda svargevarnir, at tað er neyvt samband millum undirvísingardygd og læruúrtøku. Gongst einum næmingi væl, so metir lærarin, at hann eigur stóran part av æruni. Og gongst einum næmingi illa, so metir lærarin, at hann er atvoldin ella partur av atvoldini. At lærarin heldur seg hava stóra ávirkan merkir somuleiðis, at lærarin heldur seg hava stóra ábyrgd.[27]

---

[27] Talva 90 kann samanberast við úrslitini av TALIS-kanningini. Í *Tilmæli frá arbeiðsbólki í samband við TALIS-kanningarnar* verður skrivað, at "teir allarflestu av teimum spurdu lærarunum (95%) halda... at teir gera ein týdningarmiklan útbúgvingarligan mun í lívi næminganna..." (p. 8)




Ritmynd 105 varpar ljós á ta næminga-, undirvísingar- og læringafatan, ið svargevarnir hava.

Í spurningi 105 høvdu svargevarnir møguleika at seta ein ella tveir krossar. Nógv tann størsti parturin valdi at seta tveir krossar og at vísa á, "at tann undirvísing, ið lærarin skipar" og "tann orka, ið næmingurin leggur í skúlaarbeiðið" hava størstu ávirkan á læruúrtøkuna. Í báðum førum snýr tað seg sum orsøkir og viðurskifti, ið lærarin kann ávirka.

- Lærarin leggur undirvísingina til rættis, hann fremur hana í verki, hann eftirmetir hana og skjalprógvar læruúrslitið. Hetta eru høvuðstættirnir í lærarayrkinum.
- Við sínum didaktisku valum, sínum verumáta og sínum eldhuga kann lærarin somuleiðis kveikja hugin hjá næmingunum, soleiðis at hesir taka skúlaarbeiðið í álvara og leggja stóra orku í tað.

Hvørji foreldrini eru, og hvat tey takast við øðrumegin, og lívfrøðiligar disponeringar hinumegin hava sjálvandi ávísan týdning, men svargevarnir halda ikki, at hesi viðurskifti, sum lærarin ikki kann broyta, hava eins stóran týdning fyri læruúrtøkuna sum viðurskifti, ið hann sjálvur kann ávirka.

Tað eru lutfalsliga fleiri mannligir svargevar, ið siga, at útbúgvingarstøðið hjá foreldrunum hevur størstu ávirkan. Og tað eru lutfalsliga fleiri kvinnuligir svargevar, ið siga, at viðføddu evnini hava størstu ávirkan.

Tað er ikki nakar greiður munur á árgangunum. T.e. at næminga-, undirvísingar- og læringaáskoðanin broytast ikki stórvegis tey fyrstu 5 starvsárini.




Í endamálsorðing fólkaskúlans stendur, hvør uppgáva fólkaskúlans er, og hvat undirvísingartilboð einstaki næmingurin hevur rætt til.

Fólkaskúlalógin er breitt orðað, og tí kann tað vera trupult at svara, hvussu tilvitað ein arbeiðir fyri at náa teimum málum, ið standa í sjálvari endamálsorðingini. Men í spurningi 106 siga 88,3% av svargevunum, at teir annaðhvørt "arbeiða tilvitað" við at náa teimum málum, ið standa í endamálsorðing fólkaskúlans ella gera hetta í "ein ávísan mun".

Um hugt verður at kynsbýti, so siga 23,8% mannligir svargevar og 7,1% kvinnuligir svargevar, at teir ikki geva endamálsorðingini serligan gætur.




Námsætlanirnar vórðu settar í gildi við skúlársbyrjan 2011/2012. Hetta er stutt síðan og hevur ivaleyst havt eina neiliga ávirkan á úrslitið.

Ritmynd 107 vísir tó, at 37,3% av svargevunum siga, at teir hava annaðhvørt "sera stóran kunnleika" ella "stóran kunnleika" til nýggju námsætlanirnar. 48% siga seg "vita

eitt sindur", meðan 14,7% siga seg hava "lítla" ella "onga" vitan um hetta nýggja pedagogiska meginamboðið.

Starvsaldur og kyn hava ikki ávirkan á, hvussu lærarar svara spurninginum.




Ritmynd 108 vísir, at 50% av svargevunum hava fagnað nýggju námsætlanunum og siga, at teir annaðhvørt "í sera stóran mun" ella "í stóran mun" høvdu nýggju námsætlanirnar frammanfyri sær, tá ið ársætlanin 2011/2012 varð orðað. *(T.e. 54% av kvinnuligu svargevunum og 33,3% av mannligu svargevunum).*

27,9% hava nýtt námsætlanirnar "í ávisan mun". Meðan 22,1% hava nýtt námsætlanirnar "í lítlan mun" ella "als ikki". *(T.e. 20% av kvinnuligu svargevunum og 27,8% av mannligu svargevunum).*

Sum prosenttølini vísa, so hava kvinnuligu svargevarnir tikið betur ímóti námsætlanunum enn mannligu svargevarnir.

Lærarar, ið tóku prógv í 2007, 2008 og 2009, nýttu minni nýggju námsætlanirnar sum fyridømi, tá ið teir løgdu ársætlanina fyri 2011/2012, enn lærarar, ið tóku prógv í 2010 og 2011.




Ritmynd 109 vísir, at ársætlanin er ein hornasteinur í lærarastarvinum. 41,9% av svargevunum siga, at teir "í stóran mun" fylgja tí ársætlan, teir leggja við ársbyrjan. 55,4% siga, at teir fylgja ársætlanini "í ein ávísan mun", meðan bara 2,7% siga, at teir ikki fylgja ætlanini.

Starvsroyndir ávirka, hvussu væl ein lærari megnar at fylgja ársætlanini.

- 67,9% av teimum, ið tóku prógv annaðhvørt í 2007 ella 2008 siga, at tey "í stóran mun" fylgja tí ársætlan, tey leggja við ársbyrjan.
- 24,2% av teimum, ið tóku prógv annaðhvørt í 2010 ella 2011 siga, at tey "í stóran mun" fylgja tí ársætlan, ið tey løgdu við ársbyrjan. *(Svargevar viðmerkja, at ársætlanin hjá nýútbúnu lærarunum kann vera annaðhvørt ov framsøkin ella ov lin, ov ítøkilig ella ov lítið ítøkilig).*

Henda spurnablaðakanning upplýsir ikki, hvussu tær ymisku ársætlanirnar síggja út, hvussu nógv ella lítið tær líkjast frá lærara til lærara, frá lærugrein til lærugrein og frá skúla til skúla.[28] Spurnablaðakanningin upplýsir heldur ikki, hvussu nágreiniligar ársætlanirnar eru, ella hvussu yvirskipaðar tær kunnu vera.

Men av tí at 97,3% av svargevunum siga, at teir annaðhvørt í "stóran mun" ella "í ávísan mun" fylgja tí ársætlan, ið verður løgd við skúlaársbyrjan, so er tað sjálvsagt, at ársætlanin eigur at verða nýtt sum grundarlag undir næmingasamrøðum, foreldraviðtalum, eftirmetingarsamrøðum millum leiðslu og einstaka læraran, starvsfólkafundum, ið snúgva seg um vitanarbýti og didaktisk snildarráð. O.ø..

[28] Fleiri svargevar vísa á, at tá ið teir orðaðu ársætlanirnar fyri 2011/2012, so nýttu teir tað skreytblaðið, ið liggur á heimasíðuni hjá MMR sum fyrimynd. (Sí www.mmr.fo) .




Ritmynd 110 vísir okkum, at í nøkrum føroyskum fólkaskúlum, er tað onkur (oftast leiðslan), ið hevur eftirlit við, um lærarar fylgja tí ársætlan, teir løgdu við skúlársbyrjan. Men í rættuliga nógvum skúlum, er tað eingin, ið hevur hesa uppgávu, og tí verður hon ikki framd.

Her eru nýútbúnir lærarar ikki í nakrari serstøðu. Tvørturímóti. 78,6% av teimum svargevum, ið tóku prógv í 2011, siga, at eingin hevði eftirlit við, um teir fylgdu ársætlanini ella ikki. Hetta nýtist ikki at vera tekin um vánaliga undirvísingardygd. Men prosenttølini siga ivaleyst, at nýútbúnir og óroyndir lærarar mangan munnu kenna seg einsamallir, tá ið teir skulu leggja til rættis, fremja, eftirmeta og broyta undirvísingargongdir.




Ritmynd 111 vísir, at svargevarnir eru ikki samdir um, hvussu nýggju námsætlanirnar fara at ávirka undirvísingina í føroyska fólkaskúlanum.

41,6% vænta, at nýggju námsætlanirnar fara at gera undirvísingina annaðhvørt "nógv betri" ella "betri". 55,3% vænta, at nýggju námsætlanirnar fara "hvørki at gera undirvísingina betri ella verri", meðan 3,1% vænta, at nýggju námsætlanirnar fara at gera undirvísingina "verri".

Starvsaldur og kyn hava ikki ávirkan á, hvar svargevarnir seta krossin.

Námsætlanirnar vóru settar í gildi við skúlaársbyrjan 2011/2012, og hava tískil bara verið í gildi í eitt skúlaár, tá ið kanningin varð framd. At námsætlanirnar eru eitt so nýtt og óroynt pedagogiskt amboð skapar eina óvissu millum svargevarnar og ávirkar sjálvandi svarið.




Ritmynd 112 vísir, at 14,2% av svargevunum nýta KT "sera nógv" í undirvísingini. *(T.e. 19% av mannligu svargevunum og 12,5% av kvinnuligu svargevunum).* 32,5% nýta KT "nógv". 44,2% nýta KT "eitt sindur". Og 9,2% nýta KT "lítið" ella "einki". *(T.e. 0% av mannligu svargevunum og 12,5% av kvinnuligu svargevunum).*

Tað er ikki soleiðis, at lærarar, ið hava tikið prógv í 2010 ella 2011 nýta KT meiri enn lærarar, ið hava eitt eldri lærarapróg. Hetta kann vera tekin um, at KT ikki hevur fylt meiri í undirvísingini á læraraskúlanum í tíðarskeiðnum 2007-2011 enn í tíðarskeiðnum 2003-2007.

Við støði í ritmynd 112 kann ein siga, at KT er vorðin sjálvsagdur partur av undirvísingini í føroyska fólkaskúlanum. Tað eru tó munur á, hvussu nógv lærarar nýta KT. Sambært hesi kanning nýta mannligir lærarar sum heild meiri KT í undirvísingini enn kvinnuligir lærarar.

Svargevarar vísa á, at ikki allir føroyskir fólkaskúlar eru eins væl útgjørdir, tá ið tað kemur til samvirknar talvur, teldur, netsamband o.a.. Hetta ger, at møguleikin at nýta KT sum pedagogiskt hjálpiamboð er ikki tann sami allastaðni.

Gevið gætur: Hvussu svargevarnir nýta KT sigur henda spurnablaðakanning einki um.




Ritmynd 113 vísir, hvussu nógv føroyskir lærarar nýta alnetið í undirvísingini.

Prosenttølini eru rættuliga stór. 35,6% av svargevunum siga, at teir nýta alnetið annaðhvørt "fleiri ferðir um dagin" ella "dagliga". *(T.e. 47,6% av mannligu svargevunum og 31% av kvinnuligu svargevunum.)* 47,4% nýta alnetið "1 – 3 ferðir um vikuna". Meðan 17% nýta alnetið annaðhvørt "onkra hendinga ferð" ella "ongantíð". *(T.e. 4,7% av mannligu svargevunum og 21,8% av kvinnuligu svargevunum).*

Við støði í ritmynd 113 ber til at siga, at alnetið er vorðið sjálvsagdur partur av undirvísingini í føroyska fólkaskúlanum. Tað eru tó munur á, hvussu nógv lærarar nýta alnetið. Sambært hesi kanningini nýta mannligir lærarar sum heild meiri google, youtube, wikipedia o.a. í undirvísingini enn kvinnuligir lærarar.

Gevið gætur: Hvussu svargevarnir nýta alnetið, og um alnetið sum innihaldsmið ger undirvísingina betri, sigur henda spurnablaðakanning einki um.




Ritmynd 114 vísir, at tá ið vit tosa um KT-førleika, so eru nýútbúnir lærarar í føroyska fólkaskúlanum í tvíningum.

- 55,9% av svargevunum siga seg vera annaðhvørt "sera stinnan" ella "stinnan". *(T.e. 62% av mannligu svargevunum og 53,6% av kvinnuligu svargevunum).*
- 44,1% siga seg annaðhvørt duga "eitt sindur" ella "lítið". *(T.e. 38% av mannligu svargevunum og 46,4% av kvinnuligu svargevunum).*

Tølini vísa fyrst, at KT-førleiki er rættuliga ymiskur frá einum svargeva til ein annan. Tølini vísa tínæst, at tað eru lutfalsliga fleiri mannligir svargevar, sum meta seg vera "sera stinnar í KT" og lutfalsliga fleiri kvinnuligir svargevar, ið halda seg hava lítlan KT-førleika. Lesarin skal tó vera varugur við, at stórur KT-kunnleiki og at duga at nýta KT sum undirvísingaramboð nýtist ikki at vera tað sama.

Henda spurnablaðakanning sigur einki um, hvar svargevarnir hava lært at nýta KT. KT hevur ivaleyst fingið meiri rúm í onkrum grund- og linjufakum á Føroya læraraskúla enn í øðrum. Men um KT-førleikin hjá svargevunum í høvuðsheitum er mentur á læraraskúlanum ella uttanskúla, sigur henda kanningin einki um.

KT-førleiki sýnist ikki at vera ávirkaður av starvsaldri.




Ritmynd 115 vísir, at 68,5% av svargevunum kenna ikki nakað trýst frá leiðslu og starvsfeløgum um, at teir skulu nýta KT í síni undirvísing. Tølini er óivað tekin um, at KT, eins og aðrir undirvísingarmiðlar og undirvísingarhættir, er partur av námsháttarfrælsinum hjá einstaka læraranum. Heldur lærarin, at KT kann gera undirvísingina betri, so nýtir hann KT, og heldur lærarin ikki, at KT kann leggja nakað afturat og ríka undirvísingina, so nýtir hann ikki KT.

28,9% av svargevunum siga, at teir merkja "eitt ávíst trýst" frá leiðslu og starvsfeløgum. Onkur svargevi viðmerkir, at leiðslan hevur keypt samvirknar talvur og sett tær upp í flokshølinum. Hervið verður trýst óbeinleiðis lagt á læraran um at nýta KT.

2,6% av svargevunum siga, at teir merkja annaðhvørt "sera stórt trýst" ella "stórt trýst". Hetta eru mannligir svargevar.




Ritmynd 116 vísir, at 36% av svargevunum siga, at KT hevur gjørt undirvísing teirra "nógv betri". 48% siga, at KT hevur gjørt undirvísing teirra "betri". Og 16% siga, at KT hvørki hevur gjørt undirvísingina "betri ella verri".

Um vit nærlesa einstøku spurnabløðini við støði í spurningi 112, 113, 114, 115 og 116, so ber til at siga:

- At teir svargevar, ið halda seg hava "sera stóran" ella "stóran" KT kunnleika, nýta KT og alnetið "nógv" í síni undirvísing og halda, at hetta hevur gjørt undirvísingina "nógv betri".
- At teir svargevar, ið halda seg hava rímiligan KT kunnleika, nýta KT og alnetið "nokk so nógv" í undirvísingini og halda, at KT hevur gjørt undirvísingina "eitt sindur betri".
- At teir svargevar, ið halda seg hava "lítlan" KT-kunnleika, nýta KT og alnetið "lítið" í undirvísingini, og halda, at KT hvørki hevur gjørt undirvísingina "betri ella verri".

Við øðrum orðum er tað samanhangur millum KT førleikan hjá einstaka læraranum, og hvørjar undirvísingarmøguleikar hesin sær í kunningartøkni.

Tað skal tó viðmerkjast, at henda spurnablaðakanning ikki varpar ljós á, hvussu einstøku lærararnir nýta KT til at ríka, fjølbroyta og næmingalaga undirvísingina.

## 117. **Hvussu nógv nýtir tú hesar undirvísingarhættir og/ella tilgongdir, tá ið tú undirvísir?**

| | Undirvísingar- og eftirmetingarhættir | Sera nógv | Nógv | Eitt sindur | Onkra hendinga ferð | Als ikki |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 117.1 | Vanlig floksundirvísing/ talvuundirvísing | 25,4% | 56% | 13,3% | 4% | 1,3% |
| 117.2 | Bólkaarbeiði | 3,8% | 39% | 46,8% | 7,8% | 2,6% |
| 117.3 | Evnisarbeiði | 2.6% | 14,3% | 53,2% | 23,4% | 6,5% |
| 117.4 | Verkætlanararbeiði | 1,3% | 7,8% | 25,9% | 32,5% | 32,5% |
| 117.5 | Verkstaðararbeiði | 3,9% | 7,8% | 22,1% | 27,3% | 38,9% |
| 117.6 | Søgutráður (Storyline) | | 2,6% | 16,9% | 19,5% | 61% |
| 117.7 | Samstarvslæra (Cooperativ læring) | 1,4% | 8,1% | 13,5% | 24,3% | 52,7% |
| 117.8 | MI ástøðið hjá Gardner | 2,7% | 8,1% | 32,4% | 16,2% | 40,6% |
| 117.9 | Ástøðið um læringstílar hjá Dunn & Dunn | 1,3% | 4% | 17,7% | 13,5% | 63,5% |
| 117.10 | Fyrireikingar- og eftirmetingarfrymlar: T.d. Hiim og Hippe, SMTTE | | 4% | 14,9% | 18,9% | 62,2% |

Ritmynd 117 vísir fyrst, at svargevarnir nýta rættuliga ymiskar undirvísingarhættir. Onkur lærari nýtir bólkaarbeiði sera nógv, onkur annar nýtir als ikki bólkaarbeiði. Onkur lærari nýtir nógv verkstaðararbeiði, onkur annar nýtir als ikki verkstaðararbeiði. Osfr..

Ritmynd 117 vísir harnæst, at floksundirvísing (talvuundirvísing ella frontalundirvísing) er tann undirvísingarhátturin, ið svargevarnir nýta aloftast. 81,4% av svargevunum siga, at teir nýta vanliga floksundirvísing annaðhvørt "sera nógv" ella "nógv".[29]

Bólkaarbeiði og evnisarbeiði eru somuleiðis undirvísingarhættir, ið ein partur av svargevunum siga seg nýta annaðhvørt "nógv" ella "eitt sindur".

MI-ástøðið hjá Howard Gardner, ið ikki er ein beinleiðis undirvísingarháttur, men heldur eitt ástøði, ið gevur boð um, hvussu ein kann gera undirvísingartilboðið meiri fjølbroytt, verður nýtt av nøkrum svargevum.[30]

Verkstaðararbeiði, verkætlanararbeiði, søgutráður, samstarvslæra og ástøðið um læringstílar verða millum "lítið og einki" nýtt.[31] Allir hesir undirvísingarhættir hava onkursvegna til endamáls at gera einstaka næmingin sjónskari og at næmingalaga undirvísingina.

Fyrireikingar- og eftirmetingarfrymlar sum Hiim og Hippe og SMTTE, ið verða nógv nýttir t.d. í Danmark verða lítið og einki nýttir.[32]

Forfatanin, ið sigur, at nýútbúnir lærarar eru serliga progressivir fyrstu árini og vilja bróta niður vanligan skúlalogikk, sær við øðrum orðum ikki út til at halda. Teir svargevar, ið nýta mest vanliga floksundirvísing eru teir, ið tóku prógv í 2010 og 2011. (Smb. spurning 89).

Um vit hyggja at kyni, so nýta kvinnuligir svargevar sum heild fjølbroyttari undirvísingartilgongdir enn mannligir svargevar. Mannligu svargevarnir nýta í høvuðsheitum bara floksundirvísing, bólkaarbeiði, evnisarbeiði og samstarvslæru.[33]

Um vit samanbera talvu 117 við talvu 47, ið snúði seg um, hvussu stóra vitan svargevarnir høvdu um nevndu undirvísingarhættir, tá ið teir fóru av læraraskúlanum, so ber til at siga:

- At tað í nøkrum førum og hjá nøkrum svargevum er stórt samband millum (1) at hava stóra vitan um ein undirvísingarhætt og (2) at nýta henda undirvísingarháttin í undirvísingini.
- At tað í øðrum førum og hjá nøkrum svargevum er lítið ella einki samband millum (1) at hava stóra vitan um ein undirvísingarhátt og (2) at nýta henda undirvísingarháttin í dagligu undirvísingini.

---

[29] Kanningar vísa, at vanlig floksundirvísing framvegis er mest nýtti undirvísingarhátturin í danska skúlanum og í skúlum í mongum øðrum londum. (Fibæk Laursen & Bjerresgaard, 2009: 99)

[30] MI-ástøðið hevur fylt nógv í teimum linjufaksuppgávum og serlesturuppgávum, ið svargevarnir hava skrivað á Føroya læraraskúla. At tað bara eru 10,8% av svargevunum, ið siga seg nýta MI-ástøðið annaðhvørt "sera nógv" ella "nógv", er allarhelst tekin um, at hetta ástøðið kann vera trupult at umseta til praksiss.

[31] Undirvísingarhættirnir, ið verða nevndir omanfyri, verða ofta blandaðir saman í praksiss.

[32] Í "Tilmæli frá arbeiðsbólki í sambandi við TALIS-kanningarnar" stendur*: "...at Mentamálaráðið ger ein leist, sum lýsir, hvussu vælskipað eftirmeting kann setast í verk. Skúlar gera sína egnu eftirmetingarskipan við støði í leisti frá Mentamálaráðnum."* (s. 12)

[33] Samstarvslæra ella kooperativ læring er ein serlig undirvísingarfatan og tilgongd. Tað finnast fleiri variatiónir av kooperativari læring. Serliga arbeiðið hjá Kagan Spencer og arbeiðið hjá Wendi Jolliffe verða nýtt í skúlum um okkara leiðir. Í viðmerkingunum er tað eyðsæð, at fleiri svargevar blanda heitið samstarvslæra við "vanligt samstarv í bólki".

Nakrir svargevar sýnast við øðrum orðum at duga betur at umseta ástøðiliga og háttalagsliga vitan til ymisk undirvísingarevni og temu enn aðrir.

Lesarin skal vera varugur við, at henda spurnablaðakanning ikki tekur støðu til, hvørt ein fjølbroytt undirvísing er betri ella verri enn ein fábroytt undirvísing, ella um evnisarbeiði, verkstaðararbeiði o.a. er betri ella verri enn frontalundirvísing.




Í spurningi 118 høvdu svargevarnir møguleika at seta tveir krossar. Meirilutin nýtti henda møguleika.

Spurningur 118 er ikki serliga hugaligur lesnaður hjá teimum, ið vara av læraraútbúgvingini.

Ritmynd 118 vísir, at 83,8% av svargevunum halda, at persónsmenskan hjá lærararanum hevur størstu ávirkan á hansara læraraatferð, og hvussu hann undirvísir í dag. Persónsmenskan, ið sigst verða myndað áðrenn 18 ára aldur, er lutvíst lívfrøðiliga disponerað og lutvíst eitt úrslit av teimum relatiónum, ið einstaklingurin hevur verið partur av. Serliga fyrstu relatiónirnar sigast hava serligan týdning. Persónsmenskan er tí liðugt ment, tá ið svargevarnir byrjaðu á læraraskúla.[34]

39,2% av svargevunum siga, at teir starvsfelagar, ið ein hevur havt, síðan ein gjørdist lærari, hava havt størstu ávirkan á teirra læraraatferð, og hvussu teir undirvísa í dag.

[34] Ein svargevi skrivar: *"Vit kunnu ikki læra at vera lærarar. Ein lærari er føddur sum lærari. Tað er ein eginleiki. Við tí fylgir nógv ymiskt. Eitt nú, at lærarin dugir at vera ein leiðari í flokkinum, dugir at vísa, hvar ið mørk eru. Osfr."*.

24,3% siga, at teir lærarar, ið ein hevði í barna- ella miðnámsskúla, hava havt størstu ávirkan á teirra læraraatferð.[35]

Um vit hyggja at starvsaldri og samanbera tey, ið tóku prógv í 2007 við tey, ið tóku prógv í 2011, so sæst:

- At 4 ferðir so nógv av teimum, ið tóku prógv í 2007 siga, at starvsfelagarnir hava havt størstu ávirkan á teirra læraraatferð í dag.
- At 3 ferðir so nógv av teimum, ið tóku prógv í 2011 siga, at teir lærarar, ein hevði í barna- ella miðnámsskúla hava havt størstu ávirkan á teirra læraraatferð í dag.[36]

Við øðrum orðum ber til at siga, at jú styttri ein hevur verið lærari, tess meiri nýtir ein gamlar barnaskúla- og miðnámsskúlalærarar sum fyrimynd, og tess longur ein hevur verið lærari, tess meiri verður ein ávirkaður av starvsfeløgunum og nýtir teir sum fyrimynd. – Í báðum førum er talan um situeraða læring, sosiala læring og kanska eisini meistaralæring.

At so fáir svargevar siga, at tað, tey lærdu á læraraskúlanum og teir lærarar, teir høvdu á læraraskúlanum hevur verið við til at myndað teirra læraraatferð í dag, er óivað tekin um, at tað er alstórur munur á "at undirvísa vaksnum fólki á Føroya læraraskúla" og "at undirvísa børnum í fólkaskúlanum". Hesin munur ger, at undirvísingin á Føroya læraraskúla ikki er fyrimyndarlig ella eksemplarisk, tá ið tað snýr seg um, hvussu ein kann fara til verka í fólkaskúlanum.

Um ein nærlesur spurnabløðini, so sær ein somuleiðis, at tess longur ein hevur verið lærari, tess minni nýtir ein temu, ein arbeiddi við á læraraskúlanum og lærararnar á læraraskúlanum sum fyrimynd.

---

[35] Ein svargevi skrivar: *"Bæði góðir og ringir fólkaskúlalærarar hava ávirkað meg. Teir góðu hava víst mær, hvussu eg skal gera, teir ringu, hvussu eg ikki skal gera".*

[36]Ein donsk granskingarverkætlan vísir, at fyrstaárslærarar sum oftast hava lærarar, ið teir hava havt, áðrenn teir fóru á læraraskúla, sum fyrimynd, tá ið teir skulu skipa sína egnu undirvísing. Háttaløgini og dømini teir nýta í undirvísingini, stava frá teirra egnu skúlagongd og eru ikki fakdidaktiskt grundað. (Lindhart, 2008: 41ff. & Rasch-Christensen, Andreas 2008: 15ff.)




Í hesi spurnablaðakanning verður støðið tikið í starvsaldri og ikki føðiári. Í nógvum spurningum er føðiárið óviðkomandi. Men í spurningi 119 hevur føðiárið týdning. Orsøkin er hon, at tey, ið svara spurnablaðnum eru millum 25 og 55 ár. Hetta merkir, at tá ið tey verða biðin um at samanbera undirvísing í dag við undirvísing, tá ið tey sjálv gingu í skúla, so gingu nøkur í skúla í 1990unum, meðan onnur gingu í skúla í 1960unum. Hetta ávirkar sjálvandi úrslitið, tí skúlin er ein livandi skipan, sum broytist støðugt.

Ritmynd 119 vísir:

- At 40,3% siga, at tann undirvísing, ið tey skipa í dag, er "nógv øðrvísi" enn tann undirvísing, tey sjálv fingu. Um hetta er tekin um, at skúlin hevur broytt seg tey árini, tey hava verið burtur frá fólkaskúlanum, ella um tey eru í ferð við at broyta skúlan, sigur kanningin einki um. Men hesir lærarar kunnu onkursvegna rópast progressivir.
- 5,2% siga, at tann undirvísing, ið tey skipa og standa fyri í dag "líkist nógv" tí undirvísing, ið tey sjálv fingu. Um hetta er tekin um, at skúlin ikki hevur broytt seg serliga nógv hesi árini, ella um tey hava verið nøgd við ta undirvísing, tey sjálv fingu, og ikki hava hug at fremja stórvegis broytingar, sigur kanningin einki um. Men hesir lærarar kunnu rópast siðbundnir.
- Størsti parturin (t.e. 54,5%) sigur tó, at tann undirvísing, ið tey leggja til rættis og fremja í verki, er "eitt sindur øðrvísi", enn tann undirvísing, ið tey sjálv fingu, tá ið tey gingu í fólkaskúla. Hesir lærarar kollrenna ongan undirvísingarlogikk, men skapa eina undirvísing, ið bæði tekur støði í siðvenju og nýggjum tonkum um undirvísing. Hesir lærarar kunnu tískil rópast pragmatiskir. Ritmynd 117 vísti, at floksundirvísing ella frontalundirvísing framvegis er tann undirvísingarháttur, ið fyllir nógv mest í skúlanum. Ein kann tí hugsa sær, at lærarar í hesum bólki nýta frontalundirvísing á ein øðrvísi hátt enn fyrr. Hetta kann m.a. síggjast aftur í huglagnum í flokkinum, samskiftisháttinum, evnunum, ein tosar um, tilfarinum, ein nýtir osfr..




Ritmynd 120 vísir, at ¾ av lærarunum í føroyska fólkaskúlanum meta, at tann undirvísing, teir  skipa og standa fyri í dag, er annaðhvørt "nógv betri" ella "betri", enn tann undirvísing, ið teir sjálvir fingu, tá ið teir gingu í fólkaskúla.

Svarið kann lesast sum ein atfinning ímóti tí skúla og tí undirvísing, ið teir sjálvir hava fingið. - *"Tann undirvísingin, ið eg fekk, var ikki nóg góð".* Ella kann svarið avmynda yrkisligu sjálvsfatanina hja svargevunum. *"Tann undirvísing, ið eg skipi og standi fyri, er dygdargóð".* Ella bæði/og.

Í hesum spurningi er tað týðiligt, at tess longur ein hevur verið lærari, tess vísari er ein í, at tann undirvísing, ein sjálvur skipar, er ein góð undirvísing. Yrkisliga sjálvsfatanin og sjálvsálitið stimbrast sostatt við árunum.




Ritmynd 121 vísir, at teir lærarar, ið koma av Frælsinum, ikki eru liðugt myndaðir og hava ikki ein sementeraðan lærara- og undirvísingarstíl, tá ið teir fáa sítt fyrsta lærarastarv. Hóast svargevarnir bara hava verið í starvi millum eitt og fimm ár, so siga 72,3%, at teir undirvísa annaðhvørt "nógv øðrvísi" ella "øðrvísi" nú, enn tá ið teir vóru nýútbúnir.

Um vit samanbera tey, ið tóku prógv í 2007, við tey, ið tóku prógv í 2011, so sæst:

- At av teimum, ið tóku prógv í 2011, og sum bara hava undirvíst í eitt ár, tá ið kanningin varð framd, so siga 66,7%, at tey undirvísa "nakað øðrvísi" í dag enn tey gjørdu fyrsta hálva árið. 33,3% siga, at tey undirvísa á sama hátt.
- At av teimum, ið tóku prógv í 2007, og sum hava undirvíst í fimm ár, tá ið kanningin varð framd, so siga 15,8%, at tey undirvísa "nógv øðrvísi" í dag, enn tey gjørdu fyrsta árið. 78,9% siga, at tey undirvísa "øðrvísi". Meðan bara 5,3% siga seg undirvísa á sama hátt nú sum av fyrstani tíð.

Um ein hyggur at tølunum sum heild, so kann ein siga, at 100% av teimum, ið siga seg undirvísa "nógv øðrvísi" í dag, enn tá ið tey vóru nýútbúgvin, hava undirvíst í fýra ella fimm ár. 85% av teimum, ið siga seg undirvísa "á sama hátt" í dag, sum tey gjørdu, tá ið tey vóru nýútbúgvin, hava undirvíst í annaðhvørt eitt, tvey ella trý ár. – Hetta merkir, at lærarar, sum hava fleiri undirvísingarroyndir, tora sum frá líður betur at broyta kós, skifta undirvísingarhættir og arbeiðsgongdir.

At arbeiða støðugt við sínum undirvísingarstíli og sínum undirvísingartilgongdum er ikki nakað, ið allir svargevar leggja dent á. Ein stórur fjórðingur av svargevunum sigur seg undirvísa á sama hátt nú sum altíð.

# Kap. 9

# Nútíðarnæmingurin

## 122. Samanber næmingar í dag við næmingar, tá ið tú sjálv/ur gekst í skúla

| | | Ja, nógv betur | Ja, eitt sindur betur | Eingin munur | Nei, eitt sindur verri | Nei, nógv verri | Tað dugi eg ikki at meta um |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 122.1 | Næmingar í dag eru sum heild betur **upplýstir** | 35,4% | 41,7% | 7,6% | 5,1% | | 10,2% |
| 122.2 | Næmingar í dag duga sum heild betur **at lesa** | 7,7% | 23,1% | 42,3% | 7,7% | | 19,2% |
| 122.3 | Næmingar í dag duga sum heild betur **enskt** | 57,5% | 28,7% | 6,3% | | | 7,5% |
| 122.4 | Næmingar hava sum heild størri **tøkniligan førleika** | 83,8% | 13,7% | | | | 2,5% |
| 122.5 | Næmingar í dag duga sum heild betur at **málbera seg á føroyskum** | 2,5% | 8,8% | 32,5% | 27,5% | 12,5% | 16,2% |
| 122.6 | Næmingar í dag hava sum heild **størri kreativan førleika** | 5% | 21,3% | 37,5% | 12,5% | 8,7% | 15% |
| 122.7 | Næmingar í dag duga sum heild betur **at lurta eftir hvør øðrum** | 1,3% | 25% | 31,3% | 18,7% | 8,7% | 15% |
| 122.8 | Næmingar í dag duga sum heild betur **at stava føroyskt** | 2,5% | 10,1% | 41,8% | 16,5% | 1,3% | 27,8% |
| 122.9 | Næmingar í dag duga sum heild betur **at rokna og fáast við tøl** | | 10% | 43,8% | 7,5% | | 38,7% |
| 122.10 | Næmingar í dag hava sum heild størri **sosialan førleika** | | 42,5% | 20% | 17,5% | 5% | 15% |
| 122.11 | Næmingar í dag duga sum heild betur **danskt** | 17,9% | 28,2% | 25,6% | 16,7% | 1,3% | 10,3% |

Í spurningi 122 eru tað lutfalsliga nógvir svargevar, ið siga seg ikki duga at svara spurninginum. Nógv tann størsti parturin, ið ikki dugir at seta krossin, hevur annaðhvørt tikið prógv í 2010 ella 2011, ella hevur ikki roynt at undirvísa í lærugreinum, ið spurningarnir, beinleiðis ella óbeinleiðis, vísa til.

Ritmynd 122 vísir fyrst og fremst, at svargevarnir eru rættuliga ósamdir um, hvørjar førleikar næmingar hava í dag samanborið við, tá ið teir sjálvir gingu í fólkaskúla.

Ósemjurnar kunnu hava ymiskar orsøkir:

- Nakrir svargevar eru 55 ára gamlir í dag og og gingu sostatt í fólkaskúla í 1960unum. Aðrir lærarar eru 25 ára gamlir í dag og gingu í fólkaskúla í 1990unum. Næmingarnir í 1990unum hava óivað havt aðrar førleikar enn næmingar í 1960unum.
- Næmingar í 2012 kunnu vera ymiskir frá bý til bygd, frá skúla til skúla og frá flokki til flokk. T.e. at samanberingargrundarlagið kann vera ymiskt frá einum lærara til annan.
- Tann luppur, ið svargevarnir nýta, tá ið teir eygleiða nútíðarnæmingin, kann vera ymiskur frá einum svargeva til annan. – Tað, ið ein svargevi heldur vera eina dygd, kann ein annar halda vera eina ónollu.

Samanumtikið kann ein tó siga, at nútíðarnæmingurin er betur fyri á nøkrum økjum, enn næmingar vóru fyri nøkrum árum síðan. Nútíðarnæmingurin er m.a. nógv stinnari í enskum, hann hevur størri tøknifrøðiligan førleika, hann er betur upplýstur, hann hevur størri sosialan førleika, hann dugir betur at lurta eftir øðrum, og hann hann dugir betur danskt. Hetta eru ikki neyðturviliga førleikar, ið skúlin tilvitað hevur alt fram seinnu árini. Hetta kunnu eins væl vera førleikar, ið næmingurin hevur ment uttanskúla, og sum eru eitt úrslit av (ella ein spegilsmynd av) tí samfelag, ið næmingurin livir og virkar í. Tann tøknifrøðiliga kollveltingin hevur ivaleyst havt størstu ávirkan.

Ritmynd 122 vísir somuleiðis, at ein meiriluti av svargevunum heldur, at nútíðarnæmingar sum heild duga verri at málbera seg á føroyskum og at stava føroyskt, enn næmingar dugdu fyri nøkrum árum síðan. Aftur her kann ein siga, at úrslitið neyvan stendst av, at fólkaskúlin hevur niðurraðfest undirvísingina í føroyskum seinnu árini. Úrslitið kann harafturímóti koma av, at í tøknifrøðiligu kollveltingini er føroyska málið undir stórum trýsti. Uttanskúla lesa og samskifta børn og ung ivaleyst meiri á enskum og donskum enn á føroyskum, og samskiftisrákið (á SMS, Facebook, Twitter og aðrastaðnis) sýnist vera, at tað er týdningarmiklari at samskifta skjótt og nógv enn at orða seg ræðið og at stava rætt.

## 123. Hevur tú hug at vísa á onkran førleika, ið næmingar hava í dag, sum næmingar ikki høvdu, tá ið tú gekst í fólkaskúla?

Svargevarnir vísa á, at høvuðsmunurin á næmingum fyrr og nú er ikki fakliga grundaður, men snýr seg harafturímóti um (1) hvussu næmingurin førir seg fram í skúlanum, (2) hvussu næmingurin samskiftir við læraran og floksfelagarnar, og (3) tann samveruhátt, ið sermerkir alt virksemið innanskúla í dag.

Svargevarnir eru samdir um, at næmingar í dag eru sum heild nógv fríari, enn næmingar vóru fyri 10 – 20 árum síðan.

- Teir tora betur at taka orðið og at siga sína meining.
- Teir tora betur at leggja fram fyri flokkinum.
- Teir eru opnari. Ein svargevi sigur: *"Teir fortelja rættuliga persónligar søgur fyri bæði floksfeløgum og lærarum".*
- Teir kenna betur síni rættindi – eisini í skúlanum.
- Teir tora betur at siga frá, um eitthvørt er galið. Ein svargevi skrivar: *"Nútíðarnæmingar duga betur at siga frá. T.d. tá ið okkurt er galið í skúlanum. Teir tora betur at siga tað við foreldrini, og foreldrini tora betur at tosa við læraran".*

- Teir seta spurnartekin við ymiskt – m.a. tað, ið lærarin sigur og óskrivaðar reglur, ið hava havt hevd í skúlanum í nógv ár.
- Teir duga betur at multitaska – at vera til staðar á ymiskum pallum samstundis.
- Teir eru rúmligari sum heild. Teir góðtaka, at floksfelagar hava ymiskar meiningar, útsjónd, áhugamál. Ein svargevi skrivar*: "Teir rúma betur ymiskleika – t.d. einum floksfelaga, ið hevur sjónligt brek".* Ein annar skrivar: *"Teir eru meiri tilvitaðir um happing. Og tað er eisini minni happing í dag".* Ein triði skrivar: *"Eg haldi, at teir eru nógv betri vinir, enn vit vóru".*
- Teir góðtaka, at næmingar, ið ganga í sama flokki, ikki nýtast at arbeiða við somu uppgávum í skúlanum. Ein svargevi skrivar*: "Tey skilja betur, at øll ikki eru líka... at øll ikki noyðast at gera tað sama".*
- Teir hava stundum størri førleika á ávísum økjum enn lærarin. Ein svargevi skrivar: *"At ein næmingur í 5. flokki dugir betur at fáast við telduna enn eg, at leita sær vitan á netinum, at tosa enskt... tað er ein pedagogisk avbjóðing".*

Tað eru eisini svargevar, ið siga, at nógvir næmingar í dag eru so fríir, prátingarsamir og upptiknir av sínum egnu áhugamálum, at tað kann tykjast, sum teimun vantar fólkaskikk.




Ritmynd 124 vísir, at svargevarnir eru ójavnir á máli, tá ið teir verða spurdir, um næmingar í dag hava størri ella minni virðing fyri lærarum, enn tá ið teir sjálvir gingu í skúla.

Tá ið ein lesur spurning 124, skal ein leggja upp fyri:

(1) At tá ið tú spyrt, hvussu stóra virðing næmingar høvdu fyri lærarum <u>fyrr í tíðini</u>, so er svarið tengt at skúlagongdini hjá einstaka svargevanum, og hvussu hesin minnist, greiðir og greinar tað, ið fór fram.
(2) At tá ið tú spyrt, hvussu stóra virðing næmingar hava fyri lærarum <u>í dag</u>, so er svarið tengt at undirvísingarroyndunum hjá einstaka svargevanum, og hvussu hesin megnar at stýra teimum flokkum, hann undirvísir.

Men hóast hesi fyrivarni, so er týðiligt, at 30,8% av svargevunum halda, at næmingar í dag hava "eitt sindur minni virðing" fyri lærarum, meðan 23,1% halda, at næmingar í dag hava "nógv minni virðing" fyri lærarum. Hetta eru stór prosenttøl, og tað er ikki

óhugsandi, at hesi tøl eru tekin um, at nógvir nýútbúnir lærarar hava trupult við at fáa tamarhald á flokkinum og at skapa arbeiðsró.[37]

Virðing er við øðrum orðum ikki nakað, ið næmingar hava fyri lærаranum, bara tí at lærarin er lærari. Virðing er nakað, ið einstaki lærarin skal vinna sær ella ogna sær í samveruni við næmingarnar. Hjá nøkrum lærarum hepnast hetta væl, hjá øðrum minni væl.

Nakrir svargevar vísa somuleiðis á, at ein lærari kann vinna sær virðing í einum flokki og ikki í einum øðrum flokki. Virðing snýr seg sostatt ikki bara um, hvør ella hvussu lærarin er, men eisini hvør flokkurin er, og hvussu næmingarnir í flokkinum eru hvør sær og saman.

Starvsaldur og kynsbýti hava ikki stórvegis ávirkan á, hvussu lærarar svara spurningi 124. Um svargevin hevði undirvísingarroyndir áðrenn og í lestrartíðini ella ei, hevur heldur ikki nakra sjónliga ávirkan.




Lærarar, ið hava undirvíst í 4-5 ár, hava nakrar empiriskar royndir, ið gera, at teir eru betur førir fyri at svara spurningi 125, enn lærarar, ið bara hava undirvíst í 1 ella 2 ár. Hetta sæst eisini aftur, tá ið svargevarnir seta krossin:

- 35,3% av teimum, ið tóku prógv í 2011 siga seg ikki duga at svara spurninginum. – Tey hava ov fáar royndir og dømi at vísa til.
- 35,3% av teimum, ið tóku prógv í 2007 og sostatt hava fimm ára royndir sum undirvísarar, siga, at tað í "stóran mun" er soleiðis, at næmingar, ið dugdu væl sum yngri, eisini duga væl, tá ið teir gerast eldri. 58,8% siga, at tað í "ávísan mun" er soleiðis, at næmingar, ið dugdu væl sum yngri eisini duga væl, tá ið teir gerast eldri. Bara 5,9% halda ikki, at tað er nakar samanhangur.

Ritmynd 125 vísir, at svargevarnir sum heild meta, at skúlin megnar at geva teimum fakliga stinnu næmingunum hóskandi avbjóðingar, soleiðis at hesir eisini eru fakliga væl fyri, tá ið teir gerast eldri.

[37] Í "TALIS-kanningini" siga 38% av svargevunum, at teir missa rættiliga nógva tíð upp á næmingar, sum órógva undirvísingina. 25% siga, at teir uppliva nógvan gang í floksstovuni. 33% siga, at tá ið tímin byrjar, gongur rættiliga long tíð, áðrenn næmingarnir eru sissaðir. (s. 49) Í "Tilmæli frá arbeiðsbólki í sambandi við TALIS-kanningarnar" verður skrivað, *"... at næmingaagi (disiplin) og næmingar við atferðartrupulleikum eru ein avbjóðing í føroyska fólkaskúlanum"*. (s. 9)




Ritmynd 126 vísir, at svargevarnir eru ikki samdir, tá ið teir verða spurdir, um næmingar, ið duga illa í yngru flokkunum, eisini duga illa, tá ið teir gerast eldri.

Um ósemjan er hugsjónarliga grundað ella empiriskt grundað, sigur henda spurnablaðakanning ikki nakað beinleiðis um. Men nærlesa vit einstøku spurnabløðini, so er rákið:

- At svargevar, ið hava undirvíst 1-2 ár, halda, at tað ikki nýtist at vera nakar samanhangur millum at duga illa í yngru flokkunum og at duga illa, tá ið ein gerst eldri. *(38,9% av teimum, ið tóku prógv í 2011, siga seg "ikki duga at meta um" hesi viðurskifti. Men av teimum, ið svara, halda 54,5%, at tað ikki er nakar samanhangur, meðan 45,5% halda, at tað er ávíst samband).*
- At svargevar, ið hava undirvíst í 3-5 ár, halda í nógv størri mun, at tað er eitt samband millum teir førleikar, ið einstaki næmingurin hevur, tá ið hann er í grunddeildini, og teir førleikar hann hevur, tá ið hann kemur í miðdeild og hádeild. *(23,5% av teimum, ið tóku prógv í 2007, halda, at tað "í stóran mun" er soleiðis, at næmingar, ið duga illa í yngru flokkunum, eisini duga illa, tá ið teir gerast eldri. 53% halda, at tað "í ávísan mun" er soleiðis, at næmingar, ið duga illa í yngru flokkunum, eisini duga illa, tá ið teir gerast eldri).*

Uppáhaldið, ið sigur, at skúlin ikki megnar at røkka næmingum, ið annaðhvørt koma frá trongum sosialum korum, ella sum ikki hava eins góðar fortreytir at læra sum fjøldin, er ikki serføroysk. Aðrastaðnis hevur ein í nógv ár víst á, at skúlin ikki megnar at útjavna tann mun, ið er á sterkum og veikum næmingum við skúlabyrjan. Endamálið við útjavningini er ikki at gera sterkar næmingar veikari, men at gera veikar næmingar sterkari. Alt prát um tann rúmliga fólkaskúlan, eindarskúlan, næmingalagaða undirvísing, einstaklingsbundnar lesiætlanir osfr. snýr seg onkursvegna um hetta sama. Tann afturvendandi spurningurin ljóðar: Eru pedagogisku amboðini, ið skulu styrkja veiku næmingarnar nóg væl brýnd og hvøss? Um svarið er nei, hvat kann ein so gera?[38]

[38] Í "Tímæli frá arbeiðsbólki í samband við TALIS-kanningarnar" verður skrivað: *"Tímar til serligan tørv skulu altíð verða fullnýttir, soleiðis at næmingarnir fáa sum mest burturúr, og hesir tímar skulu verða lagdir í tímatalvuna, áðrenn hinir tímarnir verða lagdir."* (s. 22)




Ritmynd 127 vísir rættuliga greitt, at meirilutin av svargevunum heldur, at næmingar hava ymiskar gávur, og at ein næmingur, ið dugir væl í eini ella fleiri bókligum lærugreinum, kann duga minni væl í eini ella fleiri handaligum lærugreinum.

Ein svargevi vísir á, at um vit kaga í ummælisbøkurnar hjá næmingunum, so síggja vit, hvussu ymiskt næmingar klára seg frá eini lærugrein til aðra.

Meginparturin av teimum, ið siga seg ikki duga at svara hesum spurningi, hava annaðhvørt bara undirvíst í 1-2 ár, ella hava annaðhvørt bara undirvíst í bókligum ella handaligum lærugreinum.




Ritmynd 128 vísir, at gott og væl 2/3 av svargevunum halda, at næmingar, ið hava foreldur við høgum útbúgvingum, duga betur í skúlanum enn næmingar, ið hava foreldur, ið annaðhvørt hava eina ikki-bókliga útbúgving ella onga útbúgving.

Nærlesur ein einstøku spurnabløðini, so sær ein, at tess longur ein hevur verið lærari, tess størri samanhang sær ein millum útbúgvingarstøðið hjá foreldrunum og fakligu

førleikarnar hjá næmingunum. *(68,4% av teimum, ið hava undirvíst í fýra ella fimm ár, og sum hava lutfalsliga nógvar empiriskar royndir, vísa á, at næmingar, ið hava vælútbúgvin foreldur "duga sum heild betur" í skúlanum. 53,3% av teimum, ið tóku prógv í 2011, og sum hava lutfalsliga fáar empiriskar royndir í skjáttuni, halda, "at tað er eingin munur").*

At 67,2% av svargevunum halda, at útbúgvingarstøðið hjá foreldrunum hevur ein ávísan týdning, samsvarar væl við kanningar úr øðrum londum.[39] Um orsøkin er sosialur arvur, bókligur stuðul heimanífrá ella lívfrøðiligar disponeringar eru granskarar ójavnir á máli um.

## 129. Er spennið millum sterkastu næmingarnar og veikastu næmingarnar stórt í teimum flokkum, tú undirvísir?




Ritmynd 129 vísir, at 94,8% av svargevunum siga, at spennið millum sterkastu næmingarnar og veikastu næmingarnar í flokkinum er annaðhvørt "sera stórt" ella "stórt".

Næmingarnir hava tískil sera ymiskar lærufortreytir, tá ið skúlaárið, skúlavikan, skúladagurin og einstaki skúlatímin byrjar. Teir hava tískil tørv á ymiskum avbjóðingum, innihaldi, arbeiðshættum, kørmum osfr.. Og sambært fólkaskúlalógini er tað álagt einstaka læraranum at taka atlit til einstaka næmingin, tá ið undirvísingin verður løgd til rættis.

Hetta er ein stór avbjóðing hjá nýútbúnum lærarum.

---

[39] Ein donsk granskingarverkætlan, ið var framd í 2005, og sum snúði seg um at rokna prókvtalsúrslit hjá donskum 9. floksnæmingum, vísti, (1) at hava foreldrini onga útbúgving, so er miðaltalið hjá børnunum í støddfrøði  7,5 og í donskum 7,6; (2) at hava foreldrini eina yrkisútbúgving, so er miðaltalið hjá børnunum í støddfrøði 7,9 og í donskum 8,0; (3) at hava foreldrini eina miðallanga útbúgving, so er miðaltalið hjá børnunum í støddfrøði 8,2 og í donskum 8,3; (4) at hava foreldrini eina kandidatútbúgving, so er miðaltalið hjá børnunum í støddfrøði 8,9 og í donskum 9,0; og (5) at hava foreldrini eina granskaraútbúgving, so er miðaltalið hjá børnunum í støddfrøði 9,3 og í donskum 9,2. (Olsen, 2007: 10) Føroyska PISA-kanningin 2009 vísir eisini greitt samband millum útbúgvingarstøðið hjá mammuni og lesiførleikan og førleikan í støddfrøði hjá næmingunum. (PISA 2009 – Føroyar: s. 14)




Ritmynd 130 vísir, at munurin millum sterkastu og veikastu næmingarnar í einum og sama flokki kann vera rættuliga stórur.

21,6% av svargevunum siga, at munurin á sterkastu og veikastu næmingunum er millum ½ og 1 floksstig. 58,1% siga, at munurin er annaðhvørt 2 ella 3 floksstig. Meðan 20,3% siga, at munurin er annaðhvørt 4 floksstig ella fleiri.

At fakliga spennið í einum og sama flokki er so vítt ger undirvísingaruppgávuna sera kravmikla, bæði tá ið tað snýr seg um at lýsa endamálið fyri einstaka tíman, at finna evni, at velja tilfar, at hava felagsupplegg á talvuni og at samskifta við flokkin sum heild. Sjálvt um tú undirvísir í 4. flokki, so skalt tú bæði minnast til næmingin, ið er á 2. floks stigi og næmingin, ið er á 5. ella kanska 6. floks stigi.

Ein svargevi skrivar sum viðmerking, at munurin kann verða stórur longu í 1. flokki, men rákið er, at tess eldri næmingarnir gerast, tess størri gerst munurin.




Í spurningi 131 ger ein ikki mun á næmingum, ið hava innlæringartrupulleikar og afterðartrupulleikar. Lesarin skal tó vera varugur við, at tað finnast næmingar, ið hava innlæringartrupulleikar og ikki atferðartrupulleikar. Tað finnast næmingar, ið hava

atferðartrupulleikar og ikki innlæringartrupulleikar. Og tað finnast næmingar, ið hava bæði innlæringar- og atferðartrupulleikar.

Ritmynd 131 vísir annaðhvørt:

- At flokkar eru sera ymiskir – t.e. at tú hevur flokkar, har tað eru lutfalsliga fáir næmingar, ið hava trupulleikar, og tú hevur flokkar, har tað eru lutfalsliga nógvir næmingar, ið hava trupulleikar.
- At lærarar eru ymiskir – t.e. at tað er ymiskt frá einum lærara til annan, hvat viðkomandi sær og velur at flokka sum annaðhvørt innlæringar- ella atferðartrupulleikar.

Men lesur ein ritmynd 131 bókstaviliga, so siga svargevarnir, at tú hevur flokkar, har 30% av næmingunum hava annaðhvørt innlæringar- ella atferðartrupulleikar. Siga vit, at tað ganga 24 næmingar í einum tílíkum flokki, so hava millum 7 og 8 næmingar innlæringar og/ella atferðartrupulleikar. At hava til uppgávu at leiða ein tílíkan flokk krevur serligt didaktiskt hegni.

Í øðrum flokkum hava undir 10% av næmingunum innlæringar- og/ella atferðartrupulleikar. Siga vit, at tað ganga 24 næmingar í einum tílíkum flokki, so hevur annaðhvørt eingin, ein ella tveir næmingar innlæringar- ella atferðartrupulleikar. At hava til uppgávu at leiða ein tílíkan flokk er mikið léttari.

Men samanumtikið kann ein siga, at í einum miðal føroyskum flokki, ið telur 24 næmingar, so hava umleið 4 næmingar annaðhvørt innlæringar- ella atferðartrupulleikar.

50% av teimum, ið tóku prógv í 2011, siga, at millum 20-30% av teimum næmingum, ið teir undirvísa, hava annaðhvørt innlæringar- ella atferðartrupulleikar. Stóra prosenttalið kann lýsa støðuna, soleiðis sum hon í roynd og veru er, men kann eisini vera tekin um vantandi hegni og royndir at leiða og stýra einum flokki.




Ritmynd 132 vísir, at flokkar eru sera ymiskir. Í nøkrum flokkum hevur fjórði hvør næmingur serliga góð evni at læra. Í øðrum flokkum hevur minni enn tíggjundi hvør næmingur serligar gávur.

Men rokna vit miðatalið, so hava gott og væl 20% av næmingunum serliga góð evni at læra. Ganga 24 næmingar í flokkinum, so kunnu vit siga, at um 5 næmingar hava tørv á serliga stórum fakligum avbjóðingum.

Samanbera vit ritmynd 131 við 132, so sæst, at í einum miðal flokki eru tað lutfalsliga fleiri næmingar, ið hava serliga góð evni at læra, enn tað eru næmingar, ið hava annaðhvørt innlæringar- ella atferðartrupulleikar.

Samanbera vit, hvussu fýra tilvildarligir svargevar hava svarað spurningi 131 og 132, so sæst, at undirvísingaravbjóðingarnar kunnu vera sera ymiskar frá flokki til flokk.

| | Tal av næmingum, ið hava annaðhvørt innlæringar- ella atferðartrupulleikar | Tal av næmingum, ið hava serliga góð evni at læra |
|---|---|---|
| 1 | 10% | 30% |
| 2 | 30% | 10% |
| 3 | 10% | 10% |
| 4 | 30% | 30% |

Tá ið ein lesur ritmynd 131, 132 og ritmyndina omanfyri, skal ein vera greiður yvir, at prosenttølini eru ikki objektiv. Tey siga einki um, hvussu nógvir næmingar hava ein diagnostiskan trupulleika. Og tey siga heldur einki um, hvussu nógvir næmingar í roynd og veru eru serliga gávaðir. Tølini siga, hvussu svargevarnir uppfata teir næmingar, teir undirvísa. Og hvussu svargevarnir av somu orsøk verða noyddir at skipa og gjøgnumføra undirvísingina.




Ein lærari, ið hevur ábyrgd av 24 næmingum, má raðfesta sína tíð. Tveir lærarar, ið hava ábyrgd av 40 næmingum ella fleiri, verða somuleiðis noyddir at raðfesta tíðina.

Ritmynd 133 vísir, at 95% av svargevunum siga, at teir næmingar, ið duga "verri enn miðal", eru mest tíðar- og orkukrevjandi. Hesir næmingarnir fáa við øðrum orðum mest eftirsketni frá lælraranum, og hann nýtir lutfalsliga mest tíð at fáa hesar næmingarnar at arbeiða við skúlauppgávuni.

Sjálvt um tað eru lutfalsliga nógvir næmingar, ið ikki hava eins lætt við at læra sum restin (sí ritmynd 129, 130 og 131), so er talan framvegis um ein minniluta í flokshølinum. Ein spurningur, sum tískil eigur at verða kannaður nærri, er, um miðalnæmingar og kanska serliga næmingar, ið duga betur enn miðal, eru við skerdan lut í flokkum, har nógvir floksfelagar hava sernámsfrøðiligan tørv.[40]




Ritmynd 134 vísir okkum, at eingin svargevi sigur, at hann megnar "sera væl" at geva øllum næmingunum, hann undirvísir, hóskandi avbjóðingar. – Hetta er tekin um, at uppgávan er sera trupul.

- 1/3 av svargevunum sigur, at teir megna "nokkso væl" at næmingalaga undirvísingina.
- 2/3 annaðhvørt "ivast í", um teir megna at næmingalaga undirvísingina ella siga beinleiðis, at tað megna teir ikki.

Hetta merkir við øðrum orðum, at tað er ikki samanhangur millum teir førleikar og tey amboð, ið svargevarnir hava til at fremja eina einstaklingsrættaða undirvísing og tað lógarásetta krav, ið sigur, at undirvísingin skal vera einstaklingsrættað ella næmingalagað.

Tvær tilgitingar kunnu tískil setast upp:

- Hin fyrra sigur: At didaktisku førleikarnir hjá nýútbúnum lærarum eru ikki nóg væl mentir.
- Hin seinna sigur: At næmingarnir í føroyska fólkaskúlanum eru so ymiskir, og fakliga og atferðarliga spennið er so vítt, at tað er ógjørligt at røkka hvørjum

[40] Ein niðurstøða í PISA-kanningini 2009 er, at vit hava lutfalsliga fáar næmingar, ið klára seg sera væl. Í frágreiðingini stendur m.a.: *at einans 6,7% av føroyskum næmingum hava lesiførleika á stigi 4 ella hægri. Tað vil siga, at einans 6,7% av føroysku næmingunum (umleið 50 næmingar) eru mettir at vera góðir ella sera góðir lesarar. Hetta talið er fyri Danmark 25,6 og Ísland 30,4%.* (PISA 2009 – Føroyar: s. 12)

einstøkum. Nýtir tú ov nógva tíð og orku at røkka einum ella nøkrum næmingum, so missir tú aðrar.

Um hugt verður at starvsaldri, so sæst, at tað eru lutfalsliga fleiri av teimum, ið tóku prógv í 2007, 2008 og 2009, ið siga seg megna "nokkso væl" at næmingalaga undirvísingina. Hetta kann vera tekin um, at við árunum gerast lærarar betri til at skapa eitt fjølbroytt undirvísingartilboð.




Ritmynd 135 vísir, at 3,9% av svargevunum halda, at tað ber "sera væl til" at laga undirvísingina til stigið og tørvin hjá einstaka næminginum. At tað eru so fá, ið svara "sera væl", er tekin um, at uppgávan er sera trupul at loysa.

61% av svargevunum siga tó, at teir halda, at tað "í ein ávísan mun" ber til at næmingalaga undirvísingina. Somu lærarar, sum í spurningi 134 søgdu, at teir ivast í, um teir megna at næmingalaga undirvísingina, siga nú, at tað eigur at bera til "í ein ávísan mun".

Ein svargevi viðmerkir í hesum sambandi: "*Eg klári ikki nóg væl at næmingalaga undirvísingina sum nú er, men verði eg betur skúlaður, so haldi eg, at eg kann læra hetta".*

Í hesi útsøgn hómast eitt ávíst didaktiskt bjartskygni.




Ritmynd 136 vísir, at svargevarnir eru sera ivasamir, tá ið teir verða spurdir, um tað er pedagogiskt rætt, at næmingar, ið annaðhvørt hava innlæringartrupulleikar ella atferðartrupulleikar, skulu undirvísast saman við næmingum, ið hvørki hava innlæringar- ella atferðartrupulleikar.

Bara 16,2% av svargevunum siga, at tað er skilabesta loysnin at undirvísa øllum næmingum í sama flokshøli. 50% siga seg ivast í, hvat er rættast at gera. Meðan 33,8% halda ikki, at tað er rætt, at næmingar, ið hava innlæringar- og/ella atferðartrupulleikar, verða undirvístir saman við javnaldrunum. - Um hesi 33,8% hugsa um, hvat er rættast fyri næmingin við serligum tørvi/atburði, ella hvat er rættast fyri floksfelagarnar, sigur henda spurnakanningin einki um.[41]

Starvsaldur og kyn hava ikki stórvegis ávirkan á, hvussu lærarar svara spurningi 136.

Prosenttølini í ritmynd 136 eru greið: Ein stórur partur av svargevunum avvísir ikki, at í framtíðini eigur størri partur av virksemi skúlans at verða næmingadifferentierað[42] heldur enn undirvísingardifferentierað.[43] – Hetta sjónarmið stríðir ímóti eindarskúlanum og tonkum um integreraða og inkluderandi námsfrøði. At fremja eina slíka pedagogiska snaring innanfyri núverandi lógarkarm krevur nýhugsan og gott didaktiskt handalag.

[41] Í fólkaskúlalógini § 13 stk. 4 & 5 stendur: *"Undirvísingin kann eisini verða skipað í bólkum í hvørjum flokki og millum flokkar og floksstig. Henda skipan kann verða sett í verk av praktiskum ella námsfrøðiligum orsøkum. Næmingarnir skulu á øllum floksstigum verða undirvístir í sínum flokki størsta partin av undirvísingartíðini og kunnu í mesta lagi helvtina av samlaðu undirvísingartíðini verða undirvístir í skipaðum bólkum uttan fyri flokkin."*

[42] Næmingadifferentiering merkir, at næmingar verða býttir í flokkar ella bólkar eftir fakligari styrki. Teir veiku eru fyri seg, miðalnæmingarnir eru fyri seg, og teir sterku næmingarnir eru fyri seg. Næmingadifferentiering er ikki ókent í føroyskari skúlasøgu. Í 1970unum hevði tú real fyri teir stinnaru næmingarnar og 8., 9. og 10 flokk fyri teir veikaru. Í 1980unum hevði tú í nøkrum lærugreinum víðkað skeið fyri teir sterkaru næmingarnar og grundskeið fyri teir veikaru.

[43] Undirvísingardifferentiering merkir, at allir næmingarnir skulu undirvísast í sama rúmi, men undirvísingin skal skipast soleiðis, at bæði veikir, miðal og sterkir næmingar fáa hóskandi avbjóðingar. Logikkurin er, at undirvísingin skal lagast til næmingarnar, heldur enn at næmingurin skal laga seg til eina undirvísing og eitt pensum, ið er lagt fast frammanundan.

# Kap. 10

# PISA-kanningin og landsroyndin




Ritmynd 137 vísir, at lærarar eru ikki heilt samdir, um høvuðsuppgáva skúlans er at menna fakligu førleikarnar hjá næmingunum ella at menna næmingarnar í síni heild.

Hyggur ein at starvsaldri, so sæst:

- At 76,5% av teimum, ið tóku prógv í 2011, siga, at høvuðsuppgáva skúlans er, "at menna næmingarnar í síni heild".
- At 72,2% av teimum, ið tóku prógv í 2007, siga, at høvuðsuppgáva skúlans er, "at menna fakligu førleikarnar hjá næmingunum".

Fleiri svargevar, ið hava undirvíst í nøkur ár, viðmerkja, at alsamt fleiri uppgávur verða lagdar á skúlan, og hetta hevur ta fylgju, at tíðin, ið eigur at verða nýtt til fakliga djúphugsan, minkar støðugt. Hetta rák ávirkar bæði undirvísingardygd og læruúrtøku.

Útsagnirnar hjá teimum, ið hava verið lærarar í nøkur ár, skulu neyvan skiljast soleiðis, at hesin bólkur vil sleppa undan teimum uppalingaruppgávum, ið eru – og altíð fara at vera - ein samfastur partur av lærarastarvinum. Útsagnirnar eru heldur eitt tekin um, at svargevar, ið tóku prógv í 2007, vilja undirstrika, at høvuðsuppgáva skúlans er undirvísing og við undirvísingini at menna fakligu førleikarnar hjá næmingunum.




Tað er ein sannroynd, at føroysku PISA-úrslitini hava verið serstakliga soltin, bæði tá ið tey verða samanborin við Danmark, Ísland, Noreg og Svøríki, ið hava skúlaskipanir, ið ikki eru so ólíkar okkara, og tá ið tey verða samanborin við lond, ið hava skúlaskipanir, har testmentanin er meiri framráðin.

Tá ið svargevarnir í spurningi 138 verða spurdir, um løku PISA-úrslitini eru tekin um, at hin føroyski fólkaskúlin er ein ringur skúli, so svara 7 út av 10 lærarum "nei". Hetta merkir, at svargevarnir hava ta fatan, at PISA-kanningin ikki megnar at máta tað, ið ein tekst við í føroyska fólkaskúlanum, og ta vitan og teir førleikar, ið næmingarnir ogna sær tey 9 undirvísingarárini.

PISA-kanningin mátar okkurt annað.




Ritmynd 139 sigur fyrst, at svargevarnir eru í tvíningum. 37,3% halda, at PISA-kanningin er annaðhvørt ein "sera eftirfarandi" kanning ella ein "nokkso eftirfarandi" kanning, meðan 62,7% halda ikki, at PISA-kanningin er eftirfarandi.

Politiski myndugleikin í Føroyum hevur avgjørt, at føroyskir næmingar skulu til PISA-kanning triðja hvørt ár, og at úrslitið skal samanberast við úrslit úr øðrum londum. PISA-kanningin er kostnaðarmikil, men orsøkin til, at politiski myndugleikin velur at nýta tíð,

orku og pening  at fáa PISA-kanningina framda í Føroyum, er ivaleyst, at hildið verður, at  PISA-kanningin er ein dygg og álítandi kanning, ið kann varpa eitt rættuliga objektivt ljós á, hvussu støðan er í føroyska fólkaskúlanum.

Tað kann tí vekja undran, at 62,7% av nýútbúnum lærarum í føroyska fólkaskúlanum, sum hava ábyrgd av at undirvísa teimum næmingum, ið fyrr ella seinni skulu PISA-kannast, halda kanningina vera óálítandi.

Henda spurnablaðakanning tekur ikki støðu til, hvørjar dygdir og hvørjar veikleikar PISA-kanningin hevur. Men ritmynd 139 vísir greitt, at vit hava eina stóra ósemju millum politiska myndugleikan øðrumegin og ein stóran part av nýútbúnu lærarunum hinumegin. Og henda ósemjan má loysast, um nakað høpi skal vera í. Er endamálið, at føroysku PISA-úrslitini skulu gerast betri, so má politiski myndugleikin og føroyskir lærarar tosa saman, tosa sama mál, leggja eina felags ætlan og lyfta í felag. Er semja hinvegin um, at PISA-kanningin ikki er ein eftirfarandi kanning, ið sigur nakað um dygd og veikleikar í føroyska fólkaskúlanum, so eigur PISA-kanningin at verða strikað.

**140. Hevur tú undirvíst einum flokki, annaðhvørt í føroyskum, støddfrøði ella N/T (t.e. lívfrøði, landalæru, alis- og evnafrøði), sum hevur verið til PISA-kanning?**




Ritmynd 140 vísir, at 25% av svargevunum hava undirvíst næmingum, ið eru vorðnir PISA-kannaðir. *(T.e. 31,6% av svargevunum, ið tóku prógv í 2007; 25% av svargevunum, ið tóku prógv í 2008; 23,1% av svargevunum, ið tóku prógv í 2009; 27,8% av svargevunum, ið tóku prógv í 2010 og 11,8% av svargevunum, ið tóku prógv í 2011).*

Í øllum førum hava svargevarnir yvirtikið flokkar lutfalsliga seint í skúlagongdini, ið skulu PISA-kannast.

Um vit hyggja at kyni, so hava 31,8% av mannligu svargevunum undirvíst flokkum, ið hava verið til PISA-kanning, meðan 21,1% av kvinnuligu svargevunum hava undirvíst flokkum, ið eru PISA-kannaðir.




Ritmynd 141 vísir, at svargevarnir eru í tvíningum.

- 35% av svargevunum siga seg skipa undirvísingina øðrvísi tey ár, PISA-kanning er á skránni.[44]
- 65% av svargevunum siga seg ikki skipa undirvísingina øðrvísi tey ár, næmingarnir skulu PISA-kannast.

Um vit hyggja at starvsaldri, so siga 83,3% av teimum, ið tóku prógv í 2007, at tey ikki skipa undirvísingina øðrvísi tað árið, PISA-kanningin verður framd, meðan 57,1% av teimum, ið tóku prógv í 2010 og 2011 siga, at PISA-kanningin ávirkar undirvísingarætlanina.

Hesi tøl benda á, at tess styttri ein hevur starvast sum lærari, tess størri virðing hevur ein fyri PISA-kanningini, og tess meiri háva ger ein burturúr. Og tess longur ein hevur verið lærari, tess minni virðing hevur ein fyri PISA-kanningini, og tess minni letur ein kanningina ávirka dagligu undirvísingina.

[44] Tað er alkent, at PISA-kanningin er ein rættuliga afturlatin kanning. Hetta merkir, at lærarar fáa ikki kunnleika um og innlit í, hvussu uppgávurnar verða orðaðar. Tað er somuleiðis alkent, at nakrar PISA-uppgávur verða strikaðar og vrakaðar triðjahvørt ár. Hesar uppgávur eru almennar, og nakrir svargevar vísa á, at undan PISA-kanningini sita næmingar og loysa hesar uppgávur.




Tað er alkent, at PISA-kanningin er ein sera afturlatin kanning. Tað sæst eisini aftur í ritmynd 142, har 46,9% siga seg vita “eitt sindur” um teir spurningar og tær uppgávur, ið sett verða í PISA-kanningini, meðan 45,6% siga seg vita “lítið og einki”.




Um ein samanber ritmynd 143 við ritmynd 139, so er eitt ávíst tvílyndi at hóma millum svargevarnar. Sjálvt um ein greiður meiriluti í spurningi 139 ikki heldur, at PISA-kanningin er ein álítandi kanning, ið sigur nakað um undirvísingardygdina í føroyska fólkaskúlanum, so siga 46,5% av svargevunum í spurningi 143, at lærarin í føroyskum, støddfrøði og N/T hevur annaðhvørt “sera stóra ávirkan” ella stóra ávirkan” á, hvussu næmingarnir standa seg í PISA-kanningini. 46,5% av svargevunum siga, at lærarin hevur “eitt sindur av ávirkan”, meðan bara 7% siga, at lærarin og tann undirvísing, hann skipar, hevur “lítla” ella “onga” ávirkan á PISA-úrslitið.




Ritmynd 144 vísir heilt greitt, at nærum ¾ av svargevunum halda ikki, at PISA-kanningin og føroysku PISA-úrslitini kunnu nýtast sum ein forsøgn, ið sigur, hvussu føroyska samfelagið fer at standa seg í altjóða kappingini í framtíðini.

At knýta nútíð og framtíð saman er ein grundtanki í PISA-uppkastinum.[45] Hetta er sjálvt grundstøðið, ið PISA-kanningin byggir á. Í einum altjóðagjørdum heimi, har tøkniligir førleikar gerast støðugt týdningamiklari, verða hollur lesiførleiki, hollur førleiki í støddfrøði og hollur førleiki í N&T modulásin í samfelagsbúskapinum. Tí verður førleikin í hesum trimum lærugreinunum mettur.

Eftir seinastu PISA-kanning vóru umboð fyri OECD frammi og vístu á væntaða sambandið millum PISA-úrslitið hjá einum landi í dag og bruttotjóðarúrtøkuna hjá sama landi um nøkur ár.

Hesi forsøgn trúgva 70,7% av svargevunum ikki.

Henda spurnablaðakanning tekur ikki støðu til, um PISA-uppkastið er eftirfarandi ella ikki. Men tað er enn einaferð undranarvert, at ein so stórur partur av svargevunum, ið fyrr ella seinni skulu undirvísa næmingum, sum skulu PISA-kannast, halda so lítið um kanningina.

Her er ikki samheingi millum politikk og pedagogikk.

[45] Í frágreiðingini "PISA 2009 – Føroyar" verður skrivað: *"Í PISA verður dentur lagdur á, at kanna næmingaførleika í einum samfelagsligum høpi. Endamálið er at máta tað, sum tey 15 ára gomlu hava lært og hava tørv á at duga fyri at klára seg seinni í útbúgving, í arbeiði og í familju- og samfelagslívi. PISA er ikki ætlað til at máta førleikar, sum lesiætlanir í skúlunum leggja upp til, men at meta um, hvussu væl tey ungu megna at brúka teirra vitan í mun til avbjóðingar í vanliga lívinum."* (s. 4)

**145. Finland, Singapore, Korea og Kina standa seg væl í PISA-kanningini. Heldur tú, at vit eiga at broyta føroyska skúlan soleiðis, at hann fer at líkjast meiri grundskúlunum í hesum londum?**




Í spurningi 145 eru lærarar aftur í tvíningum. 60,1% halda ikki, at vit skulu hyggja at, hvussu skúlar í londum, ið standa seg væl í PISA-kanningini, eru skipaðir, og royna at nýta hesar sum fyridømi. – Av tí at londini, ið eru nevnd í spurningi 145, bæði søguliga, mentanarliga, politiskt, útbúgvingarliga og undirvísingarliga eru so nógv øðrvísi enn okkara, so hevði tað undir øllum umstøðum verið ómøguligt at margfaldað og nýtt teirra skipanir.

Men sum ritymynd 145 vísir, so halda 4 út av 10 lærarum, at føroyski skúlin treingir til at verða endurskoðaður, og at størri faklig krøv eiga at verða sett næmingunum.

**146. Hevur tú undirvíst 4. ella 6. flokki annaðhvørt í føroyskum, støddfrøði ella N/T, síðan landsroyndirnar vóru settar í verk?**




Ritmynd 146 vísir, at 52,5% av svargevunum hava undirvíst næmingum, ið hava verið til landsroynd. *(T.e. 72,7% av mannligu svargevunum og 46,4% av kvinnuligu svargevunum).*

50% av teimum, ið tóku prógv í 2011, undirvístu skúlaárið 2011/2012 flokkum, ið vóru til landsroynd. Hesir nýútbúnu lærarar hava sostatt yvirtikið flokkar annaðhvørt í 4. flokki ella í 6. flokki, sum skulu til landsroynd.

Fleiri svargevar vísa á, at landsroyndarúrslitið endurspeglar ikki bara tað, ein næmingur lærir í 4. ella 6. flokki í føroyskum, støddfrøði og N&T, men alt tað, ið næmingurin hevur lært (ella ikki hevur lært) árini frammanundan.




Ritmynd 147 vísir, at teir svargevar, ið undirvísa í føroyskum, støddfrøði ella N/T í 4. ella 6. flokki kenna rættuliga væl teir spurningar og tey uppgávusløg, ið landsroyndin fevnir um.

Um vit hyggja at starvsaldri, so vita allir svargevar, ið tóku prógv í 2007, og sum tískil hava undirvíst í 5 ár, annaðhvørt "sera nógv" ella "nógv" um innihaldið í landsroyndini. 40% av teimum, ið tóku prógv í 2011, siga seg annaðhvørt vita "eitt sindur" ella "einki" um innihaldið í landsroyndini.




Ritmynd 148 vísir, at 14,3% av svargevunum "í stóran" mun skipa undirvísingina í føroyskum, støddfrøði og N&T soleiðis, at næmingarnir skulu klára seg væl í landsroyndini. 69% siga, at landsroyndin "í ein ávísan mun" ávirkar undirvísingarætlanina. Meðan 16,7% siga, at landsroyndin ikki hevur nakra ávirkan á, hvussu dagliga undirvísingin verður løgd til rættis.

Á hvønn hátt landsroyndin ávirkar dagligu undirvísingina, sigur spurningur 148 einki um.




Ritmynd 149 vísir, at tað er nýggj siðvenja í føroyska fólkaskúlanum, at lærarar venja gamlar landsroyndir við næmingunum tað árið, tá ið landsroyndin er á skránni.

Lærarar, ið hava undirvíst í 1 ár, venja ikki eins nógv og lærarar, ið hava undirvíst í 2-5 ár. T.e. at landsroyndarvenjing er ein partur av tí stigvísu sosialisering ella tillaging, ið hendir, tá ið ein nýútbúgvin lærari kemur í starv.

Um vit hyggja at kynsmuni, so sæst:

- At 37,5% av mannligu svargevunum venja "í stóran mun" gamlar landsroyndir.
- At 22,2% av kvinnuligu svargevunum venja "í stóran mun" gamlar landsroyndir.[46]

Um hesin kynsmunur er tilvild, ella um hann er tekin um, at kappingarlyndið í manninum sum heild er størri enn kappingarlyndið í kvinnuni, sigur henda spurnablaðakanning einki um.




Í spurningi 150 høvdu svargevarnir møguleika at seta tveir krossar. Nógvir svargevar nýttu henda møguleika.

Ritmynd 150 vísir, at tað er ymiskt, hvat einstøku svargevarnir nýta landsroyndarúrslitið til.

Meirilutin nýtir úrslitið til at fáa vitan um, hvat einstaki næmingurin dugir, og hvat hann ikki dugir her og nú *(t.e. summativ eftirmeting*), og hvussu ein kann leggja undirvísingina til rættis frameftir *(t.e. formativ eftirmeting).*

Men tað eru eisini svargevar, ið nýta landsroyndina til annaðhvørt at samanbera sín flokk við aðrar flokkar og harvið meta um dygdina í síni egnu undirvísing *(t.e. sjálvs- ella læraraeftirmeting),* ella at samanbera næmingarnar í sínum egna flokki *(t.e. próvtals-eftirmeting).*

[46] Í "Landsroyndin 2011 – Frágreiðing um mál, ávegis mál, uppgávur og úrslit" stendur at lesa: *"Royndarúrslitini fyri alt landið í 4. flokki vísa eina støðuga framgongd í einstøkum uppgávusvarum, síðan byrjað var við landsroyndunum, møguliga er hetta tí, at næmingarnir venja seg við gomlu uppgávunum gjøgnum árið... Tað vóru fáar broytingar gjørdar í uppgávunum í støddfrøði til 6. flokk í ár, og hava hesar tí verið rættuliga líkar øll árini, bæði í innihaldi og í mun til evni og torleikastig og skipan."*

Fimtihvør svargevi sigur sig ikki nýta úrslitið til nakað serligt, og tá ið so er, hevur landsroyndin lítið virði *(t.e. eftirmeting uttan nakað ítøkiligt endamál).*

Tað er ikki nakar eygsýniligur kynsmunur í hesum spurningi.




Ritmynd 151 vísir, at 60% av svargevunum halda, at lærarin í føroyskum, støddfrøði og N/T hevur annaðhvørt "sera stóra ávirkan" ella "stóra ávirkan" á, hvussu næmingarnir standa seg í landsroyndini. 35,6% halda, at lærarin hevur "eitt sindur av ávirkan", meðan bara 4,4% halda, at lærarin hevur "lítla ávirkan".

Prosenttølini eru tekin um, at svargevarnir hava ta sannføring, at tað er neyvt samband millum (1) ta undirvísing, ið lærarin fyrireikar og fremur í verki undan landsroyndini og (2) ta vitan og teir førleikar, ið næmingarnir vísa við landsroyndarborðið.

Samanber ein talvu 151 við talvu 143 kann ein siga, at svargevarnir halda, at lærarar sum heild hava størri ávirkan á landsroyndarúrslitið enn úrslitið av PISA-kanningini. Ella sagt øðrvísi: Landsroyndin endurspeglar í størri mun undirvísingina í føroyska fólkaskúlanum, enn PISA-kanningin ger.

Um vit hyggja at starvsaldri, so sæst, at svargevar, ið tóku prógv í 2007, 2008, 2009 og 2010 halda læraran hava størri ávirkan á landsroyndarúrslitið enn svargevar, ið tóku prógv í 2011.




Ritmynd 152 vísir, at svargevarnir halda ikki, at landsroyndin í sjálvum sær hevur kollvelt undirvísingina í føroyska fólkaskúlanum. 1,8% av svargevunum halda, at landsroyndin hevur gjørt undirvísingina "nógv betri" og 8,9% halda, at landsroyndin hevur gjørt undirvísingina "verri". Restin – t.e. 89,3% av svargevunum – halda, at landsroyndin annaðhvørt hevur gjørt undirvísingina "eitt sindur betri" ella hevur "onga ávirkan" havt á undirvísingina.

Kvinnuligir svargevar geva sum heild landsroyndini betri skotsmál enn mannligir svargevar.

- 68,9% av kvinnuligu svargevunum siga, at landsroyndin hevur gjørt undirvísingina "eitt sindur betri".
- 41,2% av mannligu svargevunum siga, at landsroyndin hevur gjørt undirvísingina eitt "sindur betri".

## 153. Kanst tú grunda fyri tínum svari?

Sum talva 152 vísir, so eru svargevarnir í tvíningum. Teir svargevar, ið halda, at landsroyndin hevur verið til gagns fyri føroyska fólkaskúlan, siga m.a.:

> **At landsroyndin og nýggju námsætlanirnar fara at gera undirvísingartilboðið runt landið meiri líkt:** Ein svargevi skrivar: *"Landsroyndin (og nýggju námsætlanirnar) fara at homogenisera undirvísingina frá skúla til skúla. Og tað er gott".*
>
> **At landsroyndin ger, at undirvísingin í føroyskum, støddfrøði og N&T verður meiri málrættað.** Ein svargevi skrivar: *"Lærarin verður noyddur at seta ítøkilig mál fyri flokkin, ið hann roynir at náa. Haldi, at ein trupulleiki hevur verið, at nógvir lærarar ikki hava nóg ítøkilig faklig mál".* Ein annar skrivar: *"Landsroyndin ger undirvísingina meiri effektiva í málløru, rættskriving og lesing, tí lærarin vil, at hansara næmingar skulu fáa meiri burturúr".*

**At landsroyndin skapar eina sunna kapping millum lærarar, flokkar og skúlar:** Ein svargevi skrivar: *"Mín flokkur verður sammettur við aðrar flokkar... Og eingin lærari vil vera ringastur..."*

**At landsroyndin er motiverandi fyri læraran:** Ein svargevi skrivar: *"Sum lærari er tað motiverandi at arbeiða fram ímóti eini uppgávu, har úrslitið sæst".* Ein annar skrivar: *"Landsroyndin fær læraran at gera meiri burturúr".* Ein triði skrivar: *"Landsroyndin ger, at uppsteðgaðir lærarar rakna við".*

**At landsroyndin er motiverandi fyri næmingarnar**. Ein svargevi skrivar:*"Næmingarnir vera sera móttakiligir fyri undirvísing, eitt nú í mállæru, tá ið teir vita, at teir skulu til roynd og fáa eitt úrslit".*

**At landsroyndin er motiverandi fyri foreldrini.**

**At í landsroyndini verður tann einstaki næmingurin eftirmettur:** Ein svargevi skrivar: *"Tá ið eftirmetingarúrslitið kemur, so vita vit, um tað, ið vit hava verið ígjøgnum, hevur fest seg hjá einstaka næminginum... Hevur tað ikki fest seg, so mugu vit venda við aftur... Landsroyndin ger ikki undirvísingina góða. Tað er, hvat hon verður brúkt til av einstaka læraranum, ið er umráðandi..."*

**At í landsroyndini verður einstaki lærarin eftirmettur.**

**At landsroyndin gevur læraranum tryggleika. Onkur heldur eyga við og blástemplar undirvísingina:** Ein svargevi skrivar: *"Mær dámar væl, at onkrar eksternar royndir eru, sum siga, hvussu støðan er... So veit mann, um mann er á rættari leið ella ikki".*

Teir svargevar, ið halda, at landsroyndin ikki hevur gjørt undirvísingina í føroyska fólkaskúlanum betri – heldur tvørturímóti -, siga m.a.:

**At landsroyndirnar líkjast alt ov nógv frá ári til árs.** Ein svargevi skrivar: *"Landsroyndirnar broytast millum lítið og einki frá ári til ár. Tískil er venjing av gomlum royndum lættasti mátin at fáa góð úrslit. So eg trúgvi ikki, at hatta ávirkar skúlan ella undirvísingina annað enn, at eg annaðhvørt ár venji gamlar royndir við flokkinum".*

**At landsroyndirnar elva til "teaching to the test".** Ein svargevi skrivar: *"Lærarin veit, hvørjar uppgávurnar nøkurlunda koma at verða, tí undirvísir hann eftir tí"*. Ein annar svargevi skrivar: *"Eg haldi, at við at fáa eina slíka testmentan er vandi fyri, at lærarin fær alt ov lítla ávirkan á, hvat undirvísast skal í, tí hann fer at laga undirvísingina til royndirnar – teaching to the test".* Ein triði svargevi skrivar: *"Tí at lærarin undirvísir í mun til uppgávur sum møguliga verða í royndunum, og restin verður sett til síðis. Eg haldi ikki, at landsroyndin er nóg gjøgnumførd. Tú kanst venja royndina og fáa góð úrslit, sjálvt um tú ikki dugir evnið".*

**At landsroyndirnar gera, at kreativ innsløg verða skorin burtur úr undirvísingini**. Ein svargevi skrivar*: "Lærarar hava lyndi til at leggja áherðslu á tað, sum kemur fyri í landsroyndini, og tað meini eg ikki er rætt. Á tann hátt verður undirvísingin alt ov eintáttað".* Ein annar skrivar: *"Nógv av tí stuttliga og kreativa má skerast burtur, tí næmingar skulu øva gamlar landsroyndir".*

**At landsroyndarúrslitið kemur ov seint:** Ein svargevi skrivar: *"Landsroyndarúrslitini koma alt ov seint til, at tey kunnu brúkast til nakað skilagott".*

**At einstaki næmingurin ikki fær innlit í sítt egna úrslit.** Ein svargevi skrivar: *"Tað er undarligt, at næmingarnir ikki fáa sína egnu roynd aftur. Sostatt vita teir ikki, hvat teir megnaðu væl, og hvat teir ikki megnaðu".*

**At næmingarnir eru ov ungir at taka royndina í álvara.**

**At landsroyndin stundum hevur verið illa úr hondum greidd.** Ein svargevi skrivar: *"Landsroyndirnar eru ofta illa frágingnar, stavivillur og aðrar villur koma ov ofta fyri, og í summum royndum (t.d. 4. fl.) eru ymiskir spurningar, sum ikki eru pensum fyrr enn seinni (í 5. fl.)".*

**At landsroyndirnar í onkrum lærugreinum noyða læraran at nýta føroyskt tilfar.** Ein svargevi skrivar: *"Í N&T (...) tíð er heldur ikki at arbeiða við spennandi útlendskum tilfari, tí landsroyndin bara byggir á føroyskar lærubøkur".*

**At landsroyndir (í N&T) skuldu ligið um veturin og ikki um várið**. Ein svargevi skrivar: *"Vit hava nýtt alt ov nógva tíð til at fyrireika okkum og hava terpað í vikuvís gamlar landsroyndir. Og so liggur landsroyndin um várið. Tað er so keðiligt fyri N&T-fakið, tí um várið skal ein fara út í náttúruna við næmingunum... Landsroyndin skuldi verið í desember, tá ið náttúran liggur í dvala".*

**At landsroyndir eru eitt slag av politiskum eftirliti.**

## 154. Hvørjar lærugreinar eru týdningarmestar í 21. øld?

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Støddfrøði | 72,5% |
| 2 | Enskt | 68,8% |
| 3 | Føroyskt | 67,5% |
| 4 | Ítrótt | 11,3% |
| | Samfelagsfrøði | 11,3% |
| 6 | Søga | 8,8% |
| | N/T | 8,8% |
| 8 | Alisfrøði | 7,5% |
| 9 | Myndlist/evning | 4,4% |
| 10 | Evnafrøði | 3,8% |
| | Lívfrøði | 3,8% |
| 12 | Tónleik | 2,2% |
| 13 | Kristni | 1,1% |
| | Danskt | 1,1% |
| | Týskt | 1,1% |
| | Heimstaðarlæra | 1,1% |
| 17 | Landalæra | |
| | Handarbeiði | |
| | Smíð | |
| | Heimkunnleiki | |

Í hesum spurningi høvdu svargevarnir møguleika at seta millum 1 og 3 krossar.

Talva 154 vísir, at líkamikið hvørji linjufak svargevarnir høvdu á Føroya læraraskúla, so er stór semja um, at tað eru tríggjar lærugreinar, ið hava serligan týdning í 21. øld. Støddfrøði, ið umboðar tey logisku og matematisku skilevnini. Enskt, sum er høvuðsmálið í alheimsgerðini og føroyskt, sum er móðurmálið.

Sambært svargevunum hava hinar lærugreinarnar ikki eins stóran týdning.

Um hugt verður at tíma- og lærugreinabýtinum tey 10 skúlaárini, so hevur støddfrøði, sum nú er, 54 tímar tilsamans, enskt hevur 25 tímar, og føroyskt hevur 68 tímar.

## 155. **Eru lærugreinar í fólkaskúlanum, ið eru ótíðarhóskandi, og sum eiga at verða tiknar av tímatalvu skúlans?**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Týskt | 18,8% |
| 2 | Kristni | 12,5% |
| 3 | Danskt | 3,8% |
| 4 | Heimstaðarlæra | 2,5% |
| 5 | Myndlist | 2,5% |
| 6 | Handarbeiði | 2,5% |
| 7 | Evnafrøði | 1,3% |
| 8 | Smíð | 1,3% |
| 9 | Ítrótt | 1,3% |

Í spurningi 155 høvdu svargevarnir møguleika at seta tríggjar krossar. Nakrir svargevar settu 3 krossar, nakrir settu tveir, nakrir settu ein, men ein stórur meiriluti setti ongan kross. Hetta merkir, at meirilutin heldur, at allar lærugreinar, ið vóru á tímatalvu skúlans í 2011/2012, hava týdning og eiga at verða varðveittar.

Talva 155 vísir tó, at tær lærugreinar, ið flestir svargevar flokka sum avlagaðar, eru týskt og kristni.

Taka vit týskt fyrst, so siga svargevarnir, at í samskiftinum millum lond, hevur týska málið tapt dystin fyri enska málinum. Tí eigur týska málið at verða strikað, og enska málið at verða styrkt.

Hyggja vit tínæst at kristni, so vísa svargevarnir til trúarfrælsið og siga, at kristni átti at itið religión ella okkurt líknandi.[47]

Um hugt verður at tíma- og lærugreinabýtinum tey 10 skúlaárini, so hevur kristni, sum nú er, 18 tímar og týskt 8/12 tímar.[48]

[47] Í nýggju námsætlanunum eitur lærugreinin ikki "kristni" men "kristnikunnleiki og átrúnaður".
[48] Næmingarnir hava týskt 4 tímar um vikuna í 8. og 9. flokki. Í 10. flokki er týskt valfak 4 tímar um vikuna.

## 156. Heldur tú, at vit eiga at fáa nýggjar lærugreinar á tímatalvuna. Um ja, hvørjar:

Spurningur 156 er ein opin spurningur. Umleið helmingurin av svargevunum heldur, at vit eiga at fáa nýggjar lærugreinar á tímatalvuna. Hin helmingurin heldur ikki, at hetta er neyðugt.

Um vit hyggja at teimum, ið vilja hava nýggjar lærugreinar inn í skúlan, so kunnu svarini skiftast sundur í sjey høvuðsbólkar:

(1) Kunningartøkni: Maskinskriving, blindskrift, grundleggjandi excel, grundleggjandi tekstviðgerð, teldulæra, programmering, alnót, miðlalæra.
(2) Vinnulív: Íverksetan, vinnumøguleikar, handilsskap, business, innovatión.
(3) Samfelagsvísindi: Lógir í Føroyum og altjóða mannarættindi, sosial- og samfelagsviðurskifti, samfelagsvísindi, politikkur, fólkaræði.
(4) Málvísindi: Norðurlendsk mál, franskt, spanskt.
(5) Hugvísindi: Heimsspeki, religión, sálarfrøði, drama, listasøga.
(6) Náttúruvísindi: Heilsulæra.
(7) Floksins tími.

Nøkur av uppskotunum hava fyrr verið á tímatalvu skúlans. T.d. floksins tími og maskinskriving. Onnur eru nýggj. T.d. íverksetan, heimsspeki og fólkaræði.

# Kap. 11

# Eftirútbúgvingartørvur




Ritmynd 157 vísir, at 42% av svargevunum hava tikið (ella taka) eina pedagogiska eftirútbúgving og/ella skeið, síðan teir fóru av Frælsinum.

Um hugt verður at starvsaldri, so siga:

- 63,2% av teimum, ið tóku prógv í 2007, at tey hava tikið lut í pedagogiskum skeiðum o.ø., síðan tey tóku læraraprógv. *(T.e. 78,6% av kvinnuligu svargevunum og 20% av mannligu svargevunum).*
- 21,1% av teimum, ið tóku prógv í 2011, at tey hava tikið lut í pedagogiskum skeiðum o.ø., síðan tey tóku læraraprógv. *(T.e. 21,4% av kvinnuligu svargevunum og 20% av mannligu svargevunum).*

Um hugt verður at kynsbýti, so hava 44,9% av kvinnunum og 34,8% av monnunum tikið pedagogisk skeið og/ella eru farin undir framhaldslestur, síðan tey tóku læraraprógv.




Ritmynd 158 vísir, at 65% av svargevunum, ið hava tikið lut í pedagogiskum skeiðum o.ø., hava tikið skeið, ið Landsmiðstøðini/Nám hevur skipað fyri. Hetta prosenttalið er nógv tað størsta í ritmynd 158, og kann ein tí siga, at fakligt og didaktiskt viðlíkahald og nýhugsan í føroyska fólkaskúlanum í stóran mun er treytað av tí skeiðstilboði, ið Nám bjóðar út gjøgnum ár og dag.

34,5% av øllum kvinnuligum svargevum hava verið á skeiði, ið Nám/Landsmiðstøðin, hevur skipað fyri. *(64,3% av øllum kvinnum, ið tóku prógv í 2007, hava verið á tílíkum skeiði/skeiðum).*

26,1% av øllum mannligum svargevum hava verið á skeiði, ið Nám/Landsmiðstøðin hevur skipað fyri. *(20% av øllum monnum, ið tóku prógv í 2007, hava verið á tílíkum skeiði/skeiðum).*

15% av teimum, ið hava tikið eftirútbúgvingar/pedagogisk skeið, hava tikið (ella taka) BA-ískoyti á útlendskum lærustovni. *(T.e. 7,4% av øllum svargevum).*

12,5% av teimum, ið hava tikið eftirútbúgvingar/pedagogisk skeið, hava tikið (ella taka) eina MA ella kandidatútbúgving í DK. *(T.e. 6,2% av øllum svargevum. 5,2% av øllum kvinnum og 8,7% av øllum monnum).*

80% av teimum, ið taka eina MA ella kandidatútbúgving tóku prógv í 2009 og koma sostatt úr sama læraraflokki.




Ritmynd 159 talar fyri seg: Svargevarnir siga næstan við ein munn, at teir hava tørv á eftirútbúgving, at teir hava hug at taka eina eftirútbúgving. Og at teir hava dirvi at eftirútbúgva seg.

Helmingurin av svargevunum siga seg megna – ella lutvíst megna - at gjalda sína egnu eftirútbúgving, meðan hin helmingurin sigur sig ikki hava henda møguleika.[49]

Um vit hyggja at teimum, ið tóku prógv í 2007, so siga 57,9%, at tey "so avgjørt" hava tørv á eftirútbúgving, 78,9% siga, at tey "so avgjørt" hava hug at eftirútbúgva seg, 78,9% siga, at tey "so avgjørt" hava dirvi at eftirútbúgva seg. Og 26,3% siga, at tey "so avgjørt" hava møguleika at eftirútbúgva seg, hóast tey skulu rinda sjálv.

Um vit hyggja at teimum, ið tóku prógv í 2011, so siga 56,3%, at tey "so avgjørt" hava tørv á eftirútbúgving, 52,9% siga, at tey "so avgjørt" hava hug at eftirútbúgva seg, 52,9% siga, at tey "so avgjørt" hava dirvi at eftirútbúgva seg. Og 5,9% siga, at tey "so avgjørt" hava møguleika at eftirútbúgva seg, sjálvt um tey skulu rinda sjálv.

Tað, ið er áhugavert, tá ið ein hyggur at starvsaldri, er:

- At so nógvir svargevar, ið tóku prógv í 2011 og sostatt hava eina eitt ára gamla lærararútbúgving, siga seg hava tørv á eftirútbúgving.
- At nærum allir svargevarnir siga seg hava hug at eftirútbúgva seg, men at hesin hugur veksur við árunum.
- At størsti parturin av svargevunum sigur seg hava dirvi at eftirútbúgva seg – men hetta dirvið sær út til at vaksa, tess longur ein hevur verið lærari.
- At tess longur ein lærari hevur verið í starvi, tess fúsari er hann at gjalda sítt egna eftirútbúgvingartilboð.

[49] Tá ið spurt verður, um svargevarnir hava møguleika at fíggja sína egnu eftirútbúgving, eru tað fleiri, ið viðmerkja, at tað veldst um, hvat eftirútbúgvingin kostar. Hevði spurningur 159 verið neyvari, hevði svarið verið meiri álítandi.




Ritmynd 160 vísir, at 88,6% av svargevunum siga, at teir kundu hugsað sær at tikið eitt linjufak afturat, um teir fingu henda møguleika.[50]

Hugurin at taka eitt linjufak afturat er hvørki ávirkaður av starvsaldri ella kyni.

[50] Seinnu árini hevur føroyskum fólkskúlalærarum staðið í boði at taka eitt linjufak afturat á Føroya læraraskúla. Tað eru ikki nógvir lærarar, ið hava tikið av hesum tilboði.

## 161. Um svarið er ja, hvat/hvørji linjufak kundi tú so hugsað tær at lisið? (Set í mesta lagi 3 krossar)

| | Linjugrein | Tal av lærarum | % av svargevunum | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Pedagogisk leiðsla | 23 | 28,4% | 60,9% (24,1%)* | 39,1% (39,1%)* |
| 2 | Sernámsfrøði | 22 | 27,2% | 81,8% (31%) | 18,2% (17,4%) |
| 3 | Innskúling | 20 | 24,7% | 95% (31%) | 5% (4,3%) |
| 4 | Føroyskt | 16 | 19,8% | 93,8% (25,9%) | 6,2% (4,3%) |
| 5 | N&T | 14 | 17,3% | 57,1% (13,8%) | 42,9% (26,1%) |
| 6 | Støddfrøði | 13 | 16,0% | 38,5% (8,6%) | 61,5% (34,8%) |
| 7 | Danskt | 8 | 10,0% | 87,5% (12,1%) | 12,5% (4,3%) |
| 8 | Kristni | 7 | 8,6% | 71,4% (8,6%) | 28,6% (8,7%) |
| | Enskt | 7 | 8,6% | 57,1% (6,9%) | 42,9% (8,7%) |
| 10 | Alis- og evnafrøði | 6 | 7,4% | 16,7% (1,7%) | 83,3% (21,7%) |
| | Søga | 6 | 7,4% | 100% (10,3%) | |
| 12 | Lívfrøði | 5 | 6,2% | 60% (5,2%) | 40% (8,7%) |
| | Týskt | 5 | 6,2% | 100% (8,2%) | |
| 14 | Myndlist | 4 | 5,0% | 100% (6,8%) | |
| | Landalæra | 4 | 5,0% | 75% (51,7%) | 25% (4,3%) |
| | Samfelagsfrøði | 4 | 5,0% | 50% (3,4%) | 50% (8,7%) |
| 17 | Tónleik | 2 | 2,5% | 50% (1,7%) | 50% (4,3%) |
| 18 | Handarbeiði | 1 | 1,3% | 100% (1,7%) | |

* merkir: % av teimum ávikavist 58 og 23 monnunum, ið hava svarað spurnablaðnum.

Í ritmynd 161 sæst, at tað serliga eru nýggju linjufakini á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya, ið svargevarnir fylkjast um. Linjufakini pedagogisk leiðsla, sernámsfrøði og innskúling hava øll tað til felags, at tey eru tvørnámslig. Hesi linjufak taka sostatt ikki støði í einari siðbundnari lærugrein í fólkaskúlanum.

Nærlesur ein einstøku spurnabløðini, so sæst, at mannligu svargevarnir serliga fylkjast um pedagogiska leiðslu[51], meðan kvinnuligu svargevarnir fylkjast um sernámsfrøði og innskúling.

Av siðbundnu skúlafakunum eru tað føroyskt, N&T og støddfrøði, ið fáa størstu undirtøku. Føroyskt og støddfrøði fáa óivað undirtøku, tí hetta eru tær størstu lærugreinarnar í fólkaskúlanum, og N&T fær óivað undirtøku, tí at skúlunum kring landið vanta linjufakslærarar í hesi lærugrein.




Ritmynd 162 vísir, at áhugin at taka BEd-ískoytið er rættuliga stórur. 2/3 av øllum svargevum kundu hugsað sær at tikið BEd-ískoytið. Starvsaldurin hevur ikki stóra ávirkan á, hvussu svargevarnir svara. 72,2% av teimum, ið tóku prógv 2007, og 72,2% av teimum, ið tóku prógv í 2011, kundu hugsað sær at tikið BEd-ískoytið.

Tað er eingin kynsmunur í hesum spurningi.

[51] Linjufakið "pedagogisk leiðsla" fevnir bæði um sjálvsleiðslu, toymisleiðslu, verkætlanarleiðslu, floksleiðslu (t.e. classroom management) og skúlaleiðslu. Í viðmerkingunum er eyðsæð, at mannligu svargevarnir serliga eru áhugaðir í skúlaleiðslu, meðan kvinnuligu svargevarnir eru áhugaðar í floksleiðslu.




Í spurningi 163 høvdu svargevarnir møguleika at seta ein ella tveir krossar. Ein partur av svargevunum valdi at seta tveir krossar heldur enn ein.

Ritmynd 163 vísir, at svargevarnir eru rættuliga samdir um, at tann didaktiski og yrkisrættaði parturin eigur at fylla mest í einum BEd-ískoyti. Ein fólkaskúlalærari er ikki serfrøðingur í føroyskum, donskum og støddfrøði. Ein fólkaskúlalærari er fyrst og fremst serfrøðingur í undirvísing. T.e. at hann skal duga at leggja fjølbroyttar undirvísingargongdir til rættis í ymiskum lærugreinum og á ymiskum floksstigum. Og hann skal duga at skapa eitt gott læruumhvørvi.

Ritmynd 163 vísir, at 56,3% av svargevunum siga, at floksleiðsla eigur at verða høvuðsevnið í BEd-ískoytinum, og 50% av svargevunum siga, at didaktiskir førleikar eiga at verða høvuðsevnið. Í báðum førum eru kjarnuøkini undirvísing, undirvísingar-tilgongdir, miðling, samskifti og leiðsla.

Við øðrum orðum heldur ein stórur meiriluti av svargevunum, at Bachelor of Education eigur at hava "education" í breiðari merking sum snúningsása. Hetta merkir ikki, at faklig hugdýping skal trekkjast úr BEd-ískoytinum, men at faklig hugdýping altíð eigur at setast í eitt didaktiskt og yrkisrættað ljós.




Í spurningi 164 høvdu svargevarnir møguleika at seta ein ella tveir krossar. Ein partur av svargevunum valdi at seta tveir krossar.

Ritmynd 164 vísir, at ein lítil helmingur (t.e. 47,5%) av svargevunum uppfatar BEd-ískoytið sum fakliga og didaktiska førleikamenning. Hesir svargevarnir kundu hugsað sær at hildið fram í tí skúla, við teimum flokkum, og við tí tímatalvu, teir hava í dag. Men teir halda, at BEd-prógvið kann gera teir til enn betri undirvísarar.

Ein stórur fjórðingur  av svargevunum (t.e. 28,8%) sigur, at teir kundu hugsað sær at hildið fram í núverandi skúla, men at BEd-ískoytið kanska kundi givið teimum aðrar og fleiri avbjóðandi uppgávur, enn teir hava í dag. Onkur svargevi nevnir serundirvísing sum dømi. Onkur annar nevnir innskúling og pedagogiska leiðslu sum dømi. Onkur triði nevnir, at viðkomandi kundi hugsað sær at undirvíst í øðrum fakum, enn viðkomandi undirvísir í í dag.

Ein stórur fjórðingur (t.e. 28,8%) sigur seg hava í hyggju at fara undir framhaldslestur og møguliga fingið starv aðrastaðnis enn í fólkaskúlanum. BEd-ískoytið er fyrsti liður (ella millum liður) í hesi gongd. At taka annaðhvørt eina MA ella eina kandidatútbúgving á Danmarks Pædagogiske Universitetsskole (DPU) verður nevnt sum dømi. Og eitt framtíðarstarv sum lærari á Námsvísindadeildini verður nevnd sum framtíðarætlan ella ynski.

- 34,8% av mannligu svargevunum og 27,3% av kvinnuligu svargevunum kundu hugsað sær at farið undir framhaldslestur.

Ein fjórðingur knýtir BEd-ískoytið saman við lønarspurninginum. Fólk, ið hava eina BA-útbúgving, og sum eru limir í Akademikarafelagnum, fáa hægri endaløn enn ein fólkaskúlalærari, sum er limur í Føroya lærarafelag. Tað eru serliga svargevar, ið hava tikið prógv í 2010 og 2011, ið nevna lønarspurningin sum drívmegi.

8,8% av svargevunum siga, at teir kundu hugsað sær at tikið eitt BEd-ískoyti, tí teir sakna at ganga í skúla. BEd-ískoytið er tískil ein partur av persónligu menningini. – Tað eru í høvuðsheitum kvinnuligir svargevar, sum tóku læraraprógv fyri 4 ella 5 árum síðani, ið eru í hesum bólki.




Ritmynd 165 vísir, at um so var, at eitt BEd-ískoyti kostaði 15.000 kr,- og tann einstaki svargevin skuldi goldið sjálvur, so hevði 1/3 tikið ískoytið kortini, 1/3 ivast, meðan 1/3 hevði setst aftur.[52]

39,1% av mannligu svargevunum og 31,5% av kvinnuligu svargevunum siga, at teir ikki høvdu farið undir BEd-ískoytið, um teir skuldu goldið sjálvir.

Tað eru lutfalsliga fleiri svargevar, ið hava tikið prógv í 2007 og 2008, ið siga, at teir høvdu farið undir BEd-ískoytið, sjálvt um ískoytið kostaði 15.000 kr,-

[52] Tað er siðvenja, at tá ið fólkaskúlalærarar taka lut í skeiðum, ið snúgva seg um formliga førleikamenning, so verða hesi skeið goldin av Mentamálaráðnum. Í TALIS-kanningini stendur: *"79% av svargevarunum, ið hava luttikið í formligari førleikamenning seinastu 18 mánaðirnar, hava ikki goldið fyri virksemið, teir hava luttikið í. 17% hava goldið ein part og 4% hava goldið alt" … "79% av svargevarunum, ið hava luttikið í formligari førleikamenning, hava havt førleikamennandi virksemi sum part av tímaætlanini í vanligari arbeiðstíð" … "6% av svargevarunum hava fingið lønaríkoyti í sambandi við førleikamennandi virksemi uttan fyri vanliga arbeiðstíð. 72% hava ikki fingið lønaríkoyti, og 22% hava ikki luttikið í førleikamennandi virksemi uttan fyri vanliga arbeiðstíð."* (s. 6)




Ritmynd 166 vísir, at 61,8% av svargevunum halda, at BEd-ískoytið kann gera teir til betri lærarar. Sagt á annan hátt væntar hesin bólkur, at tað er stórt samband millum innihaldið í BEd-ískoytinum og dagligu undirvísingina í fólkaskúlanum.

7,9% av svargevunum halda ikki, at BEd-ískoytið fer at gera teir til betri lærarar.[53]

30,3% av svargevunum eru ivasamir. Teir duga ikki í núverandi støðu at ímynda sær, um innihaldið í BEd-ískoytinum verður soleiðis háttað, at tað beinleiðis kann koma dagligu undirvísingini í fólkaskúlanum til góðar, ella um innihaldið er á slíkum stigi og av slíkum slag, at tað ikki kann bindast saman við tær uppgávur og tær avbjóðingar, ið lærarar takast við í føroyska skúlanum í 2012.




Ritmynd 167 vísir, at 86% av svargevunum kundu hugsað sær, at Føroya læraraskúli skipaði fyri dags- og vikuskeiðum fyri útbúnum lærarum.

[53] 1/3 av teimum svargevum, ið ikki halda, at BEd-ískoytið fer at gera teir til betri lærarar, hava tikið BEd-ískoyti á útlendskum universiteti.

Starvsaldur og kyn hevur onga ávirkan á, hvussu svargevarnir svara.

Størsti parturin av teimum, ið vísa skeiðstilboðnum frá sær:

- Arbeiða ikki sum lærarar í dag.
- Arbeiða uttanlands.
- Arbeiða sum lærarar í útjaðaranum.

## 168. Um so varð, at Føroya læraraskúli fór at skipa fyri dags- og vikuskeiðum, hvat skuldu skeiðini serliga snúð seg um?

Svargevarnir hava fjølbroyttan ynskilista, tá ið teir verða spurdir, hvørji styttri skeið Námsvísindadeildin eigur at bjóða út í næstum.

Niðanfyri eru nevndu skeiðsevnini skipað í 12 bólkar:

**Einstøku lærugreinarnar/skúlafakini:** Skeið, ið taka støði í einstøku skúlafakunum. (1) Nýggjasta vitanin um, hvussu ein arbeiðir við einstøku lærugreinunum í øðrum londum – t.d. í Finlandi og Kina. (2) Hvørjir undirvísingarhættir verða nýttir ella kunnu nýtast í ymiskum lærugreinum – t.d. í kristni og lívfrøði. (3) Fakligar ráðstevnur, har lærarar, sum undirvísa í somu lærugreinum (t.d. støddfrøði, N&T og enskum), kunnu vísa hvør øðrum, hvussu teir skipa sína undirvísing, og hvat tilfar teir nýta, (4) fakdidaktikk sum hugtak, fyribrigdi og reflektiónsamboð. (5) At seta undirvísingartilfar saman og/ella at gera undirvísingartilfar. (6) Hvar skal -ð´ið standa í føroyskari stavseting? (7) Hvussu skipar ein undirvísingina í enskari mállæru? (8) Hvussu fáa lærarar næmingar at dáma støddfrøði? (9) Hvussu nýta vit náttúruna í undirvísingini? (10) Hvussu nýta vit list í undirvísingini? (11) Seymiskeið. (12) Svimjilæraraprógv.

**Tvørnámslig skeið - námsfrøði, sálarfrøði og almenn didaktisk viðurskifti:** Skeið, ið ikki taka støði í eini ávísari lærugrein: (13) Grundleggjandi námsfrøði. (14) Grundleggjandi sálafrøði. (15) Grundleggjandi læringarástøði. (16) Almenn didaktiskar reflektiónir. (17) Grundskeið í ymiskum undirvísingarhættum. (18) Næmingalagað undirvísing. (19) Sosialkonstruktivistisk lærufatan. (20) Innovatión og øðrvísi undirvísingartilgongdir. (21) Kreativar undirvísingartilgongdir. (22) Virðiligt samskifti við næmingarnar. (23) Toymissamstarv. (24) PBL - Hvat ger ein í ítøkiligum støðum? (25) At undirvísa í innskúling. (26) At undirvísa í miðdeild. (27) At undirvísa í hádeild. (28) Nýggj granskingarúrslit á skúlaøkinum. (29) Sálafrøði og lærarans persónliga menning. (30) Tann góði lærarin – hvussu ber hann seg at? (31) Motivatión - at motivera seg sjálvan og at motivera næmingarnar. (32) At loysa konfliktir. (33) Børn og rúsdrekka. (34) Seksualfrálæra í fólkaskúlanum.

**Floksleiðsla:** (35) Skeið, ið snúgva seg um, hvussu ein skapar arbeiðsró og gott arbeiðslag í flokshølinum.

**Sernámsfrøðiliga økið:** (36) At undirvísa næmingum, ið hava lesi-, skrivi- og roknitrupulleikar. (37) At undirvísa næmingum, ið hava ADHD. (38) At undirvísa næmingum, ið hava autismu. (39) At undirvísa næmingum, ið hava atferðartrupulleikar. (40) At handfara truplar støður – bæði næmingar og avvarðandi. (41) Tagnarskylda og fráboðanarskylda.

**Serliga gávaðir næmingar**: (42) Hvussu gevi eg teimum gávaðu næmingunum hóskandi avbjóðingar?

**Eftirmeting:** (43) Pedagogisk dokumentatión. (44) At geva próvtal. (45) At gera próvtøkuspurningar og/ella uppgávur í 9. og 10. flokki.

**KT í undirvísingini**: (46) Samvirkna talvan. (47) KT sum undirvísingaramboð. (48) KT-vørður.

**Foreldrasamstarv:** (49) Foreldrasamstarv sum heild. (50) Foreldraviðtalur. (51) Foreldrafundir.

**Nýggju námsætlanirnar:** (52) Hvussu skulu nýggju námsætlanirnar lesast, skiljast og nýtast?

**Ársætlan:** (53) Grundskeið í, hvussu ein ársætlan verður orðað og sett saman.

**Flokslæraraleikluturin:** (54) Hvør er leikluturin hjá flokslæraranum? - Hvar byrjar hesin leiklutur, og hvar endar hann?

**Skeið í skúlaleiðslu:** (55) At leiða ein skúla og at leiða professionellar lærarar.

# Kap. 12

# Ískoytisspurningar

## - ætlaðir føroyskum skúlastjórum og fyrstu lærarum

INNGANGUR: Fyri at fáa at greiðu á, um tað er samheingi millum, hvørji linjufak einstøku svargevarnir kundu hugsað sær at lisið afturat á Føroya læraraskúla (sí ritmynd 161) og veruliga tørvin í føroyska fólkaskúlanum, fingu føroyskir skúlastjórar og fyrstu lærarar handað eitt spurnablað á árliga skúlaleiðaradegnum, ið varð hildin á skeiðsdeplinum í Skálavík fríggjadagin 21. september 2012.

Spurnablaðið er talt upp, og úrslitið verður lýst í ritmynd 169, 170 og 171.




Ritmynd 169 vísir, at 26 skúlastjórar og fyrstu lærarar svaraðu spurnablaðnum.




Skúlastjórar og fyrstu lærarar vísa í miðal á 4,1 lærugreinar, har teirra skúla tørvar eftirútbúgvingartilboð. (Spennið er úr einari lærugrein til átta lærugreinar).

- 50 næmingar ella færri: 4 lærugreinar í miðal.
- Millum 51 og 100 næmingar: 3,7 lærugreinar í miðal.
- Millum 101 og 200 næmingar: 4,1 lærugreinar í miðal.
- Millum 201 og 300 næmingar: 3 lærugreinar í miðal.
- Yvir 301 næmingar: 5 lærugreinar í miðal.

Ritmynd 170 vísir á hvørjum fakøkjum eftirútbúgvingartørvurin sambært skúlastjórum og fyrstu lærarum er størstur.

18 av 26 svargevum (t.e. 69,2%) vísa á, at eitt eftirútbúgvingartilboð í pedagogiskari leiðslu hevði verið kærkomið. Í viðmerkingunum er tað eyðsæð, at meirilutin av svargevunum hugsar um eitt skeið í pedagogiskari leiðslu og fyrisiting, ið er ætlað teimum sjálvum. Onkur skúlastjóri vísir tó á, at hann skilir hugtakið "pedagogisk leiðsla" sum floksleiðsla (classroom management), og at nógvir lærarar hava tørv á einum tílíkum eftirútbúgvingarskeiði.

Tá ið talan er um vanligar lærugreinar í fólkaskúlanum, er eftirútbúgvingartørvurin størstur í N&T (57,7%), alis- og evnafrøði (50%) og støddfrøði (34,6%). *(Tað er áhugavert at síggja, at av teimum 7 linjufakunum, ið flestu skúlastjórar vísa á, eru 4 náttúrufakslærugreinar. T.e. N&T, alis-og evnafrøði, lívfrøði og landalæra).*

Svargevarnir halda, at eftirútbúgvingartørvurin er millum lítil og eingin í mállærugreinunum føroyskt, danskt, enskt og týskt. *(Hetta er eitt áhugavert úrslit, tí í ritmynd 11.2 sóu vit t.d., at bara 54,1% av øllum tímum í føroyskum vórðu lisnir av linjufakslærarum, og bara 29,4% av øllum tímum í donskum vórðu lisnir av linjufakslærarum).*

Um ein samanber ritmynd 170 við ritmynd 161, so sæst, at tað er ikki neyvt samband millum (1) hvørji linjufak einstøku svargevarnir kundu hugsað sær at tikið afturat á Námsvísindadeildini, og (2) í hvørjum lærugreinum eftirútbúgvingartørvurin í føroyska fólkaskúlanum er størstur.

At samansjóða eftirútbúgvingarhugin hjá einstaka læraranum og eftirútbúgvingartørvin hjá einstaka skúlanum – og føroyska skúlaverkinum sum heild - verður ein avbjóðing bæði hjá MMR og Námsvísindadeildini í framtíðini.

## 171. Hevur tú nakrar almennar viðmerkingar um eftirútbúgvingartørv og møgulig eftirútbúgvingartilboð í Føroyum í 2012?

Skúlastjórar og fyrstu lærarar vísa á hesi øki:

**- KT sum amboð hjá læraranum**

**- KT-vørður**

**- At undirvísa í miðdeild**

**- At undirvísa í hádeild/framhaldsdeild**

**- Alternativir undirvísingarhættir**

**- Administrativ leiðsla**

**- BA í skúlaleiðslu**

**- Svimjilæraraprógv**

## Bókmentalisti

Aisinger, Pernille (2012): Døren op til klasseværelset. Í: *Folkeskolen.* Nr. 15/2012

Beyer, M. & Brinkløv, U. (2003): *Proffesionslæring i praksis*. DPU´s Forlag.

Csonka, Agi (2011): *Ny lærer – En evaluering af nyuddannede læreres møde med folkeskolen.* EVA.

Ejlertsen, M. (2011) Scient´er: Vi mangler kompetence. Í: *Magisterbladet*. Nr. 20/2011.

Fibæk Laursen, Per & Bjerresgaard, Helle (2009): *Praktisk Pædagogik – metoder i folkeskolen*. Gyldendals Lærerbibliotek.

Gade, Ole (2008): Studier af at være ny lærer – især i Norden. Í: *Unge Pædagoger* Nr. 3/2008

Hermansen, Mads & Ryberg, Birgit (2007): Indledning – En undersøgelse af skolens kultur med særlig henblik på disciplin, fagligt udbytte af undervisning og samarbejde. Í: Andersen, Frode Boye o.fl. (ritstj.) *Skolens gode og onde cirkler.* Forlaget Samfundslitteratur.

*Kunngerð nr. 26 frá 7/5-1991 um læraraútbúgving*. MMR.

*Landsroyndin 2011: Frágreiðing um mál, ávegis mál uppgávur og úrslit*. MMR.

Laursen, Per Fibæk (2005): God og effektiv undervisning. Í: Broddersen, Peter (ritstj.) *Effektiv undervisning.* Gyldendals Lærerbibliotek.

Lindhardt, Lars (2008): Hvor lærer en lærer at være lærer. Í: *Unge pædagoger*. Nr. 3/2008

*Læruumhvørvi og arbeiðsumstøður hjá lærarum og skúlaleiðarum.* Tilmæli frá arbeiðsbólki í samband við TALIS-kanningarnar. MMR (Skrivað hava Olaus Jespersen, Magnus Tausen, Hanus Joensen, Nomi Jacobsen, Mai Laksáfoss og Janus Jensen)

Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan. (www.logir.fo)

Olsen, Lars (2007): Ulighed i uddannelse bunder i nye kulturelle barrierer. Í: *Ungdomsforskning.* Nr. 3. Årg. 6. september 2007

*PISA 2009 – Føroyar: Førleikar hjá føroyskum 9. floksn*æmingum. MMR, 2010 (Skrivað hava Erla Højsted, Gunnar Bjarnason & Flóvin Eidesgaard)

Rasch-Christensen, Andreas (2009): Hvorfor underviser jeg, som jeg gør. Í*: Unge Pædagoger*. Nr. 1/2009

Ramberg, Per (2011): *Status vedrørende læreruddannelsen i de nordiske lande*. Fyrilestur hildin á Frælsinum 9/9-2011.

Rasmussen, Jens (2008): Hvad ved vi om god undervisning. Í: *Unge pædagoger.* Nr. 6/2008

Stanek, Henrik (2012): Din undervisning gør mig bedre. Í: *Folkeskolen.* Nr. 15/2012

*TALIS-tengd kanning 2009: Fatan av praksis á skúlaøkinum í Føroyum.* Scharling.dk

Trier, Maria Becher (2012): Lad lederen komme på besøg. Í: *Folkeskolen.* Nr. 15/2012

Woolfolk, Anita (2007): *Pedagogisk psykologi*. Tapir Akademisk Forlag.